METTE STANGE
Lena Jacobsen týddi

# SAMVIRKISNÁM

## OG FLOKSLEIÐSLA



NÁM

METTE STANGE
Lena Jacobsen týddi

# SAMVIRKISNÁM

## OG FLOKSLEIÐSLA

NÁM

Mette Stange
**Samvirkisnám og floksleiðsla**
© NÁM 2016

Lena Jacobsen hevur týtt og lagað til føroyskt
Upprunaheiti: COOPERATIVE LEARNING OG KLASSELEDELSE
© 2012 Dafolo Forlag og rithøvundurin
Rithøvundur: Mette Stange
Ritstjórnað donsku útgávuna: Sophie Ellgaard Soneff og Astrid Holtz
Perma: Lars Clement Kristensen
Grafisk framleiðsla: Dafolo A/S, Frederikshavn

Umbróting og grafiskt arbeiði, før. útg.: Loysnir
Ritstjórnað føroysku útgávuna: Solveig Debess
Rættlestur: Pól Jespersen
ISBN: 978-99918-2-336-2

Nám, Tórshavn 2016
www.nam.fo

# Evnisyvirlit

**Fororð . . . . . . . . . . 6**

Prógv fyri undirvísingarháttinum . . . . . . . . . . 8

Lesivegleiðing . . . . . . . . . . 8

**1 • Samvirkisnám og felagsskapur . . . . . . . . . . 11**

Ger oftari tað, tú gert væl – ikki fleiri kurar! . . . . . . . . . . 11

Soleiðis eru børn – sambært lærarunum . . . . . . . . . . 13

Bólkabýti . . . . . . . . . . 13

Frá bólki til toymi . . . . . . . . . . 14

Venjingar til 1. kapittul . . . . . . . . . . 17

**2 • Floksleiðsla . . . . . . . . . . 37**

Floksleiðsla og ófriður . . . . . . . . . . 38

Floksleiðsla og samvirkisnám . . . . . . . . . . 39

Leikluturin sum lærari . . . . . . . . . . 40

At vera greið/ur . . . . . . . . . . 41

Venjingar til 2. kapittul . . . . . . . . . . 43

**3 • Inklusión . . . . . . . . . . 51**

Rúmligi skúlin, inklusión (íroknan) og eksklusión (útihýsan) . . . . . . . . . . 52

Inklusión og samvirkisnám . . . . . . . . . . 53

Nýggjur næmingur í flokkinum . . . . . . . . . . 54

Venjingar til 3. kapittul . . . . . . . . . . 55

**4 • Viðurkenning . . . . . . . . . . 66**

Læraraførleiki til sambond . . . . . . . . . . 67

Viðurkenning ella rós? . . . . . . . . . . 68

Tey, ið fáa minst rós og viðurkenning, treingja mest til tað . . . . . . . . . . 68

Gáa mest um atferð, ið tú vilt síggja oftari . . . . . . . . . . 69

Rós og samvirkisnám . . . . . . . . . . 69

Venjingar til 4. kapittul . . . . . . . . . . 70

**5 • Samskifti . . . . . . . . . . 78**

Samskifti – er tað bara innantómt tos? . . . . . . . . . . 79

Hvør lurtar eftir hvørjum? . . . . . . . . . . 80

Hvørjum læra vit av? . . . . . . . . . . 80

Samskifti í undirvísingini . . . . . . . . . . 81

Samskifti og samvirkisnám . . . . . . . . . . 81

Samskifti, samvirkisnám og floksleiðsla . . . . . . . . . . 82

Venjingar til 5. kapittul . . . . . . . . . . 83


© NÁM 2016

**6 • Sosialir førleikar hjá næmingunum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 94**

Hvat vænta vit av næmingunum? . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 95
Set tær høg mál . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 96
Legg dent á tað jaliga . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 97
Fatan av eini støðu . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 98
V enjingar til 6. kapittul . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 99

**7 • Foreldrasamstarv . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .110**

Hvat væntar skúlin av foreldrunum? . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .111
Foreldrafundurin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .111
Foreldrasamstarv og floksleiðsla . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .112
Stuðla samvirkisnámi . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .113
Venjingar til 7. kapittul . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .114

**8 • Ymisligir næmingar og samvirkisnám . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 123**

Tey stillføru . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 124
Tey, ið mugu røra seg . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 124
Tey fakliga dugnaligu . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 125
Tey, ið vísa góðan vilja, men ikki megna . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 125
Tey líkasælu . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 126
Venjingar til 8. kapittul . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 127

**9 • Arbeiðið í lærarатoyminum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 139**

Saman megna vit meiri – og betur! . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 140
Floksleiðsla . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .141
Venjingar til 9. kapittul . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 142

**10 • Um nú ... . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 149**

Um nú næmingarnir ikki hava gjørt heimaarbeiðið? . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 150
Hvat geri eg, um eg havi ein ógvuliga veikan næming? . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 150
Hvussu við børnum, ið hava diagnosu, t.d. ADHD? . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 150
Um nú flokkurin skal hava vikar? . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 150
Hvussu stórur partur av undirvísingini skal vera samvirkisnám? . . . . . . . . . . . . .151
Um nú foreldrini ikki vilja, at børnini arbeiða í bólki? . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .151
Um flokshølið er ov trongt at ganga í? . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 152
Kann eg broyta venjingarnar? . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 152

**11 • Frásjónir í samvirkisnámi . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 153**

**Um høvundin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 156**

**Lesnaður . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 158**

**Yvirlit yvir venjingarsíður . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 162**


© NÁM 2016

# Fororð

Fyritreytir mínar fyri at skriva hesa bók eru, at eg havi arbeitt sum lærari í 11 ár og fingist nógv við bólkaávirkan og at finna lykilin til "góðu undirvísingina".

Umframt at vera fólkaskúlalærari havi eg eina tíð arbeitt sum námsfrøðiligur ráðgevi á Center for Undervisningsmidler. Seinastu árini havi eg verið sjálvstøðugur ráðgevi, har eg undirvísi lærarum bæði í samvirkisnámi og floksleiðslu. Við støði í hesum royndum tori eg væl at siga, at eg havi funnið lykilin ella rættari, at eg nú havi eitt heilt lyklatyssi, sum eg kann brúka at opna ymsar hurðar við av og á.

Ein lykil er samvirkisnám, og hesin undirvísingarháttur hevur seinastu árini verið nógv brúktur á øllum floksstigum og í øllum lærugreinum. Bæði fólkaskúli, miðnám og vaksnamannaútbúgving hava fingið eyguni upp fyri, at samvirkisnám kann fáa virkisfýsni og eldhuga við í undirvísingina. Eg havi sjálv havt gleði av venjingum og øðrum virksemi, ið fær næmingarnar at hava størri ábyrgd fyri egnari læring.

Men hvat er samvirkisnám? Hugtakið kann verða týtt sum "samstarv um læring". Soleiðis eitur eisini bókin hjá Asko Leppilampis og Pasi Sahlberg (2004) um samvirkisnám. Annað boð er "læring í felagsskapi", sum eisini er ein góð lýsing av amerikanska samvirkisnámi.

Tað snýr seg so statt um at gera okkurt í felag. At læra saman við øðrum. Læringin hjá næmingunum hendir ikki av sær sjálvum, so lærarin ella tann, ið undirvísir, má leggja til rættis læritilgongdirnar. Tá ber til at hava partar av samvirkisnámi við í fyrireikingini.

Samvirkisnám er eitt slag av skipaðum bólkaarbeiði, har limirnir í toyminum eru knýttir hvør at øðrum. Men hóast samvirkisnám er bólkaarbeiði, so er ikki alt bólkaarbeiði samvirkisnám.

Vit kunnu stutt lýsa meginreglurnar aftan fyri samvirkisnám soleiðis (Leppilampis og Sahlberg 2004):

Undirvísingin er skipað, so tað er eitt **jaligt tilknýti millum limirnar.** Tað vil siga, at úrslitið hjá bólkinum veldst um luttøkuna hjá hvørjum limi sær. Sum limur kanst tú ikki fjala teg aftan fyri nakran, øll skulu luttaka, og ein limur einsamallur kann ikki loysa uppgávuna. Johnson og Johnson úr USA hava hesa lýsing: *Toymið svimur saman ella søkkur til botns saman* (Johnson og Johnson 2007).

**Beinleiðis ávirkan millum limirnar** hevur stóran týdning. Tað skal vera lætt at fara til verka í bólkinum, og limirnir skulu kunna hava eygnasamband hvør við annan og sita tætt saman.


© NÁM 2016

Tað gagnar ikki arbeiðinum, um tað standa rúgvumikil borð millum næmingarnar, men kortini skulu so nógvir næmingar, sum til ber, kunna arbeiða samstundis.

**Ábyrgd hjá hvørjum sær.** Hvør limur í toyminum hevur persónliga ábyrgd fyri øllum arbeiðinum í bólkinum og fyri at ogna sær ta vitan, hini bera fram. Øll vitanin hjá limunum verður soleiðis størri, tá ið bólkaarbeiðið endar, enn tá ið tað byrjar.

**At eftirmeta bólkaarbeiði og læring.** Arbeiðið má enda við eftirmeting av bæði tilgongd og avriki, annars er læringin ikki hin besta. Tað er umráðandi at halda næmingunum føstum í stuðli teirra til bólkaarbeiðið, og hvat teir fáa burturúr læringini.

Spencer Kagan hevur samansjóðað tað frammanfyri nevnda í nakrar meginreglur (Kagan og Stenlev 2006):

- **Á**virkan sínámillum og samstundis.
- **T**ilknýti sínámillum og jaligt.
- **Á**byrgd á hvørjum sær.
- **L**uttøka á jøvnum føti.

Eru hesar meginreglur til staðar, er talan um samvirkisnám. Kagan hevur eisini gjørt skipanir, sum tryggja, at ÁTÁL-meginreglurnar verða fylgdar.

Men hvat samband er millum samvirkisnám og floksleiðslu? Fyri nøkrum árum síðan var eg flokslærari í einum ógvuliga vælvirkandi flokki. Tá spurdi ein starvsfelagi meg, hvat eg hevði gjørt, tí flokkurin var so fittur at koma inn í, og næmingarnir tímdu so væl at gera heimaarbeiði.

Fyrst ætlaði eg at svara, at tað vóru góð børn í flokkinum. Men sum samrøðan leið, varð eg greið yvir, at talan helst var um meiri enn eina hepna samanseting av næmingum. Eg hevði jú gjørt rættiliga nógv fyri at ala upp ein felagsskap, sum legði støðið undir læring og samveru í flokkinum.

Floksleiðsla er í stóran mun at skipa, stuðla og birta upp undir læritilgongdir hjá næmingunum. Floksleiðarin setir seg sjálvan í miðdepilin og er tilvitaður um, hvørji tiltøk rigga í undirvísingini, og hvat kann verða gjørt betur. Persónleikin hjá læraranum hevur stóran týdning, men tað er eisini gott at vita, at øll kunnu gerast betri floksleiðarar! Við at leggja dent á nøkur ítøkilig øki, t.d. innrættan av flokshølinum, eina týðiliga dagsskrá, nógv virksemi í flokkinum og tilvitað at seta saman bólkar av næmingum.

Partar av samvirkisnámi eru eisini við í arbeiðinum hjá floksleiðaranum. Tú kemur inn á rættiliga stóran part av arbeiðinum sum floksleiðari, tá ið tú arbeiðir við samvirkisnámi í flokkinum. Tú tryggjar tær stórt virksemi, meiri rørslu undir læring, og tú hevur tilvitaðar ætlanir fyri at ala upp ein góðan felagsskap í flokkinum.


© NÁM 2016

## Prógv fyri undirvísingarháttinum

Í januar 2011 kom Frans Ørsted Andersen við frágreiðing frá eini gransking í Petersmindeskúlanum í Vejle (Andersen 2011). Hann fylgdi tveimum skúlaflokkum í eini nágreiniligari stakkanning. Tey arbeiddu við samvirkisnámi, og hetta arbeiðið ávirkaði næmingahópin við m.ø., at:

- flokkurin var friðarligari
- tey arbeiddu ágrýtnari
- umstøðurnar um læringina batnaðu sum heild
- næmingarnir trivust betur.

Ávirkanin á lærarahópin var, at:

- undirvísingar- og arbeiðsumstøður batnaðu
- teir upplivdu oftari, at undirvísingin eydnaðist
- teir kendu seg oftari sum serfrøðingar og at megna meiri.

Úrslitini av hesi fylgjugransking samsvara væl við gransking aðrastaðni í heiminum. M.a. vísa kanningar í 1990'unum hjá Slavin og Johnson og Johnson (smb. Sahlberg og Leppilampi 2004), at tá ið tú arbeiðir saman við øðrum móti einum felags máli, so verður úrslitið bæði í dygd og nøgd betri, enn um tit arbeiddu hvør sær.

Næmingarnir hava týdning fyri hvønn annan og eru áhugaðir í, hvussu hini klára seg. Tilelvingin økist. At samstarva betrar sjálvkensluna, og næmingarnir eru nøgdari, enn tá ið teir arbeiða hvør í sínum lagi og kappast við hini.

## Lesivegleiðing

Bókin er sett soleiðis saman, at teir fyrstu tríggir kapitlarnir viðgera grundvøllin undir læring hjá næmingunum, nevniliga felagsskapin í flokkinum og inklusión (íroknan) saman við samvirkisnámi. Restin av bókini vísir á ítøkilig átaksøki, t.d. samskifti, foreldrasamstarv og lærarатoymi. Í bókini eru venjingar, ið stuðla fakliga arbeiðinum hjá lærаranum við sambondum (relatiónir) og felagsskapum. Ovast á hvørjari venjingarsíðu er tilskilað, um síðan er til næming, lærara, toymi ella foreldur.







© NÁM 2016

**1. kapittul** er um felagsskapin, ella grundvøllin, undir øllum, sum fer fram í flokkinum. Uttan felagsskapin og sambondini verður fakliga læringin trupul. Í kapitlinum verður greitt frá, hvussu samvirkisnám kann stuðla felagsskapinum í flokkinum, og har eru venjingar í at ala upp ein góðan felagsskap.

**2. kapittul** er um floksleiðslu, og hvussu tú sum lærari kanst leiða næmingarnar í undirvísing og læring. Venjingarnar í hesum kapitli geva íblástur til at hava rørslur við í undirvísingini og til at gera hana fjølbroytta.

**3. kapittul** er um inklusión við atliti at samvirkisnám. Samvirkisnám kann stuðla inklusión í felagsskapin um læring í flokkinum. Undirvísing við samvirkisnámi kann fáa næmingarnar at kenna seg sum hoyrandi til felagsskapin. Jaliga tilknýtið sínámillum í samvirkisnámi loyvir ongum at vera uttanfyri. Í venjingunum í 3. kapitli kunnu næmingarnir síggja hvønn annan frá sjónarhornum, tey ikki eru von við.

Ein týðandi partur í førleikanum at skapa sambond í flokkinum er ein viðurkennandi tilgongd til næmingarnar. Sambært Dansk Clearinghouse (2008) má lærarin hava førleika til sambond. Í **4. kapitli** eru rós og viðurkenning á skránni, og roynt verður at lýsa munin á báðum hugtøkunum. Venjingarnar í kapitlinum leggja dent á, hvussu lærarin kann viðurkenna næmingarnar, og hvussu næmingarnir kunnu viðurkenna hvønn annan.

Tað er eingin skúladagur uttan samskifti! Í **5. kapitli** verður víst á, hvussu tú kanst brúka natúrliga hugin hjá næmingunum at samskifta, so allir næmingar fáa talutíð, og prátið stuðlar læringini hjá næmingunum. Lærarar skulu brúka minni tíð at biðja næmingar tiga og meiri tíð at skipa undirvísingina, so tað er greitt, nær prátað verður og hvussu.

**6. kapittul** er um sosialar førleikar hjá næmingunum. Javnvágin millum fakliga læring og arbeiðið við tí sosiala er eitt evni, ið fyllir nógv í skúladegnum. Hvørki tað fakliga ella tað sosiala kann standa einsamalt, men nógvir lærarar kenna tað, sum eingin tíð er til tað sosiala, tí so nógv skal náast av tí fakliga. Í hesum kapitli eru hugskot um at hava sosialu læringina við á jøvnum føti við fakligu læringina og uttan at tarna tí fakligu.

Men einki ber til, uttan at foreldrini eru við! Foreldrini kunnu gagna læringini í skúlanum í størri mun enn í dag, og foreldrini vilja eisini fegin stuðla skúlagongdini hjá barni sínum. Í **7. kapitli** eru dømi um, hvussu foreldrini eru við sum virknir viðleikarar t.d. á foreldrafundum. Skulu nýggj tiltøk verða sett í verk í flokkinum, hevur stuðul frá foreldrum alstóran týdning.

Í **8. kapitli** verður greitt frá, hvussu ymisligir næmingar kunnu vera í einum vanligum flokshøli. Her eru venjingar til ymisligu næmingarnar. Nógvar venjingar kunnu verða brúktar bæði til “tey stillføru” og “tey villu”.




© NÁM 2016

Alt tekur skap í læraratoyminum. Í **9. kapitli** eru ymsar venjingar til læraratoymið. Eisini eru spurningar at hugsa um, tá ið farið verður at arbeiða við samvirkisnámi og floksleiðslu. Nær er best at brúka samvirkisnám, og nær er annar undirvísingarháttur betri?

**10. kapittul** tekur samanum nógvar av teimum spurningum, sum lærarar vanliga hava eftir at hava roynt samvirkisnám í eina tíð. Í kapitlinum verður roynt at svara settum spurningum.

**11. kapittul** endar við at lýsa spurningar sum: Hvussu er skúlin um 10-30 ár? Verður framvegis arbeitt við samvirkisnámi? Hava vit tá lært at næmingalaga undirvísingina?

Eg vil fegin takka øllum teimum frálíku næmingunum, ið eg havi undirvíst.

Eisini ein stór tøkk til allar áhugaðar skeiðsluttakarar, ið hava sett mær atfinningarsamar spurningar. Teir hava fingið meg at líta at umstøðunum frá nógvum, ymsum sjónarhornum.

Og sjálvandi takki eg familjuni, sum ótroyttilig hevur lurtað eftir øllum prátinum hjá mær.


© NÁM 2016

# 1

## Samvirkisnám og felagsskapur


© NÁM 2016

Hesin kapittulin er um felagsskapin, sum er støðið undir øllum, ið fer fram í flokshølinum. Faklig læring verður trupul uttan felagsskapin og sambondini í flokkinum. Tá ið vit umrøða floksleiðslu saman við samvirkisnámi, kundi verið freistandi at sett sum yvirskrift yvir kapittulin: "Felagsskapur og tað fakliga". Tað er jú so, at meðan tú arbeiðir við tí fakliga í flokkinum, hendir eisini okkurt við felagsskapinum.

Tá ið næmingarnir ganga runt í hølinum og tosa enskt, stava orð ella venja tabell, hendir okkurt í flokkinum. Tað sæst týðiliga, at økta talutíðin hjá hvørjum næmingi sær hevur jaliga ávirkan á fakliga støðið hjá næminginum.

Tað hendir eisini okkurt við sosiala felagsskapinum í flokkinum. Hesum felagsskapi, sum er grundin undir felags verkætlanini hjá lærarum og næmingum: Læring.

Ein orsøk til, at samvirkisnám júst nú er so væl umtókt, er, at í skúlanum hava vit øðrvísi avbjóðingar, enn vit áður hava havt. Tað eru fleiri næmingar í flokkunum, fleiri ymisk børn, og nógv teirra hava ymsan tørv, sum vit skulu taka hædd fyri í sama høli. Samvirkisnám og at læra í felagsskapi er eitt boð uppá, hvussu vit kunnu handfara hesa støðu.

Í felagsskapi er umráðandi at hava góð samstarvsevni, og við samvirkisnámi royna vit at fáa næmingarnar at skilja, at skal arbeiðið í bólkinum eydnast, so má hvør limur koma við sínum íkasti.

Venjingarnar 1.1 og 1.2 stuðla felagsskapinum, bæði í flokkinum og í toyminum við færri næmingum

## Ger oftari tað, tú gert væl – ikki fleiri kurar!

Nógvir lærarar anda lættliga, tá ið teir skilja, at teir sleppa undan at venda undirvísingini á høvdið fyri at tvinna samvirkisnám uppí. Samvirkisnámshátturin er jú lættur at seta í verk í verandi undirvísing. Vit hava í mong ár verið kunnað um nógvar námsfrøðiligar leiðir, nógvar hættir og nógvar "kurar við undurverkum", og øll hava felagsnevnaran at lætta okkum munandi um lívið sum lærari. Men, sum tað eisini er galdandi í klænkikurum, so eru veruliga fá okkara, ið kunnu broyta lívið fult og heilt frá einum degi til annan. Vit eru nú eina ferð soleiðis, at vit falla afturá tað, ið vit eru von at gera.

Bæði í klænkikurum og námsfrøðiligum tiltøkum ræður um at taka stutt fet. Hygg at undirvísingini, so væl tað ber tær til at finnast at tær sjálvari/-um. Hygg eftir, hvar tú kundi hugsað tær, at næmingarnir vóru virknari, og fleiri teirra komu til orðanna. Ella eru ávís tíðarbil í tímunum, tá ið orkan minkar?




© NÁM 2016

## Soleiðis eru børn – sambært lærarunum

Tað eru nógvar kanningar gjørdar av, hvussu lærarar lýsa næmingarnar. Til dømis gjørdi *Ugebrevet A4* saman við yrkisblaðnum *Folkeskolen* í 2006 eina kanning millum 806 lærarar. Niðurstøðan var, at tveir triðingar av lærarunum søgdu, at tað vóru fleiri stríggin børn nú enn fyri 15 árum síðan, og at næmingarnir vóru ikki longur so sosialir móti hvørjum øðrum. Helmingurin av teimum spurdu hildu tað vera verri at fáa undirvísingina at rigga, tí næmingarnir vístu ikki somu virðing sum áður.

Sum lærari kanst tú leggja dent á neiligar partar í barnamentanini og lýsa næmingar sum miðsavnaðar um seg og sítt, sum curlingbørn, sjálvsøknar o.s.fr. Tað vil eg ikki taka støðu til her, men heldur staðfesta, at næmingarnir koma við mongum, ymiskum normum í skúlan. Normarnir eru óivað ofta øðrvísi enn normarnir hjá okkum lærarum. Men øðrvísi er ikki tað sama sum vánaligari, tað er bara øðrvísi.

Í skúlanum læra næmingarnir at taka lut í ymsum felagsskapum. Skúlin er ein felagsskapur, har tað skal vera rúm fyri tí einstaka, sum er í felagsskapinum. Men luttøkan hjá hvørjum sær má vera ein verkætlan, ið onnur ikki skulu líða undir. Tað er ein fakligur felagsskapur í skúlanum og í flokkinum, og tað má vera tað, sum ber okkum uppi. Men flokkurin er jú eitt sosialt samfelag í sjálvum sær, har næmingarnir eisini mugu læra at "rætta seg eitt sindur til" og geva rúmd fyri øðrum hugburðum og hugsanum.

Samvirkisnám leggur dent á henda felagsskapin, tí næmingarnir arbeiða fram móti einum felags máli. Tey náa bara málinum, um øll taka lut og hava felags áhuga í at hjálpa hvørjum øðrum á veg.

## Bólkabýti

Flokkurin er ein felagsskapur við ymiskum sambondum. Næmingatoymið er ein annar og lítil felagsskapur, har arbeitt verður í felag.

Spencer Kagan, ein av monnunum aftan fyri samvirkisnám, mælir til at gera toymi við fýra næmingum, sum skulu vera ymiskir. Soleiðis byrja eisini mangir lærarar at arbeiða við samvirkisnámi. Teir býta flokkin í toymi og flyta borð runt í flokkinum, so næmingarnir kropsliga eru fýra og fýra í bólki. Summir lærarar meta hetta vera eitt greitt og ítøkiligt prógv fyri, at flokkurin arbeiðir við samvirkisnámi. Men tað er ikki nóg mikið bara at flyta borð! Undirvísingin broytist ikki, bara tí næmingarnir sita fýra og fýra í bólki. Tað er akkurát líka lætt at hava eina "gamla" talvuundirvísing í einum slíkum flokshøli. Men nú skulu bara fleiri næmingar venda sær á móti talvuni.

Í venjing 1.6 eru uppskot um at bólka næmingar í flokshølinum. Har er eisini ein minnislisti at brúka, tá ið hølið skal verða innrættað.



© NÁM 2016

Nøkur halda tað vera avmarkandi fyri undirvísingina, tá ið borðini standa fýra og fýra saman. Tað fer jú eisini onnur undirvísing enn samvirkisnám fram í hølinum. Tá kann tað vera ein fyrimunur at seta næmingarnar saman tveir og tveir og soleiðis, at teir kunnu venda sær við til teirra, ið sita aftanfyri, tá ið teir skulu arbeiða fýra saman í toymi.

**Floksundirvísing**



**Arbeiða í toymum**



Tá ið bólkar verða gjørdir, er meginreglan, at teir skulu vera ymisligir (heterogenir) (Leppilampi og Sahlberg 2004). Í bólkinum skulu vera næmingar úr ymsum samfelagsløgum og við ymsum fakligum førleikum. Lærari kann sleppa sær undan spurningum og at greiða frá, um hann ger tilvildarligar bólkar. T.d. kann hann býta í bólkar við at telja, ella biðja næmingarnar stilla seg á rað eftir føðingardegi, gøtunummari ella øðrum. Venjing 1.7 hevur uppskot um at bólka tilvildarliga.

Bólkabýtið kann eisini fara fram eftir ávísum treytum, sum lærarin ger av, t.d. um hann metir, at tað er tørvur á ávísum førleikum í bólkunum, ella at tað sosialt riggar best við ávísum næmingum saman. Í venjing 1.8 eru fleiri uppskot um at bólka og gera pør. Ein góð undirvísing inniber m.a., at tað er nógv tíð at læra í (Meyer 2005). Óneyðug tíð má ikki fara til at bólka og skipa undirvísingina á ymsan hátt, tí tá fer tíðin ikki til læringina. Lærari, ið fegin vil arbeiða við samvirkisnámi, má tó brúka eitt sindur av tíð og orku til at seta saman toymi, ið rigga væl.

Hvussu leingi næmingarnir skulu arbeiða í sama toymi, veldst um ymiskt. Eitt toymi kann arbeiða stutt saman við einari avmarkaðari uppgávu, kanska í ein tíma ella tveir. Toymið kann arbeiða í longri tíð, so næmingarnir fáa eina kenslu av at hoyra saman sum toymi. Næmingarnir kunnu eisini arbeiða saman eitt heilt skúlaár í sama toymi, og tá fara næmingarnir javnan aftur í hetta grundtoymið, eftir at teir hava arbeitt í øðrum toymum við ymiskum uppgávum.

Næmingarnir mugu vita, hvussu leingi teir skulu verða í toyminum. Tað er hent at vita, hvussu langa tíð okkurt tekur. Verður mett, at samstarvið hevur eydnast væl í einum toymi, kann tað eggja til at gera nýtt toymi.



Samvirkisnám og floksleiðsla
© NÁM 2016

## Frá bólki til toymi

Arbeiða næmingarnir í einum toymi, ella eru teir í einum bólki? Sama spurning kunnu vit eisini seta lærarum, sum samstarva um ein flokk. Nær er talan um ein bólk, og nær er talan um eitt toymi?

Vit nevna tað ofta "toymisarbeiði", sum í veruleikanum er bólkaarbeiði. Eyðkenni fyri ein bólk er, at bæði uppgávur og ábyrgd eru mest til hvønn bólkalim sær, og tað er lítið tilknýti millum limirnar í bólkinum. Tað eyðkennir toymið, at uppgávur og ábyrgd eru felags, samskiftið er nógv, og limirnir í toyminum eru tætt knýttir at hvørjum øðrum. Í samvirkisnámi verður arbeitt í toymum, men kanska ikki frá fyrstu løtu. Málið er tó at menna toymi og ikki bólkar.

Á myndini niðanfyri sæst, hvussu ein bólkur kann verða mentur frá einum arbeiðsbólki, ið onga ætlan hevur um at gerast toymi. Í hesum bólki avrika limirnir sum mest hvør sær og kunna bara limirnar í bólkinum um tað, teir fáa burturúr.

Ein bólkur kann saktans rigga so illa, at avrikið verður verri, enn um næmingarnir arbeiddu hvør sær. Eg haldi, at flestu okkara hava roynt at fingið næmingar at arbeiða í einum bólki og síðan sannað, at einki kom burturúr. Hvat gera vit so? Ja, tá havi eg hoyrt meg siga, at so mugu tey arbeiða hvør sær, tí tá fáa tey meiri burturúr. Í slíkum føri er bólkurin eitt sonevnt "eiti av einum toymi" (Johnson o.fl. 2007):

### Strikumynd av avrikum í toymum






Samvirkisnám og floksleiðsla
© NÁM 2016

Í hugsaða toyminum verður so við og við ein økt trongd til úrslit og felags ábyrgd, meðan limirnir í veruliga toyminum bæði hava felags ábyrgd og felags mál. Í toyminum við framúr avriki er næstan ikki brúk fyri leiðslu, og limirnir hugsavna seg í stóran mun um uppgávu og avrik.

Ein bólkur verður ikki altíð til eitt toymi. Tað skal arbeiðast ógvuliga tilvitað við tí, og jaliga tilknýtið má betrast við venjingum, sum t.d. venjing 1.4 og 1.5.

Tú kanst greiða næmingunum frá, hvat eyðkennir virksemið í einum toymi, við niðanfyri nevndu lýsing:

Í einum toymi:
**T** – **T**osa vit saman og hjálpast at.
**OY** – **OY**! Sum vit arbeiða seriøst!
**M** – **M**innast til at eftirmeta samstarvið.
**I** – **I**vast ikki í at vera jalig.




© NÁM 2016

# Venjingar til 1. kapittul

## 1.1 • Hvat eru vit felags um í flokkinum? – lærarasíða og næmingasíða

Tað hevur alstóran týdning fyri flokk og toymi at læra hvønn annan at kenna. Tú heldur kanska, at næmingarnir kennast rættiliga væl, tá ið teir hava verið saman í flokki í fleiri ár, men tað er ikki altíð so. Henda venjingin leggur dent á ymiskt, ið er felags fyri næmingarnar. Tað er ein ásannan av, hvussu nógv vit veruliga hava í felag, og tað kann vera við til at økja um felagsskapin í flokkinum.

Á lærarasíðuni verður kunnað um venjingina. Næmingasíðan verður prentað til hvønn næming sær.

## 1.2 • Hvat eru vit felags um í toyminum? – lærarasíða, næmingasíða og toymissíða

Eins og í venjing 1.1 verður dentur lagdur á, hvussu nógv næmingarnir hava í felag. Nú er talan um næmingar í hvørjum toymi sær.

Lærarasíðan kunnar um venjingina, og næmingasíðan verður prentað til hvønn næming sær. Toymissíðan verður prentað og handað hvørjum toymi.[1]

## 1.3 • Ein samdur bólkur – lærarasíða

Á hesi síðu er greitt frá uppgávu við tí endamáli at fáa hvønn næming sær at taka ábyrgd av toyminum og knýta jalig bond til hini í toyminum. Uppgávan kann verða brúkt í ymsum høpi, tá ið lærarin vil vissa sær, at øll eru við og taka lut í bólkinum. Uppgávan til bólkin kann vera at endurgeva ein lisnan tekst, rokna eina uppgávu, greiða frá fakligum hugtøkum, taka samanum, hvønn hugburð næmingarnir hava um eitt nógv umrøtt evni, ella okkurt heilt annað.

## 1.4 • Putlispælshátturin – lærarasíða og næmingasíða

Henda venjingin skal fáa hvønn næming sær at taka størri ábyrgd og knýta seg jaliga til hinar næmingarnar. Allir fáa ábyrgd av einum ávísum teksti, einum sjónarhorni til tekstin, einum formli í støddfrøði ella einum hugtaki. Næmingarnir skulu arbeiða saman við øðrum uttan fyri toymið til tess at ogna sær størri vitan um sín part. So koma tey aftur í grundtoymið og eru nú einasti limur í toyminum við hesi vitan, sum tey skulu greiða toyminum frá![2]

Lærarasíðan kunnar um venjingina, og næmingasíðan verður prentað til hvønn næming sær.

1 Íblástur frá Lohmann (2008).

2 Íblástur frá Brüning og Saum (2009), ið vísa til Elliot Aronson.



Samvirkisnám og floksleiðsla
© NÁM 2016

## 1.5 • Gera hugtøk – lærarasíða

Venjingin er eitt uppskot til at gera hugtøk og fata tey. Her kann kjak standast av. Uppgávan er opin, og næmingarnir taka støðu. Lærarin biður næmingarnar grundgeva fyri, hví teir hava flokkað, sum teir hava. Venjingin kann verða brúkt í størri ella smærri bólkum.[3]

## 1.6 • At innrætta flokshølið - lærarasíða

Her er ein minnislisti við ymsum, tú skalt hugsa um, tá ið tit arbeiða við samvirkisnámi og skulu flyta borð og stólar. Her eru eisini tvey uppskot um at seta borðini í flokshølinum.

## 1.7 • Tilvildarliga gjørdir bólkar – lærarasíða

Henda síða hevur nógv dømi um, hvussu tú setir saman bólkar á ein stuttligan og tilvildarligan hátt.

## 1.8 • Tilrættislagdir bólkar – lærarasíða

Á hesi síðu eru nógv dømi um, hvussu tú setir saman bólkar á skemtiligan hátt og við ávísari ætlan. Tú setir kanska næmingar saman, sum ikki eru vanir at arbeiða saman.

## 1.9 • Avtalukalendari – lærarasíða og næmingasíða

Venjingin hjálpir næmingum at finna saman tveir og tveir. Næmingarnir skulu brúka so stutta tíð, sum til ber, at finna saman við einum makkara. Soleiðis fær lærarin skjótt fýra nýggj pør, ið ikki eru saman sum grundtoymi.[4]

## 1.10 • Avtaluklokka – lærarasíða og næmingasíða

Aftur ein venjing til at gera pør. Næmingarnir skulu brúka so stutta tíð, sum til ber, at finna saman við einum makkara. Soleiðis fær lærarin skjótt 12 ymisk pør í flokkinum, ið ikki eru saman sum grundtoymi.[5]

---

3 Íblástur frá Spencer Kagan úr „Flip-overstafet".

4 Íblástur frá Bochmann og Kirchmann (2006).

5 Íblástur frá Brüning og Saum (2009).



Samvirkisnám og floksleiðsla
© NÁM 2016

## 1.1 • Hvat eru vit felags um í flokkinum?

lærari

1. Næmingarnir fáa avrit av næmingasíðu 1.1: „Hvat eru vit felags um í flokkinum?"

2. Næmingarnir fara til gongu í flokkinum. Tey rætta pappírið upp sum tekn um, at tey vilja tosa við onkran úr flokkinum.

3. Tá ið tey hitta ein makkara, heilsa tey vinaliga hvør upp á annan og finna okkurt, sum tey hava í felag. Tað skulu vera tvey ymisk øki. T.d. okkurt, ið teimum dámar at síggja í sjónvarpi, onkur matur ella áhugamál í frítíðini. Lærarin kann eisini áseta eitt avmarkað øki, ið næmingarnir skulu halda seg innanfyri.

4. Tá ið næmingarnir hava funnið tvey ymisk øki og skrivað tey á síðuna, takka teir hvørjum øðrum fyri samrøðuna og fara at leita eftir einum nýggjum makkara at tosa við.

Venjingin er liðug, tá ið øll síðan er skrivað, ella tá ið avtalaða tíðin er farin.

Er næmingatalið eitt stakt tal, kunnu tríggir næmingar finna saman í einum bólki. Nú skulu tey finna okkurt, ið øll trý eru felags um.

Venjingin riggar eisini væl, um næmingarnir kenna hvønn annan. Næmingarnir fáa kunnleika um ymiskt, ið teir kanska ikki tosa um í gerandisdegnum.



Samvirkisnám og floksleiðsla
© NÁM 2016

## 1.1 • Hvat eru vit felags um í flokkinum?

næmingur

Finn okkurt, tú hevur til felags við næmingar í flokkinum. Skriva tvey ymisk øki.

| Navn | Tvey ymisk øki, vit eru felags um: |
|---|---|
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |



Samvirkisnám og floksleiðsla
© NÁM 2016

## 1.2 • Hvat eru vit felags um í toyminum?




1. Næmingarnir sita í grundtoyminum.

2. Tey fáa ásetta tíð (2-5 min.). Hvør næmingur skal skriva á næmingasíðu 1.2, hvat honum dámar væl, hvat honum ikki dámar, og á hvønn hátt hann heldur seg vera serstakan.

3. Tá ið tíðin er farin, skulu næmingarnir skiftast um at siga eitt orð av listanum. Nevna tey okkurt, sum toymið er samt um, verður tað skrivað á síðuna hjá toyminum. Næmingarnir kunnu gott nevna nógv ymisk uppskot og so velja úr.

4. Næmingarnir enda umfarið í toyminum við at finna tað, sum ger teir serstakar.

5. At enda verður tikið samanum í flokkinum.

Venjingin kann enda við, at toymið finnur sær eitt navn. Navnið skal siga okkurt um limirnar, t.d. Lakressrøturnar, Jarðberjaelskararnir, Bieberfjeppararnir, Arbeiðsmeyrurnar, Pizzadrekkararnir ella okkurt annað stuttligt, sum teir finna uppá.



Samvirkisnám og floksleiðsla
© NÁM 2016

# 1.2 • Hvat eru vit felags um í toyminum?

næmingur

Skriva um teg sjálva/n á reglurnar:

Mær dámar væl

Mær dámar ikki

Eg eri serstøk/-stakur, tí



Samvirkisnám og floksleiðsla
© NÁM 2016

## 1.2 • Hvat eru vit felags um í toyminum?




Í toyminum skulu tit finna tað, sum tit eru felags um.

Tit skulu skiftast um at siga ein setning ella eitt orð av listanum. Takið ein lista í senn. Tá ið tit finna okkurt, ið øllum dámar, skriva tit tað á síðuna niðanfyri.

Okkum øllum dámar: ________________________________________________

Eingin okkara dámar: ________________________________________________

Navn: ______________ er serstøk/-stakur, tí ________________________________

Navn: ______________ er serstøk/-stakur, tí ________________________________

Navn: ______________ er serstøk/-stakur, tí ________________________________

Okkara toymi eitur: ________________________________________________



Samvirkisnám og floksleiðsla
© NÁM 2016

## 1.3 • Ein samdur bólkur

lærari

1. Bólkurin fær eina uppgávu.
2. Hvør næmingur í bólkinum fær tíð at hugsa seg um og sjálvur finna eitt svar.
3. Bólkurin tosar saman um svarið, og hvussu tey ætla at loysa uppgávuna.
4. Bólkurin finnur eitt felags svar, sum verður skrivað á eitt pappír.
5. Allir næmingar í bólkinum skriva undir uppá, at teir eru samdir um svarið.
6. Næmingarnir í bólkinum fáa sær sjálvum eitt tal.
7. Lærarin sigur eitt tal ella velur á annan hátt ein næming at leggja fram svarið hjá bólkinum.

Tá ið næmingarnir hava roynt hetta eina tíð, kunnu teir gevast við at skriva undir. Undirskriftin er við til at knýta næmingarnar saman í bólkinum/toyminum. Næmingarnir skulu verða samdir og vátta tað við undirskriftini.


© NÁM 2016

## 1.4 • Putlispælshátturin

lærari

1. Næmingarnir arbeiða í bólkum við t.d. trimum ella fýra næmingum í hvørjum.
2. Lærarin hevur funnið ein tekst, sum hann býtir í so nógvar partar, sum næmingar eru í toyminum.
3. Hvør næmingur í toyminum fær ein part av tekstinum. Tey hava so statt ymiskar, talmerktar partar av sama teksti.
4. Allir næmingar við tekstparti 1 fara nú saman í nýggjar bólkar. Á sama hátt gera næmingar við tekstparti 2, parti 3 o.s.fr.
5. Í nýggju bólkunum arbeiða næmingarnir saman um at læra seg tekstpartin, ið teir hava fingið.
6. Tá ið teir hava lisið og arbeitt partin ígjøgnum, fara næmingarnir aftur í upprunatoymið.
7. Næmingarnir skulu nú gera hesar uppgávur:
   - Lærið hini tykkara tekstpart.
   - Lærið tykkum tað, ið hini bera fram.
   - Gerið ein samandrátt av øllum tekstinum.

**Broyting:**

Næmingarnir hava lisið ein felags tekst ella sæð ein film. Tey fáa nú fýra øki, sum tey fara í dýpdina við og brúka putlispælsháttin.

- Persónslýsingar
- Lýsa umhvørvið
- Sjónarhorn hjá frásøgufólki
- Viðmerkingar frá høvundinum
- Myndberingar

Ella:

Eitt søguligt tíðarskeið, sum næmingarnir skulu finna dømi um í einum teksti.

Ein rokniháttur, sum næmingarnir skulu gera uppgávur í til hini.



Samvirkisnám og floksleiðsla
© NÁM 2016

# 1.4 • Putlispælshátturin




Hvat er teksturin hjá mær um?

Tíggju týðandi stikkorð í tekstinum

Hvussu beri eg nýggju vitan mína fram fyri øðrum?

**Grundtoymi við eini uppgávu í 4 pørtum**







**Serfrøðingatoymið**

**Skiftist um í grundtoymi at "leggja putlispælið" til eina heild.**



Samvirkisnám og floksleiðsla
© NÁM 2016

# 1.5 • Gera hugtøk

lærari

1. Orð, myndir ella lutir í hópatali verða løgd á borðið ella gólvið.

2. Fyrst skulu næmingarnir hvør sær hugsa um, hvussu mongdin kann verða flokkað. Næmingurin skrivar navnið á flokkunum ella teknar teir.

3. Síðan greiða næmingarnir frá síni flokkan. Tey kunnu antin greiða einum floksfelaga frá ella øllum bólkinum.

4. Orð, myndir ella lutir verða nú býtt sundur í flokkar á borðinum ella gólvinum. Øll sleppa at vera við at býta.

Lærarin letur næmingarnar sjálvar gera av, hvussu teir flokka. Hann tosar við næmingarnar um, hví teir býta soleiðis sundur.

- Kundi luturin ella orðið farið í ein annan høvuðsflokk?
- Hvussu allýsa tit flokkarnar?
- Hvussu kunnu tit greiða frá flokkanini?
- Ber til at gera fleiri/færri flokkar?

Uppskot um tilfar at flokka:

- Skógvarnir hjá næmingunum.
- Myndir úr minnisspæli.
- Orð úr ymsum orðaflokkum.
- Roknistykki.

**Broyting:**
Næmingarnir kunnu vera við at velja lutir at flokka. Ella tey fáa ein høvuðsflokk, t.d. matvørur. Síðan skriva toymini øll orð, tey koma at hugsa um undir høvuðsflokkin. Orðini kunnu verða skrivað á smáar post it-lepar, sum kunnu flytast runt aftaná.

Venjingin kann verða løgd til rættis sum ein boðrenning, har næmingarnir skiftast um at renna upp til talvuna við post it-lepum og orðum, sum teir hava skrivað.




© NÁM 2016

# 1.6 • At innrætta flokshøli – minnislisti

lærari

1. Sært tú allar næmingar samstundis?

2. Ber til at koma skjótt og lætt runt í øllum flokkinum?

3. Ber til at ganga millum borðini í flokkinum?

4. Eru næmingahillar og felags útgerð sett soleiðis upp, at næmingarnir skjótt og lætt fáa fatur á lutum og tilfari?

Fyri at fáa arbeiðsfrið í flokkinum og yvirlit yvir flokkin mást tú endurskoða innrættingina av flokshølinum av og á. Borð hava tað jú við at verða flutt haðani, tey eru sett!

Kanska standa borðini, sum tey stóðu beint eftir summarfrítíðina, og lærarin hevur ikki tikið støðu til, um tað er hóskandi innrætting?



Samvirkisnám og floksleiðsla
© NÁM 2016

## 1.6 • At innrætta flokshølið – fyrra uppskot

lærari

Fyrimunur við hesi uppseting er, at allir næmingar í toyminum síggja hvønn annan. Tey sita alla tíðina í toyminum og hava tí altíð floksfelagar at hjálpa sær, um tørvur er á tí. Næmingarnir brúka onga tíð til at flyta seg fyri at fara til verka í toyminum, og teir hava altíð ein makkara at arbeiða saman við.







© NÁM 2016

# 1.6 • At innrætta flokshølið – seinna uppskot




Fyrimunur við hesi uppseting er, at eingin næmingur situr við bakinum til talvuna, og tað er lætt hjá teimum ytstu næmingunum at flyta seg inn í vinkulin. Tað verður munandi léttari at samstarva, tí næmingarnir sita tætt saman og sleppa frá at tosa hart ella at rætta seg inn yvir tvey borð.






Samvirkisnám og floksleiðsla
© NÁM 2016

## 1.7 • Tilvildarliga gjørdir bólkar

lærari

**Gera pør**

1. Stillið tykkum á rað eftir ...
   Næmingarnir stilla seg á rað eftir sídd á hári, stødd á skóm, gøtunummari, vegalongd til skúlan, tal á knøppum í klæðum ella øðrum. Tveir og tveir næmingar eru saman.

2. Finn tín makkara.
   Næmingarnir fáa hvør sín part av tilfari, har bara tveir partar hóska saman. Til dømis stórir og smáir stavir, tvær eins myndir ella tøl, ið vera 30 til samans. Næmingarnir ganga runt í hølinum, og tá ið lærarin gevur teimum eitt tekn, finna teir sín makkara.

3. Tak eitt band.
   Lærarin skal hava líka nógv bond sum helvtin av næmingatalinum í flokkinum. Lærarin heldur um miðjuna á hvørjum bandi, og endarnir hanga niður úr lógvanum báðumegin við. Hvør næmingur tekur í ein enda, og lærarin sleppur so bondunum. Teir næmingar, sum halda í hvør sín enda á sama bandi, eru saman.

**Gera bólkar**

1. Í eitt rað eftir ...

2. Být út eini spælikort í flokkinum, og næmingarnir fara fýra og fýra saman í bólk. Fýra ess er ein bólkur, fýra tveyarar ein annar bólkur o.s.fr.

3. Kort við navnorðum í fýra bendingum (eintali, fleirtali, bundið, óbundið) verða býtt út millum næmingarnar í flokkinum. Tá ið næmingarnir hava funnið saman, eru teir ein bólkur.

4. Fýra eins myndir, tøl ella tílíkt. Sama venjing sum frammanfyri undir “Gera pør”, men nú í dupultari nøgd.

5. Tøl úr tabellum. Fýra tøl úr 3-, 4-, 5- og 6-tabellini.




© NÁM 2016

# 1.8 • Tilrættislagdir bólkar

lærari

1. Eftir kyni (miða eftir, at tað eru líka nógvir dreingir sum gentur í hvørjum bólki).
2. Eftir etniskum uppruna.
3. Eftir ávísum fakligum eyðkenni (t.d. ein góður lesari í hvørjum bólki).
4. Eftir sosialum førleika (tað er ikki altíð sami næmingur, ið bæði er fakliga og sosialt væl fyri).
5. Eftir evnunum at fara til verka. Bólkarnir verða gjørdir, so tað er ein virkisfúsur næmingur í hvørjum bólki.
6. Eftir hvør hevur skil á skúlatingum. Næmingarnir verða býttir, so tað í hvørjum bólki er ein, ið altíð hevur bøkur við, hevur pakkað taskuna og gjørt heimaarbeiðið.
7. Eftir samstarvi. Næmingarnir í bólkinum hava ikki arbeitt saman áður. Soleiðis sleppa øll at arbeiða saman við øllum.




© NÁM 2016

# 1.9 • Avtalukalendari

lærari

1. Næmingarnir fáa næmingasíðu 1.9 og skulu gera eina avtalu fyri hvørja av teimum fýra talmerktu reglunum. Tað er umráðandi at tryggja sær, at allir næmingar verða spurdir. Hav greiðar treytir.

2. „Tú skalt gera eina avtalu við ein makkara, ið tú ikki hevur arbeitt saman við í vikuni."

3. „Tú skalt gera eina avtalu við eitt annað kyn."

4. „Tú skalt gera eina avtalu við ein, ið tú ikki ert í grundtoymi við."

5. „Tú skalt velja ein úr hvørjum av hinum toymunum."

6. Næmingarnir ganga uppi á gólvinum og gera avtalur. Navnið á makkaranum verður skrivað á eina reglu.

7. Lærarin hevur nú fýra ymisk pør við hvørjum næmingi.

8. Nú kann lærarin skjótt og lætt biðja næmingarnar finna t.d. "Makkaran á 2. reglu".

Minst til, at næmingurin skal skriva floksfelagan á regluna við sama tali, sum hann sjálvur verður skrivaður á hjá floksfelagnum. T.d. um Mia skrivar "Jónas" á 1. reglu, skal Jónas eisini skriva "Miu" á sína 1. reglu.




© NÁM 2016

# 1.9 • Avtalukalendari

næmingur

1. ______________________________

2. ______________________________

3. ______________________________

4. ______________________________



Samvirkisnám og floksleiðsla
© NÁM 2016

# 1.10 • Avtaluklokka

lærari

1. Næmingarnir fáa næmingasíðu 1.10 og skulu gera eina avtalu fyri hvønn heilan tíma (tølini 1-12). Tað er umráðandi at tryggja sær, at allir næmingar verða spurdir. Hav greiðar treytir.
2. „Tú skalt gera eina avtalu við ein makkara, ið tú ikki hevur arbeitt saman við í vikuni."
3. „Tú skalt gera eina avtalu við eitt annað kyn."
4. „Tú skalt gera eina avtalu við ein, ið tú ikki ert í grundtoymi við."
5. „Tú skalt velja ein úr hvørjum av hinum toymunum."
6. Næmingarnir ganga uppi á gólvinum og gera avtalur. Navnið á makkaranum verður skrivað á ein klokkutíma.
7. Lærarin hevur nú tólv ymisk pør við hvørjum næmingi.
8. Nú kann lærarin skjótt og lætt biðja næmingarnar finna t.d. "Makkaran á klokkan 3".

Minst til, at næmingurin skal skriva floksfelagan á sama klokkutíma, sum hann sjálvur verður skrivaður á hjá floksfelaganum. Skrivar Petur t.d. "Andrias" á klokkan 2, skal Andrias eisini skriva "Petur" á klokkan 2 hjá sær.




© NÁM 2016

## 1.10 • Avtaluklokka

næmingur

| | |
|---|---|
| **Navn** | |







© NÁM 2016

# 2

## Floksleiðsla


© NÁM 2016

Hesin kapittulin er um hugtakið floksleiðsla, ið fevnir um tað at leiða læring, undirvísing og atferð hjá næmingunum. Elsebeth Jensen og Ole Løw siga floksleiðslu vera: "Evnini hjá lærara at skapa eina jaliga, samstarvshugaða og inkluderandi (íroknandi) floksmentan, eggja til luttøku og at fáa arbeiðsfrið" (Jensen og Løw 2009). Teir nevndu partarnir skarast um, og tú kanst ikki bara leggja dent á atferð hjá næmingi uttan at taka læritilgongdir við. Eg komi við fleiri uppskotum og venjingum til ein fjølbroyttan skúladag og at fáa rørslu við í undirvísingina.

## Floksleiðsla og ófriður

Tað verður tosað ógvuliga nógv um floksleiðslu nú. Ymisk orð verða brúkt, eitt nú floksleiðsla, læringsleiðsla og atferðarleiðsla. Men kanska hava tey nøkulunda sama týdning? Floksleiðsla er sum hugtak yvir hinum og fevnir eisini um atferðarleiðslu og læringsleiðslu.

Dansk Clearinghouse for Uddannelsesforskning (Nordenbro o.fl. 2008) góvu í 2008 út eina frágreiðing, sum staðfesti, hvørjir lærarafførleikar stuðla læring hjá børnum og ungum:

- **Førleiki til sambond.** Hetta inniber, at lærarin er førur fyri at seta seg í støðuna hjá øðrum og týða kropsmál hjá næmingunum. At tokki, virðing, álit og innlivan lýsir av læraranum. Lærarin má kunna handfara atburðin hjá næmingunum, eisini atburðin hjá næminginum, ið ikki dámar læraran.
- **Sjónlig leiðsla.** Lærarin skal so líðandi fáa næmingarnar sjálvar at gera galdandi reglur. Hetta kann lærarin gera m.a. við at seta teimum yvirskipað mál. Lærarin má so at siga leiða næmingarnar, til teir duga sjálvir. Tað hevur stóran týdning fyri læring og tilelving hjá næmingunum, at lærarin setir greiðar og týðiligar karmar. Málini fyri arbeiðið í flokkinum skulu verða greið, og bæði lærari og næmingar skulu kenna málini.
- **Førleiki at læra frá sær** (didaktiskur førleiki). Her er talan bæði um almennan didaktiskan førleika og førleika í lærugreinum. Lærarin skal kunna grundgeva fyri, hví hann velur at gera so ella so í undirvísingini. Hví geri eg, sum eg geri? Hvørji evni skulu vera í undirvísingini, og hvussu síggi eg, um tað riggar?

Á myndini niðanfyri havi eg roynt at seta upp, hvat ein lærari skal duga. Alt er savnað í trimum hugtøkum.





Samvirkisnám og floksleiðsla
© NÁM 2016

Floksleiðsla er at leiða undirvísingina og kunna leggja til rættis eina fjølbroytta undirvísing, at leggja til rættis læritilgongdir og at leiða atferðina hjá næmingunum. Undir hesum eisini at handfara ófrið í flokkinum. Fyri árum síðan var kanska mest hugsað um, hvussu tú skuldi stýra ófriðinum, tá ið tosað varð um floksleiðslu. Sjálvandi er tað framvegis týdningarmikið at kunna handfara ófrið í flokkinum. Er ov nógvur ófriður, verður ótolandi hjá bæði lærarum og næmingum í flokkinum. Mást tú sum lærari brúka nógva tíð til ófrið, so tekur tú tíð frá onkrum øðrum, nevniliga fakligu læringini hjá næmingunum.

Kanningin Arbejdsmiljø og helbred i Danmark 2010 (Madslund og Rydahl 2011) hjá Nationale Forskningscenter for Arbejdsmiljø, NFA, staðfestir, at 72 % av øllum fólkaskúlalærarum javnan hava trupulleikar av ófriði í flokkum. Sama kanning varð gjørd fimm ár frammanundan, og tá vóru umleið 50 %, sum søgdu tað sama. Í tilmæli frá arbeiðsbólki í sambandi við TALIS-kanningarnar (september 2010) millum lærarar í Føroyum verður m.a. sagt soleiðis: "Ein ávísur munur er á tørvi og ynski um fakliga førleikamenning alt eftir aldri. Yngru lærararnir siga, at teir hava serligan tørv á hesum økjum: stýring av undirvísingini umframt næmingaagi (-disiplin) og atferðartrupulleikar." Man størsta orsøkin til vaksandi trupulleikan vera, at tað eru fleiri næmingar í flokkinum, ring inniluft ella okkurt annað? Nei, tað eru granskarar ikki greiðir yvir. Talið er ið hvussu er alt ov høgt, og lærarin má brúka orkuna, har hann kann, nevniliga at ala upp eina mentan í flokkinum, har næmingarnir virða hvønn annan og hava greiðar reglur fyri, hvør tosar nær. Floksleiðsla er, sum áður sagt, ikki bara at fáa frið í flokkin. Saman við arbeiðsfriði vilja vit fegin hava virknar, eldhugaðar næmingar, ið taka lut í undirvísing og kjaki, og tað er trupult at kjakast friðarliga!

## Floksleiðsla og samvirkisnám

Hví skulu vit so tvinna floksleiðslu saman við samvirkisnámi?

Fert tú at arbeiða við samvirkisnámi í undirvísingini, sært tú týðiliga, at tað er lærarin, ið stýrir. Sum meginregla stýrir hann altíð, men tað verður nú lættari hjá honum at fara í leiðarahattin, tí hann skal í lutfalsliga nógvum førum taka avgerð. Eitt, sum næmingarnir onga ávirkan hava á, er, hvør situr undir liðina á hvørjum í flokkinum.

Kanning av inkluderandi (íroknandi) umstøðum um læring (Jensen og Skibsted 2011) vísir, at tá ið barnið sjálvt skal velja sær onkran at samstarva við, er tað ein ekskluderandi (útihýsandi) partur í lívinum hjá barninum. Tað er lætt at ímynda sær støðuna, um tú dagliga skalt berjast fyri at finna onkran, ið vil vera saman við tær. Summir næmingar vera so "sjálvstøðugir", at teir vilja arbeiða einsamallir. Kanska tí tað er lættari hjá næmingi at arbeiða einsamallur enn at verða kveistraður burtur? Kanningin vísti eisini, at samvirkisnám er við til at bøta um karmarnar um íroknandi umstøður um læring.

Eru karmarnir rættiliga skipaðir, sleppa næmingarnir at flyta seg innan fyri karmarnar við tí ferð, ið teir megna. Eitt dømi um skipaðan karm er, at næmingarnir skulu kjakast um ein givnan tekst




© NÁM 2016

og evni úr tekstinum. Var púra frítt at kjakast, søgdu næmingar við mesta sjálvsáliti og kanska væl fyrireikaðir mest. Teir ivasomu og stillføru næmingarnir høvdu latið onnur gjørt alt arbeiðið.

Høvdu vit heldur stýrt kjakinum um evni í tekstinum, so øll sluppu framat, kundu vit sum einki latið tey kjakast frítt, sjálvandi innan fyri hesar karmar. Eitt stýrt kjak, sum tó er frítt, kann verða skipað so, at øll fáa líka nógva talutíð, og øll siga okkurt. Hetta er t.d. galdandi við samrøðukortunum (venjing 5.1 og 5.2). Tað kann eisini lættliga henda, at tað kemur annað fram enn tað, vit lærarar hava fyrireikað okkum uppá heima. Lærarar duga rættiliga væl at "fiska" eftir tí rætta svarinum, altso tí svarinum, teir fegnir vilja hoyra. Tað er ikki óhoyrt, at næmingar spyrja: „Er tað tað, tú sipar til?"

Eg hevði ta gleði at verða undirvíst av dugnaliga og roynda læraranum og høvundinum Yael Sharan úr Ísrael. Hann segði: "Lærarar eru einastu fólk, eg veit um, ið spyrja um tað, ið teir longu vita svarið uppá!"

Nógv spennandi kann henda í flokshølinum, um vit lova vitanini hjá næmingunum meiri framat. Tað er ikki tað sama sum, at alt er líka gott, ella at lærarin ikki má vita meiri enn næmingarnir. Tað vil bara siga, at næmingarnir skulu sleppa at greiða frá síni vitan um ávís evni uttan at verða kvettir av.

## Leikluturin sum lærari

Lærarar tosa umleið 2/3 av einum skúlatíma (Bjerresgaard og Kongsted 2010). Tá eru umleið 15 min. eftir av tímanum til næmingarnar, altso til teir at býta sínámillum. Fortreytin fyri, at allir næmingar skulu hava meiri enn ein neyðars minutt at tosa í, er, at undirvísingin verður skipað, so tað er eitt greitt býti, hvør skal tosa nær. Annars fara tey stinnastu at tosa mest, og tey meiri hugsanarsomu og stillføru fáa ikki orðið fyri seg. Í 8. kapitli komi eg meiri inn á, hvussu vit hugsa um ymisligu næmingarnar í undirvísingini.

Ein annar møguleiki gevur næmingunum meiri talutíð! Hann er, at lærarin steðgar sínum orðafloymi! Men tað er trupult! Tí lærarar vilja fegnir hoyra alt, sum verður sagt í flokshølinum, og stýra øllum. Kanska óttast vit, at tað verður sagt okkurt skeivt, sum vit ikki kunnu rætta?

Men vit mugu sleppa teymunum!

Tá ið eg fór at undirvísa eftir meginreglunum í samvirkisnámi, var tað truplasta hjá mær at lata vera við at blanda meg upp í prátið hjá næmingunum. Eg helt alla tíðina, at eg hevði nøkur góð hugskot til teirra, men skilti so líðandi, at eg heldur steðgaði prátinum, enn gagnaði tí. Eg fekk í staðin ein leiklut sum íverkseti og í endanum at taka samanum og savna nakrar av mongu træðrunum.


Samvirkisnám og floksleiðsla
© NÁM 2016

# At vera greið/ur

## Hjálp

Hevur tú sum lærari upplivað, at tað verður rópt á teg allastaðni í flokkinum? At nøkur sita og bíða leingi, til tú hevur stundir at hjálpa teimum? At tað eru næmingar, ið saktans kunnu loysa eina uppgávu sjálvir, men skulu hava váttan fyri, at teir gera rætt? Eg haldi, at flestu lærarar munnu kenna seg aftur í hesum.

Vit mugu hava mannagongdir og reglur fyri, hvat næmingar skulu gera, áðrenn teir biðja læraran hjálpa. Á venjingarsíðu 2.1 er ein stig-fyri-stig ferðaætlan til næmingin, ið vil hava læraran at hjálpa. Samstundis er ætlanin eisini hjálp til sjálvhjálp. Næmingarnir verða kunnaðir um uppgávuna og skulu so sjálvir royna at loysa hana. Hava tey brúk fyri hjálp, er tað lætt at síggja, um tey hava fylgt ferðaætlanini, tí tá peika allir næmingar í toyminum upp.

Lærarin sparir ikki bara gongd! Tíðin hjá næmingunum verður eisini brúkt á bestan hátt. Bíðitíð er ikki longur spilt tíð, men verður brúkt skilagott til viðkomandi arbeiði, meðan bíðað verður eftir læraranum. Samstundis verða næmingarnir tilvitaðir um at royna at loysa uppgávuna sjálvir, uttan at vaksin eru hjá.

## Dagsskrá

Vita næmingarnir, hvat teir skulu gera í tínum tímum? Skrivar tú fyrst í hvørjum tíma eina skrá fyri dagin á talvuna?

Nógvir lærarar, sum eg havi hitt, siga mest sum allir: “Ja, aloftast geri eg eina skrá fyri dagin, men av og á sigi eg bara, hvat vit skulu gera.”

Í grunddeildini eru flestir lærarar raskir at skriva dagsskrá á talvuna, kanska seta teir eisini piktogramm ella myndir á talvuna. Lærarin strikar so út, tá ið eitt punkt er gjørt, so næmingarnir kunnu fylgja við í, hvat nú kemur. Tá ið næmingarnir koma í 7. flokk, rokna vit so við, at næmingarnir saktans kunnu minnast, hvat vit søgdu fyrst í tímanum. Men tað er bara ikki altíð so! Eg havi hoyrt næmingar spyrja: ”Tá ið vit eru liðug við hetta, hvat gera vit so?”, sjálvt um eg segði fyrst í tímanum, hvat vit skuldu gera. Tað er jú ikki av illvild, at næmingar spyrja. Tey vilja jú fegin vita, hvat vit ætla við teimum.

Tað er ein stór hjálp at hava eina dagsskrá á talvuni, kanska saman við málinum fyri fakliga partin av tímanum. Í dag eru børn við serligum avbjóðingum í mongum flokkum. Tey fáa eisini góða nyttu av tí, at dagsskráin er greið og sjónlig.

Royn at hugsa um síðsta skeiðið, tú vart á. Skrivaði lærarin eina skrá fyri skeiðið? Eru t.d. steðgir ikki til avtalaða tíð, hvussu bera vaksin seg so at?



Samvirkisnám og floksleiðsla
© NÁM 2016

## Nógv virkisfýsni og tíðum skifti

Hugsa um síðsta tíman hjá tær. Hvussu nógvum ymiskum virksemi kundu næmingar luttaka í? Vóru tað eitt, tvey, trý ymisk virksemi? Undraðist tú á, at næmingarnir ikki kundu hugsavna seg teir síðstu 15 minuttirnar av tímanum, hóast tað annars gekst væl mesta partin av tímanum, og tey sótu still og arbeiddu?

Ein meginregla er, at børn kunnu hugsavna seg í uml. 5 minuttir pluss aldurin. Tað vil altso siga, at tað skulu vera tvey-trý skifti í einum skúlatíma, alt eftir floksstigi.

Royn lærarasíðu 2.2 og ger ein "matarlepa" til tíman hjá tær. Tú kanst eisini taka tíman upp á video og so skriva, hvussu leingi tú greiðir frá, hvussu leingi næmingarnir sita og arbeiða við einari uppgávu o.s.fr.

Tá ið tú hevur funnið okkurt, sum tú vilt broyta í undirvísingini, er tað lætt(ari) at gera okkurt við tað. Tú fert eisini at síggja, at tú longu gert nógv, ið riggar væl. Tað skalt tú ikki broyta!

Tað er gott at skifta millum sitandi virksemi og kropsligt virksemi. Skiftið er nevniliga eisini gott fyri heilavirksemið! Í nógvum venjingum í samvirkisnámi skalt tú eisini brúka kroppin. Skulu næmingarnir sita leingi og arbeiða, er gott at hava eina "heilahvíld" inn ímillum.

Á venjingarsíðunum 2.3-2.6 eru uppskot um slíkar venjingar. Á venjingarsíðu 2.7 er eitt yvirlit, sum hjálpir tær at minnast allar partar av eini fyrireikaðari undirvísing.

## Eitt gott og trygt huglag í flokkinum

Floksleiðsla er eisini at skapa eitt gott og trygt huglag í flokkinum. Lærarin skal leiða felagsskapin, sum er grundaður á viðurkenning og javnvirði. Viðurkenning og javnvirði er bæði galdandi millum næmingar og lærara og næminganna millum.

Samvirkisnám er ein ógvuliga góður háttur at fáa fram hesa viðurkenning. Næmingarnir arbeiða móti einum felags máli stuðlaðir av tilknýti sínámillum í venjingunum. Næmingarnir fáa, við hjálp frá lælaranum og við at eftirmeta avrik síni, eina fatan av, hvussu øll hava týdning í felagsskapinum.



Samvirkisnám og floksleiðsla
© NÁM 2016

# Venjingar til 2. kapittul

## 2.1 • Tá ið tú skalt hava hjálp – næmingasíða

Síðan verður prentað og hongd upp í flokkinum, so næmingarnir gerast tilvitaðir um, hvussu teir skulu gera, tá ið teir hava trupulleikar við onkrari uppgávu. Hugskotið er at brúka tíðina skilagott, so tað ikki fer nógv tíð til at sita og bíða eftir hjálp. Samstundis kann lærarin betur hjálpa næmingum, sum veruliga hava tørv á tí. Meðan næmingar bíða eftir, at lærarin kemur til teirra, hava teir aðrar uppgávur at gera.

## 2.2 • Set tíman saman sum eina máltíð – lærarasíða

Brúka hesa venjing til at seta saman tíman hjá tær. Tú kanst gera tað frammanundan, tá ið tú leggur til rættis, ella eftir ein tíma, tá ið tú eftirmetir. Skriva, hvussu leingi tú greiðir frá, hvussu leingi næmingarnir sita og arbeiða o.s.fr.

## 2.3.-2.6 • Heilahvíld – lærarasíða

Skúladagar er heilin hjá næmingunum á tremur av upplýsingum. Men nógvir næmingar hava ilt við at finna røttu hill í heilanum at seta upplýsingarnar á. Vit vita, at rørsla bøtir um evnini at hugsavna seg, og mong børn hava tørv á meiri rørslu, enn tey fáa møguleika til í skúladegnum. Hesar venjingar eru ætlaðar sum stutt skifti í undirvísingini. Venjingarnar kunnu gerast í flokshølinum og vara ikki meiri enn fimm minuttir. Venjingarnar eru vælegnaðar, áðrenn skift verður til annað virksemi ella sum stutt skotbrá í einum virksemi, t.d. um næmingarnir hava sitið leingi og arbeitt. Hugsa um, hvørjir tveir næmingar skulu vera saman. Kanska skulu tað vera tveir av sama kyni? Venjingarnar kunnu eisini verða gjørdar í toyminum.

Tað ber eisini til at seta ein part av undirvísingini saman við kropsligari venjing. Bið næmingarnar hugsa um ella siga okkurt hart úr undirvísingini, meðan teir venja kropsliga. Í venjing 2.3 fáa næmingarnir t.d. eitt lyklaorð, eitt gott orð ella ein týðandi spurning úr undirvísingini við til venjingina. Hevur tú arbeitt við ævintýrum í føroyskum, kunnu næmingarnir siga ævintýraeyðkenni, hvørja ferð teir boyggja knøini. Tey kunnu siga eina tabell, týsk sagnorð, litir á enskum, formlar at rokna vídd av ymsum skapum ella týðandi orð úr eini grein, ið tey hava lisið.

## 2.7 • Yvirlit yvir at leggja ein tíma til rættis – lærarasíða

Yvirlitið hjálpir læraranum at halda skil á tímanum, og hvar samvirkisnám kemur inn í undirvísingina. Yvirlitið fevnir bæði um tilrættisleggjan og eftirmeting og kann hjálpa tær, tá ið tú leggur til rættis komandi tímar. Við yvirlitinum í hondini kanst tú hugsa um: Hvat var gott, og hvat skal eg broyta?


© NÁM 2016

## 2.1 • Tá ið tú skalt hava hjálp

næmingur

Tá ið tú skalt hava læraran at hjálpa tær, gert tú soleiðis:

- Les uppgávuna umaftur og hygg eftir, um tú ikki kortini dugir hana.
- Brúka hjálpiamboð, sum eru til taks. Bøkur o.a.
- Spyr næmingin, ið situr undir liðini á tær.
- Spyr toymið.
- Um eingin dugir at loysa uppgávuna, rætta øll í toyminum hondina upp.

  ella

- Skriva navnið hjá tær á talvuna, so komi eg, tá ið tú eigur tørn.




© NÁM 2016

## 2.2 • Set tíman saman sum eina máltíð

lærari

**Ein lættur og vælsmakkandi forrættur:**
Lærarin kemur rættstundis
Greið ætlan
Fastar mannagongdir
Greið boð
Set evnið saman við undanvitan hjá næmingunum

**Ein kryddaður og mettandi høvuðsrættur:**
Skift minst eina ferð hvørjar 15 minuttir
Reyður tráður í undirvísingini
Avbjóðingar til allar næmingar
Fjølbroytni og rørsla

**Omaná, smakkar leingi og endar:**
Róligur endi
Upprudding
Heimaarbeiði
Taka saman um evnið
Ein "fitt" viðmerking




© NÁM 2016

## 2.3 • Heilahvíld – vippa

lærari

1. Tveir og tveir næmingar saman (ella toymið).
2. Takið í hendurnar hvør á øðrum.
3. Setið føturnar tætt saman og hellið tykkum afturá.
4. Boyggið knøini og komið so langt niður, sum til ber.
5. Reisið tykkum upp aftur.




© NÁM 2016

## 2.4 • Heilahvíld - stuttlig gongd

lærari

1. Næmingarnir ganga um alt gólvið.
2. Tá ið lærarin sigur “NÚ”, finna tey makkaran, sum er nærmast við.
3. Tey standa rygg ímóti ryggi og krøkja armarnar saman hvør á øðrum.
4. Lærarin sigur, hvussu tey saman skulu flyta seg. T.d.:
   - Lyftið knøini høgt upp
   - Gangið í gásagongd
   - Lakkið
   - Gangið eftir lið
   - Ella okkurt annað





Samvirkisnám og floksleiðsla
© NÁM 2016

## 2.5 • Heilahvíld – tað er ein geit[6]

lærari

1. Lærarin rættir næminginum høgrumegin ein lut (t.d. eina tussj) og sigur: “Hetta er ein geit”.[6]

2. Næmingurin høgrumegin tekur lutin og sigur: “Hetta er hvat?” og gevur læraranum lutin aftur.

3. Lærarin tekur lutin og endurtekur: “Hetta er ein geit” og rættir honum lutin aftur.

4. Næmingurin høgrumegin vendir sær ímóti tí næsta, rættir honum lutin og sigur: “Hetta er ein geit”. So endurtekur hesin aftursvarið, sum frammanundan.

5. Meðan “geitin” er á veg runt, tekur lærarin ein nýggjan lut at senda runt (antin sama veg ella øvugtan). Hann sigur t.d.: “Hetta er ein kúgv”. Síðan verður tað sama endurtikið, sum frammanundan.

6. Set ferðina upp og send lutir runt báðumegin frá, til eingin kann yvirskoða hetta longur. Tað týdningarmesta í venjingini er, at tað er nógv virksemi, og tað er eingin, ið bara stendur og bíðar.

7. Gev lutinum stuttlig nøvn: kjálkafiskur, slatritaska o.s.fr.




6 Íblástur frá „Energizers & Icebreakers“ í Hornstrup Kursuscenter.


© NÁM 2016

## 2.6 • Heilahvíld – vit sita á knøunum hvør á øðrum[7]




1. Standið í einum ringi og leggið hendurnar á akslarnar hvør á øðrum.
2. Stígið eitt fet inn ímóti miðjuni, so ringurin verður tættari.
3. Leggið hendurnar á mjadnarnar á makkaranum, ið stendur framman fyri teg.
4. Gerið ringin rundan aftur og standið tætt hjá hvørjum øðrum.
5. Setið tykkum spakuliga niður á knøini hvør á øðrum.
6. Klappið uppi yvir høvdinum.
7. Ein framkomin avbjóðing: Tá ið næmingarnir hava roynt hetta nakrar ferðir og duga venjingina, kunnu teir stýra hvør øðrum at fara eitt fet í senn eftir hæli.

7 Íblástur frá Kagan (1992).




© NÁM 2016

## 2.7 • Yvirlit yvir at leggja ein tíma til rættis

lærari

Flokkur: ______________________ Evni: ______________________ Dagur: ____________________

Tími: ______________________________________________________________

Hvørji sosial og faklig mál hevur tú fyri tíman?

Faklig: ______________________________________________________________

Sosial: ______________________________________________________________

Hvat tilfar brúkar tú?

Tilfar: ______________________________________________________________

______________________________________________________________

______________________________________________________________

Hvat er uppgávan um? Tá ið tú greiðir næmingunum frá uppgávuni, hvat skalt tú serstakliga leggja dent á?

Uppgávan:

______________________________________________________________

______________________________________________________________

Hvat skalt tú eftirmeta hjá næmingunum?

Eftirmetingarkrøv í toyminum: ____________________________________________

Eftirmetingarkrøv hjá næminginum: ________________________________________
Viðmerkingar at enda:

Hvat var gott? ________________________________________________________

Hvat skal verða betri ella øðrvísi næstu ferð?

______________________________________________________________



Samvirkisnám og floksleiðsla
© NÁM 2016

# 3

## Inklusión


© NÁM 2016

Í hesum kapitlinum lesur tú um inklusión (íroknan). Eitt hugtak, ið arbeitt verður við á ymsan hátt í fólkaskúlanum. Eg komi við einum boði um, hvussu samvirkisnám saman við greiðari floksleiðslu kann vera ein gongd leið til inklusión. At enda eru dømi um, hvussu tú kanst taka ímóti einum nýggjum næmingi í flokkinum.

## Rúmligi skúlin, inklusión (íroknan) og eksklusión (útihýsan)

Í 1994 varð sokallaða Salamanca-yvirlýsingin undirskrivað. Yvirlýsingin er sprottin úr tørvinum at gera "skúlar fyri øll". Inklusión og íroknandi tilgongdin er ein berandi partur í yvirlýsingini. Har stendur m.a.:

- Øll børn hava grundleggjandi rætt til útbúgving og skulu hava møguleika fyri at náa einum góðkendum læringsstøði og kunna verða verandi har.
- Øll børn hava eindømis eginleikar, áhugamál, evni og tørv á læring.
- Vanligir skúlar við tílíkum íroknandi sjónarmiðum eru hentasti miðil til at berja niður mannamun, skapa tryggar felagsskapir, menna íroknandi samfelagið og fáa útbúgvingarmøguleikar til øll. Umframt bjóða hesir skúlar flestu børnum eina góða útbúgving, brúka tilfeingið til fulnar og gagna so statt allari útbúgvingarskipanini.

Við øðrum orðum, so er fólkaskúlin staðið, har næmingarnir uppliva seg sum part í einum felagsskapi, ið byggir á ymisleikan hjá øllum næmingunum.

Í mong ár tosaðu vit um "rúmliga skúlan". Fólkaskúlin skuldi vera skúlin fyri øll, og rúm var fyri nógvum næmingum í skúlanum, men uttan at teir veruliga vóru partur í felagsskapinum. Tað rúmliga kundi vera tað sama sum at vera kropsliga til staðar í einum flokki uttan at hava eitt veruligt pláss millum skúlafelagarnar.

Munurin á at vera "rúmligur" og "íroknandi" er, at tá ið tú verður íroknað/ur, so hevur tú eitt pláss og uppfatar teg sum fullgildugan lim í felagsskapinum og kemur við íkasti til felagsskapin. Verður tú bara rúmað/ur á einum staði, so verður tú framvegis mett/ur sum serlig/ur.

Tað eyðkennir eitt íroknandi umhvørvi ella ein felagsskap, at tey broytast og flyta seg alla tíðina. Karmarnir um felagsskapin eru ikki støðugir, men verða broyttir í mun til limirnar í felagsskapinum.

Í eini íroknandi tilgongd til undirvísing og skúlan verða næmingarnir hvørki hildnir at vera "serligir" ella "vanligir". Tey eru einstaklingar ella serstøk og hava førleikar, ið skulu brúkast. Her ræður um, at skúlin lagar seg til næmingarnar, og næmingarnir laga seg til karmarnar, ið skúlin setir. Í eini ávirkan sínámillum finna næmingar og lærarar fram til, hvussu teir best ala upp ein felagsskap, har pláss er fyri øllum.



© NÁM 2016

Útihýsan (eksklusión)



Rúmligur



Íroknan (inklusión)



## Inklusión og samvirkisnám

Nógvir lærarar kenna tað sum eina eyka byrðu at skula inkludera. Men spurningurin er, um mangir teirra ikki longu hava inkluderað leingi, men uttan at geva sær far um, at teir gera tað?

Sum allir lærarar havi eg havt næmingar, ið høvdu serstakliga trupult við at koma inn í felagsskapin í flokkinum í vanligu undirvísingini. Antin tí tey høvdu fakligar trupulleikar ella tarnað uppmerksemi, og tí ilt við at fara upp í bólkar við leysari skipan og uttan veruliga skrá fyri, hvussu bólkurin skuldi arbeiða. Hesi børn trívast mangan betur í tí meiri stýrdu skipanini, sum er í samvirkisnámi. Her eru leiklutirnir givnir frammanundan. Næmingarnir hava eina týðandi uppgávu at gera, og øll hava týdning fyri, at bólkurin kemur á mál við uppgávuni. Er flokkurin sinnaður at samstarva, ber til at brúka tilfeingið hvør hjá øðrum, og inklusiónin verður ein virðismikil partur í gerandisdegnum.




© NÁM 2016

Hevur tú næmingar við tarnaðum uppmerksemi ella øðrum trupulleikum í flokkinum, skalt tú ikki spyrja, sum vit mangan gera: “Hvat forðar børnum við trupulleikum at fáa góð úrslit?” Heldur skalt tú spyrja: “Hvat kann fáa børn við trupulleikum at arbeiða og fáa góð úrslit?” (Cefai 2009). Tá ið tú spyrt seinna spurningin, leggur tú dent á, hvat tey duga best, víðkar tað og fær tað at mennast, heldur enn sum í fyrra spurninginum at leggja dent á óhepnar umstøður og tað, ið vantar.

Slepst kortini ikki undan trupulleikum, so mugu vit hugsa um aðrar møguleikar. Tú fært íblástur til íroknandi arbeiðið í venjingunum til henda kapittulin.

## Nýggjur næmingur í flokkinum

Ein onnur avbjóðandi støða í felagsskapinum er, tá ið nýggjur næmingur kemur í ein samansjóðaðan flokk. Tá er umráðandi at gera rætt frá fyrsta degi. Tað kunnu vera nógvar orsøkir til, at næmingur skiftir flokk. Flestu tilflytarar eru meiri ella minni ørkymlaðir av støðuni. Hvussu fer nú at gangast í nýggja flokkinum? Næmingar, ið ofta hava skift flokk, tykjast ikki so ørkymlaðir, men kanska lúrir óttin aftan fyri eina tvitna atferð?

Lærarin hevur ábyrgd av at taka ímóti nýggja næminginum, so hann sum skjótast kemur at kenna seg sum part av felagsskapinum.



Samvirkisnám og floksleiðsla
© NÁM 2016

# Venjingar til 3. kapittul

## 3.1 • Finn onkran, sum ... – lærarasíða og næmingasíða

Henda venjing rúmar øllum næmingum og vísir okkum á, at øll kunnu okkurt. Næmingurin, ið vanliga ikki kemur við so stórum íkasti, og sum hini sjáldan velja, skal eisini sleppa at svara spurningum. Tað er tí upp til tín at orða spurning(ar), sum bara hesin eini næmingur kann svara. Soleiðis verður hann umbiðin í venjingini, tí næmingarnir stríðast fyri at fáa so nógvar undirskriftir, sum til ber.[8]

Á lærarasíðuni er vegleiðing til venjingina. Spurningarnir á næmingasíðunum 3.1.1 og 3.1.2 eru ætlaðir sum íblástur. Tú kanst skriva aðrar spurningar í skjalið og avrita til hvønn næming sær.

## 3.2 • Spjøldur – lærarasíða

Henda venjing gevur næmingunum nýggjar leiklutir í mun til tær vanligu. Venjingin fær okkum at hugsa um spjøldur, ið vit mangan seta á onnur. Vit kunnu koma at síggja hvønn annan við øðrvísi eygum.[9]

## 3.3 • Næmingurin hesa vikuna – lærarasíða og næmingasíða

Flestum næmingum dámar væl at vera í brennideplinum. Summir koma lættari í brennidepilin enn aðrir, og summum næmingum hoyrir tú næstan ongantíð málið í. Henda venjing kann fáa øll at uppliva seg sum serstakan og gevur floksfeløgunum møguleika at lurta.[10]

## 3.4 • Navnaspæl – lærarasíða og næmingasíða

Tá ið nýggjur næmingur kemur í flokkin, er eitt tað fyrsta, hann má gera, at læra seg nøvnini á floksfeløgunum. Venjingin er ein stuttligur máti at læra nøvnini.

Á lærarasíðuni er vegleiðing til venjingina, meðan næmingasíðan verður prentað til flokkin at skriva á.

## 3.5 • Hvat kann eg hjálpa við? – næmingasíða

Fyri at taka sum best ímóti einum nýggjum næmingi í flokkinum er eitt gott hugskot at vísa honum, hvørjum hann skal venda sær til við spurningum ella fyri at fáa hjálp. Næmingasíðan 3.5.1 verður prentað til hvønn næming sær. Næmingarnir skriva hvør sær, hvat teir kunnu hjálpa nýggja næminginum við. Næmingasíðan 3.5.2 verður fylt út til nýggja næmingin, so hann hevur eitt felags yvirlit yvir persónar at heita á eftir tørvi.

---

8 Venjingin er við íblástri úr "Svar Bazar" hjá Kagan.
9 Íblástur frá EVAM (2003).
10 Venjingin er við íblástri frá P. Huggins smb. Cefai (2009).



© NÁM 2016

## 3.1 • Finn onkran, sum ...




1. Allir næmingar fáa næmingasíðu 3.1.1.

2. Næmingarnir fara til gongu í hølinum.

3. Tey møta einum floksfelaga, heilsa vinaliga og spyrja viðkomandi ein spurning av síðu 3.1.1. T.d. “Dámar tær at síggja Disney Channel?”

4. Svarar felagin ja, skrivar hann undir á síðuna aftan fyri spurningin.

5. Svarar felagin nei, spyr næmingurin hann ein annan spurning.

6. Tá ið næmingurin hevur fingið undirskrift frá einum floksfelaga, má næmingurin ikki spyrja hann umaftur.

7. Nú eigur floksfelagin tørn at spyrja.

8. Venjingin er liðug, tá ið síðan er fylt út, ella tá ið lærarin sigur, at tey skulu steðga.

**Broyting:**
Tú kanst skriva so nógvar spurningar, sum talið á næmingunum minus ein. So mugu næmingarnir spyrja øll í flokkinum fyri at fáa fulla síðu. Næmingarnir mugu hugsa seg væl um, hvønn teir spyrja. Tað er jú bara ein spurningur til hvønn.

Næmingarnir kunnu sjálvir gera spurningarnar, møguliga í smáum toymum.

Tað ber til at lata tveir næmingar verða saman um síðuna, megna teir ikki venjingina einsamallir.

Tað nýtist ikki at vera sama síða, ið allir næmingar ganga runt við.

Spurningarnir kunnu eisini vera um okkurt evni úr undirvísingini.

Er venjingin faklig, kanst tú gera ein eyka teig til svarið á næmingasíðuni. Hygg á næmingasíðu 3.1.2.


© NÁM 2016

# 3.1.1 • Finn onkran, sum ...

næmingur

| Finn onkran, sum ... | Undirskrift |
|---|---|
| Ger ítrótt í frítíðini | |
| Hevur eina slangu sum kelidýr | |
| Dámar at síggja Disney Channel | |
| Dámar rugbreyð | |
| Elskar summarfrítíðina | |
| Hevur tvey systkin | |
| Dámar at sova leingi | |
| Spælir teldu | |




© NÁM 2016

## 3.1.2 • Finn onkran, sum ...

næmingur

| Finn onkran, sum ... | Svar | Undirskrift |
|---|---|---|
| Veit, hvat 5 x 5 er | | |
| Dugir formulin fyri ummál á sirkli | | |
| Veit, hvat "blýants-spískari" eitur á enskum | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |




© NÁM 2016

# 3.2 • Spjøldur

lærari

- Tú skalt brúka klistrimerki ella post it-lepar, ein til hvønn næming.
- Skriva eitt eyðkenni á hvønn lepan.
- Ger eina uppgávu til bólkin, t.d. at tey skulu kjakast um eitt evni, gera okkurt ítøkiligt (plakat ella tílíkt), rokna eitt stykki ella okkurt annað.
- Set ein post it-lepa á pannuna á hvørjum næmingi. Næmingurin má ikki síggja, hvat stendur á síni pannu.

Meðan bólkurin ger uppgávuna, skulu tey fara hvør við øðrum í mun til, hvat stendur á post it-lepunum. Tey mugu ikki brúka orðið á lepunum, men vísa í verki og talu, hvussu næmingurin er.

Í endanum á venjingini skulu næmingarnir royna at gita, hvat stendur á sínum post it-lepa.

Tá ið venjingin er liðug, er tað umráðandi, at allir næmingar siga frá, hvussu teir upplivdu venjingina.

Í smáum bólkum, 3-5 næmingar í hvørjum, kunnu teir skiftast um at spyrja hvønn annan í tveir minuttir:

- Hvussu hevði tú tað undir venjingini?
- Var tað trupult at fara við hinum í mun til, hvat stóð á pannuni?
- Var tað onkur, ið broytti atburð í mun til, hvat stóð á lepanum?
- Koma vit onkuntíð ótilvitað at "seta spjøldur" á onnur?

Gáa um lepan, tú gevur hvørjum næmingi. Tað er ikki so snilt at lata ein dovnan næming vera "dovin". Endamálið er ikki at koma við persónligum áskoðanum um hini í bólkinum, heldur tvørt-urímóti.

**Uppskot at skriva á spjøldur:**
Dugnalig/ur, klók/ur, røsk/raskur, dovin, stuttlig/ur, klossut/ur, ábyrgdarleys/ur, hugskotsrík/ur, áleypandi, súr/ur, lurtandi, atfinningarsom/samur, ráðarík/ur, stýrandi, kenslulig/ur, umsorgar-full/ur, forvitin, gloymsk/ur, ovursint/ur, bráð/ur, sjálvgóð/ur, stuttlig/ur, stórætlað/ur, smæðin, opin, afturlatin, errin...




© NÁM 2016

# 3.3 • Næmingurin hesa vikuna

lærari

Venjingin er ógvuliga væl egnað til flokkar, har næmingarnir ikki kenna hvønn annan væl. Men hon kann eisini brúkast í “gomlum” flokkum. Helst fáa næmingarnir okkurt nýtt at vita um floksfelagarnar.

Hvørja viku verður ein næmingur valdur sum “næmingurin hesa vikuna”. Næmingurin skrivar so á næmingasíðu 3.3 ymiskt um seg. Har verður m.a. spurt um ítriv, áhugamál, familju, mat o.a. Tað ber væl til at pynta síðuna við myndum, klippum og øðrum.

Skrivaða síðan verður hongd upp í flokkinum, og næmingurin fortelur um seg. Sum vikan gongur, sigur næmingurin meiri og meiri um seg, og flokkurin kann eisini spyrja.

Fríggjadag skipar lærarin fyri tiltakinum “Ein søga um næmingin hesa vikuna”. Tá skulu næmingarnir skriva eina søgu ella tekna eina mynd av næminginum og tí, hann hevur greitt frá í vikuni. Allar søgur skulu vera jaligar.

“Næmingurin hesa vikuna” teknar eitt umslag um søgurnar. Umslagið kann lýsa søgurnar hjá floksfeløgunum.


© NÁM 2016

# 3.3 • Næmingurin hesa vikuna

næmingur

Næmingurin hesa vikuna ______________________________

Besti lutur ______________________________

Mynd

Familja ______________________________

Matur ______________________________

Áhugamál ______________________________

Sjónvarpssending ______________________________

Spæl ______________________________

Lærugrein ______________________________

Filmur ______________________________

Annað ______________________________




© NÁM 2016

# 3.4 • Navnaspæl




Hvør næmingur skal í tveir minuttir hugsa um eitt orð um seg. Orðið skal byrja við sama stavi sum navnið. Síðan skiftast næmingarnir í flokkinum at siga navnið og tað, teir hava valt at siga um seg.

- “Eg eiti Jónatan, og mær dámar væl jarðber.”
- “Eg eiti Fríði, og eg spæli fótbólt.”
- “Eg eiti Ívar, og eg eti ofta ís.”
- “Eg eiti Sissal, og eg eri ikki súr sum ein sitrón.”
- “Eg eiti Fía, og mær dámar væl at hyggja at filmi í biografi.”

Á henda hátt lærir nýggi næmingurin nøvnini og fær samstundis okkurt at vita um nýggju floksfelagarnar. Og hvør veit, kanska fáa teir “gomlu” næmingarnir í flokkinum eisini okkurt nýtt at vita um onkran?




© NÁM 2016

# 3.4 • Navnaspæl

næmingur

| Navn | Um meg |
|---|---|
| Jónatan | Mær dámar jarðber. |
| Fríði | Eg spæli fótbólt. |
| Ívar | Eg eti ís. |
| Sissal | Eg eri ikki súr sum ein sitrón. |
| Fía | Mær dámar at hyggja at filmi í biografi. |
| | |
| | |
| | |
| | |




© NÁM 2016

# 3.5.1 • Hvørjum kann eg hjálpa við?

næmingur

| | |
|---|---|
| Eg eiti | |
| Mær dámar | |
| Eg vil fegin hjálpa við | |




© NÁM 2016

## 3.5.2 • Hvørjum kann eg hjálpa við?

næmingur

Vælkomin í flokkin! Her er ein listi yvir floksfelagarnar, sum fegnir vilja hjálpa tær, hevur tú brúk fyri tí!

| Navn | Mær dámar | Eg vil fegin hjálpa við |
|---|---|---|
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |




© NÁM 2016

# 4

## Viðurkenning


© NÁM 2016

Í eini góðari floksleiðslu er førleiki til sambond og evnini at "síggja" næmingarnar, har teir eru. Hesin kapittulin greiðir frá, hvussu tú viðurkennir næmingarnar. Viðurkenning er meiri og annað enn rós, men hvussu kemur tú frá at rósa til at viðurkenna? Í venjingunum síðst í kapitlinum eru fleiri uppskot um, hvussu tú arbeiðir við at viðurkenna næmingarnar.

## Læraraførleiki til sambond

Sum áður nevnt, eru niðurstøðurnar í frágreiðing frá Dansk Clearinghouse for Uddannelsesforskning (Nordenbo 2008), at lærarin skal hava førleika at taka lut í sosialum sambondum, vera ein sjónligur leiðari og hava førleikar at læra frá sær. At taka lut í sosialum sambondum og skapa gott umhvørvi um læring hevur støði í eini viðurkennandi tilgongd til næmingarnar.

Tað er ógvuliga grundleggjandi at síggja næmingar sínar. At "síggja" skal skiljast sum at síggja hvønn einstakan í eyguni hvønn dag og tosa og samskifta við øll gjøgnum dagin. At "síggja" er tó bara fyrsta stig á viðurkenningartrappuni, sum Henning Rye (1997) hevur gjørt:

**Viðurkenningartrappan**




Tá ið vit síggja og møta næminginum dagliga, hyggja blíðskortað inn í eyguni á honum og tosa við hann um gerandisdagin hjá honum, kunnu vit fáa eina fatan av, hvat hevur týdning fyri hann. Lærarin má eisini "geva eitt sindur frá sær", so samband er báðar vegir.

Skilja vit, hvat hevur týdning fyri næmingin, kunnu vit betri góðtaka hansara verð, sum hon er. Samstundis sum lærarin góðtekur næmingarnar, skulu teir eisini góðtaka læraran sum floksleiðara. Næmingarnir mugu eisini læra at góðtaka hvønn annan, annars verður t.d. bólkaarbeiðið ikki hitt besta. Men vit mugu stíga á fýra tey fyrstu trappustigini, áðrenn vit koma til at viðurkenna.



© NÁM 2016

## Viðurkenning ella rós?

Ber til at rósa ov nógv? Er rós ein partur av viðurkenning? Av og á kemur bland í hugtøkini rós og viðurkenning. Rós fært tú fyri okkurt, tú GERT, og viðurkenning fyri okkurt, tú ERT. Viðurkenning økir um sjálvvirðið, og rós um sjálvsálitið.

Rós er ein partur av tí at viðurkenna, men rós kann ongantíð standa einsamalt. Viðurkenning er at síggja næmingin sum ein serstakan persón, óansæð um tú ert samd/ur við næmingin. At fáa viðurkenning frá øðrum hevur avgerandi týdning fyri at menna sjálvvirðið.

Tá ið lærari viðurkennir ein næming, setir lærarin seg í støðuna hjá honum og vil veruliga vita, hvat næmingurin heldur og hugsar. Heldur lærarin, at normurin hjá næminginum og tað, hann hevur heimanífrá, hevur minni at týða, enn tað, ið lærast skal í skúlanum, so verður trupult at viðurkenna næmingin. Lærarin má taka næmingarnar í álvara. (Moltke og Molly 2010).

Arne Tveit (2010) nevnir hesar meginreglur fyri munadygt rós:

1. Rós skal vera miðvíst og skipað.
2. Rós skal vera heilhugað og ærligt.
3. Rós leggur ikki bara dent á avrik, men eisini á tilgongd og luttøku.
4. Tú mást ikki rósa og samstundis finnast at.
5. Tú skalt rósa alt fyri eitt.

Ein liður í at rósa og viðurkenna er at arbeiða tilvitað við venjingum, so næmingarnir læra at rósa hvørjum øðrum. Venjingarnar 4.1-4.3 leggja dent á rós og viðurkenning næminganna millum.

At næmingar rósa hvørjum øðrum útilokar ikki viðurkenning frá læraranum. Lærarin má geva næmingunum viðurkenning! Sum greitt frá frammanfyri, skal rós vera miðvíst og fyri okkurt ítøkiligt. So tú kanst ikki gera ov nógv av at rósa og viðurkenna. Men verður róst uttan veruligt innihald og ikki heilhjartað, verður róst ov nógv.

## Tey, ið fáa minst rós og viðurkenning, treingja mest til tað

Tað er trupult at rósa summum næmingum, antin tí teir hava eina víðfevnda neiliga atferð, ella tí lærarin hevur ilt við at síggja nakað rósvert í teimum. Munnu vit ikki øll kenna børn, ið eru von at verða róst til skýggja fyri vakrar tekningar, men uttan at mamma ella pápi (ella lærarin!) í veruleikanum hava skeitt at tekningunum? Hesir næmingar tráa mangan eftir rósi, og tað kann verða trupult at rósa, tá ið rós jú skal vera heilhjartað. Øll børn hava sjálvandi brúk fyri at verða sædd og hoyrd. Ein møguleiki er, at læraratoymið ger eina ætlan fyri, hvussu næmingurin skal verða róstur (Tveit 2010), so hann ikki smokkar burturímillum. Men hvørja atferð skulu vit serstakliga viðurkenna, og nær og hvussu vil lærarin rósa ítøkiliga? Á venjingarsíðu 4.4 er ein talva, ið lærarin kann brúka, so hann er vísur í, at hvør næmingur verður sæddur og fær viðurkenning.




© NÁM 2016

Lærarin velur sær fyrst fimm næmingar, sum hann í eina tíð gevur størri gætur. Síðan velur hann fimm aðrar. Á henda hátt kemur lærarin runt til allar og minnist allar. Stillføru næmingarnir, sum ikki gera nógvan háva av sær, hava jú eisini uppiborið at verða sæddir.

Tað kann vera trupult hjá summum børnum (og vaksnum) at fáa rós. Í venjing 6.4 læra næmingarnir at rósa og fáa rós.

## Gáa mest um atferð, ið tú vilt síggja oftari

Sambært Bergkastet (2010) vísa kanningar, at vit gáa uml. fimtan ferðir so nógv um neiliga atferð sum um jaliga. Men gera vit viðmerkingar til neiliga atferð, hevur tað onga ávirkan á tilelvingina. Sjálvandi skal lærarin beina ein næming á veg, men tað er gagnligari at fyribyrgja eini skeivari kós.

Atferðin, ið tú vísir ans, er somuleiðis tann atferð, ið næmingurin endurtekur. Gáa vit fimtan ferðir so nógv um neiliga atferð sum jaliga, so er tað neiliga atferðin, ið aftur verður endurtikin!

Nú kanst tú hugsa teg um, hvørja ferð tú sært ein óhóskandi atburð í flokshølinum, og um tú skalt viðmerkja atburðin. Ella um tað er ein betri mannagongd at rósa og "síggja" bara jaliga atferð? Tú kanst jú royna venjingarsíðu 4.5 í einum tíma og hyggja eftir, hvussu ofta tú viðmerkir lutfalsliga jaliga og neiliga atferð.

## Rós og samvirkisnám

Nógvir lærarar eru heldur ovfarnir av, at samvirkisnám-venjingar, serstakliga tær hjá Spencer Kagan, hava rós uppií. Tað kann tykjast ógvuliga amerikanskt og lítið hóskandi til okkara fólkaskúla. Við tí omanfyrinevnda í huga er rætt at rósa, men vit skulu finna eina hóskandi legu til skúlan. Tað er spell at kveistra til viks góðu hugskotini í undirvísingini við samvirkisnámi, bara tí vit ikki vilja rósa og halda tað vera so tilgjørt.

Fara vit at rósa meiri tilvitað, broytist samveran við næmingarnar. Royn tað bara! Eg haldi, at flestu okkara eru rættiliga fegin um at hoyra, hvat vit gera væl. Sjálvandi er tað eisini galdandi fyri næmingarnar.




© NÁM 2016

# Venjingar til 4. kapittul

## 4.1 • Tú dugir væl – lærarasíða og næmingasíða

Í hesi venjingini skulu næmingarnir á ein jaligan hátt geva hvørjum øðrum gætur við at rósa og viðurkenna.

Á lærarasíðuni verður kunnað um venjingina. Næmingasíðan verður prentað til hvønn næming sær.

## 4.2 • Gev ein lepa – lærarasíða

Eisini í hesi venjing skulu næmingarnir á ein jaligan hátt geva hvørjum øðrum gætur við at rósa og viðurkenna. Her síggja øll, hvat næmingarnir skriva um hvønn annan.

## 4.3 • Hvat dugi eg? – lærarasíða

Venjingin elur upp felagsskap, og næmingarnir koma at síggja førleikar, sum teir kanska ikki vistu seg hava. Venjingin egnar seg best til teir elstu næmingarnar.

## 4.4 • Síggj næmingin – lærarasíða

Læraratoymið kann brúka talvuna á síðuni at tryggja sær, at allir næmingar verða sæddir og fáa viðurkenning. Talvan er serstakliga væl egnað, um tað eru næmingar, ið tú beinleiðis hevur ilt við at geva viðurkenning.

## 4.5 • Jalig og neilig atferð – lærarasíða

Her er eitt yvirlit yvir, hvussu ofta tú viðmerkir jaliga og neiliga atferð í einum tíma. Krossa av í talvuni, antin við “Jalig atferð” ella “Neilig atferð”. Tú kanst skriva sjálv/ur, ella tú fært ein samstarvsfelaga at koma inn í tíman at skriva fyri teg.


© NÁM 2016

# 4.1 • Tú dugir væl

lærari

- Allir næmingar skriva navnið niðast á næmingasíðu 4.1.

- Næmingasíðurnar fara runt í flokkinum, og allir næmingar skriva okkurt, sum skúlafelagin dugir væl. Eisini okkurt, teir meta høgt hjá honum. Tú kanst gera aðrar yvirskriftir.

- Tá ið ein næmingur hevur skrivað, faldar hann síðuna, so næsti næmingur ikki sær tað, ið er skrivað frammanundan.

- Næmingasíðurnar fara runt til allar næmingar.

- Tá ið venjingin er liðug, hava øll skrivað um allar næmingar í flokkinum.

- Tað, sum er skrivað, kann vera ein góð gáva til næmingarnar, tá ið teir fara úr skúlanum.

**Broyting:**
Venjingin kann eisini vera sum ein "heitur stólur". Ein næmingur setir seg í heita stólin mitt á gólvinum, og allir floksfelagarnir skiftast um at siga okkurt gott um næmingin í stólinum.

Lærarin skrivar alt, ið sagt verður, og gevur næminginum tað, so hann fær hvørt orð heim við.



© NÁM 2016

# 4.1 • Tú dugir væl

næmingur

Tú dugir væl at: ______

Mær dámar teg, tí: ______

Tú dugir væl at: ______

Mær dámar teg, tí: ______

Tú dugir væl at: ______

Mær dámar teg, tí: ______

Tú dugir væl at: ______

Mær dámar teg, tí: ______

Tú dugir væl at: ______

Mær dámar teg, tí: ______

Tú dugir væl at: ______

Mær dámar teg, tí: ______

Tú dugir væl at: ______

Mær dámar teg, tí: ______

Tú dugir væl at: ______

Mær dámar teg, tí: ______

Tú dugir væl at: ______

Mær dámar teg, tí: ______

Tú dugir væl at: ______

Mær dámar teg, tí: ______

Tú dugir væl at: ______

Mær dámar teg, tí: ______

Tú dugir væl at: ______

Mær dámar teg, tí: ______

Tú dugir væl at: ______

Mær dámar teg, tí: ______




© NÁM 2016

Tú dugir væl at: ___

Mær dámar teg, tí: ___

Tú dugir væl at: ___

Mær dámar teg, tí: ___

Tú dugir væl at: ___

Mær dámar teg, tí: ___

Tú dugir væl at: ___

Mær dámar teg, tí: ___

Tú dugir væl at: ___

Mær dámar teg, tí: ___

Tú dugir væl at: ___

Mær dámar teg, tí: ___

Tú dugir væl at: ___

Mær dámar teg, tí: ___

Tú dugir væl at: ___

Mær dámar teg, tí: ___

Tú dugir væl at: ___

Mær dámar teg, tí: ___

Tú dugir væl at: ___

Mær dámar teg, tí: ___

Tú dugir væl at: ___

Mær dámar teg, tí: ___

Tú dugir væl at: ___

Mær dámar teg, tí: ___

Navn: ___


© NÁM 2016

# 4.2 • Gev ein lepa




1. Næmingarnir fáa hvør sín blokk við post it-lepum.

2. Tey ganga runt í flokkinum.

3. Tá ið tey hitta ein floksfelaga, skulu tey seta ein gulan lepa á bakið á honum. Á lepanum stendur okkurt, ið:
   - tey meta høgt hjá næminginum
   - næmingurin dugir væl
   - tey fegin vilja siga um næmingin.

4. Øll skulu seta ein lepa á bakið á øllum.

5. Tað kann vera eitt gott hugskot at fyrireika næmingarnar til venjingina. T.d. geva teimum 10 minuttir at hugsa seg um, áðrenn venjingin fer í gongd.

6. Tað kann eisini vera hent at koma við nøkrum dømum um, hvat tey kunnu skriva á lepan.

**Broyting:**
Í staðin fyri post it-lepar, ið kunnu detta av undir venjingini, kanst tú brúka eitt A3-pappír við holi í miðjuni. Næmingurin stingur høvdið ígjøgnum holið og hevur nú ein “kraga” til næmingarnar at skriva á.




© NÁM 2016

# 4.3 • Hvat dugi eg?

lærari

1. Allir næmingar fáa stundir at hugsa um eina hending, sum hepnaðist hjá teimum. Tað kann eisini vera ein stuttlig hending. Tað skal vera hent í frítíðini ella í skúlatíðini.

2. Sum dømi: Tey gjørdu eina góða uppgávu. Tey hava fingið arbeiði í frítíðini, ella kanska upplivdu tey okkurt ógvuliga gott saman við familjuni.

3. Tey kunnu møguliga skriva stikkorð um hendingina.

4. Næmingarnir arbeiða saman í toymum, 3-5 í hvørjum. Tey skiftast um at siga søguna fyri hvørjum øðrum í toyminum.

5. Meðan næmingurin sigur frá, skulu hini lurta væl og finna førleikar hjá honum, ið sigur frá.

6. Førleikar, sum tey hoyra um í søguni, skulu tey skriva niður á smáar lepar.

7. Leparnir verða lagdir í ein brævbjálva. Tá ið venjingin er liðug, fáa allir næmingar hvør sín brævbjálva við førleikunum, ið næmingarnir skrivaðu út frá søguni.

Hvør næmingur fær soleiðis størri innlit í, hvat hann dugir, og hann fegnast óivað um tað. Orðini kunnu eisini verða brúkt ítøkiliga í eini umsókn ella í eini persónligari frágreiðing.




© NÁM 2016

# 4.4 • Síggj næmingin

lærari

Tíðarskeið at gáa um næmingar: ____________________

| Næmingur | Í brennideplinum | Vit viðurkenna soleiðis | Ábyrgd |
|---|---|---|---|
| Sveinur | Dugir og vil hjálpa floksfeløg-um sínum við støddfrøði. | Vit geva honum heiðursmerki sum floksfelagi. | Tummas |
| Aleksandur | Onkrar hendingar, har Aleksandur er við, og tað gongur væl. | Vit nevna tað hvørja ferð, tað gongur væl. | Øll |
| Sofía | Spyrja Sofíu í donskum, hóast hon ikki rættir hondina upp. | Viðurkenna svarini hjá henni. | Anna |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |



Samvirkisnám og floksleiðsla
© NÁM 2016

# 4.5 • Jalig og neilig atferð

lærari

Lærari: ______________________ Tími: ______________________

Møguligur eygleiðari: ______________________

| **Jalig atferð +** | **Neilig atferð -** | **Viðmerking** |
|---|---|---|
| X | | Takkaði næmingunum, sum høvdu tikið roknibøkurnar upp. Úrslitið var, at hinir næmingarnir eisini tóku bøkurnar fram. |
| | X | Bað Báru og Veru halda uppat at tosa. |
| X | | Rósti næmingunum, ið komu rættstundis. Segði einki um tað, at summir komu ov seint. |
| | | |
| | | |
| | | |




© NÁM 2016

# 5

# Samskifti


© NÁM 2016

Vit brúka nógva tíð at fáa børn at sita still. Høvdu vit heldur í fakligum høpi brúkt viðføddu trongdina hjá næmingunum at tosa, hevði tað ikki verið neyðugt at brúkt so nógva tíð at biðja næmingarnar vera friðarligar. Í hesum kapitli eru nógvar venjingar við veruligum samskifti. Veruligt samskifti hevur bæði ein avsendara og ein móttakara, og báðir partar mugu taka atlit til tað, ið sagt verður.

Tað eru ikki bara børn, ið hava ilt við at lurta. Sama er galdandi fyri vaksin. Soleiðis kunnu nógvar av venjingunum eisini verða brúktar, t.d. á starvsfólkafundi ella toymisfundi.

## Samskifti – er tað bara innantómt tos?

Orðið samskifti merkir: "Tað at vera saman um eitthvørt". Samskifti er grundleggjandi fyritreyt fyri felagsskapinum. Tað er trupult at ímynda sær ein felagsskap við ongum samskifti millum limirnar. Tað er eisini trupult at ímynda sær menniskju sum eina veru við ongum samskifti, tí frá pinkubarni er samskifti eitt av týdningarmestu amboðunum fyri at yvirliva.

Tá ið børn koma í skúla fyrsta dagin, eru flestu teirra ógvuliga mælsk. Tey vilja fegin siga frá øllum rundan um seg og frá upplivingum. Flestu teirra fáa rættiliga nógv við.

Lærarin roynir at læra børnini, at bara í ávísum høpi er tað í lagi at tosa. Ein tann týdningarmesta læran fyrstu skúlaárini er at læra seg at tiga! Lærarar brúka nógva orku at fáa frið í flokkinum og at læra børnini at bíða eftir tørni og lurta eftir tí, ið sagt verður.

Brúktu vit heldur viðfødda hugin hjá næmingunum at tosa og fingu tey at kjakast um viðkomandi evni í undirvísingini, kundi orkan so farið til okkurt fakligt og viðkomandi virksemi?

Eg havi mangan biðið næmingar tiga, tí teir sótu og tosaðu, so tað hoyrdist ikki, hvat eg greiddi flokkinum frá. Summir teirra svaraðu, at tey sótu og tosaðu um lærugreinina. "Júmen, vit tosa um uppgávuna". Latið okkum so ímynda okkum, at næmingarnir veruliga "tosaðu um uppgávuna" og høvdu skilt hana og bara vildu sleppa í gongd. Kanska tey eisini fakliga kundu bjóðað hvørjum øðrum av, men vórðu forðaðir í læringini og máttu bíða, til restin av flokkinum hevði skilt uppgávuna og kundi fara í gongd?

Tað er jú jaligt, at næmingar kjakast um tað fakliga í undirvísingini og hava hug at fara í gongd.

Men samskiftið hevur ikki bara týdning fyri samveru okkara. Tað finst eingin lærugrein, sum ikki eisini hevur eitt endamál fyri samskifti í endamálsorðingini. Tí skulu vit eisini arbeiða tilvitað við hesum partinum av undirvísingini. Minnist til, at í veruligum samskifti er tað ein, ið tosar, og ein, ið lurtar og svarar.

Vit hava øll upplivað, onkuntíð tá ið vit tosa við onkran, at hesin í veruleikanum bara bíðar eftir at sleppa framat at siga sína søgu. Og munnu vit ikki onkuntíð sjálvi hava lagt upp í prát hjá øðrum fyri at siga okkara søgu?
Í venjing 5.1 og 5.2 skulu næmingarnir læra seg at lurta, áðrenn teir sjálvir sleppa at tosa.


© NÁM 2016

## Hvør lurtar eftir hvørjum?

Lurta næmingarnir altíð eftir tí, tú sigur? Lurta næmingarnir altíð eftir floksfeløgunum? Tað er frálíkt, um so er! Spyrja vit lærarar, so svara teir í báðum førum: “Ikki altíð”. Ein av orsøkunum, at næmingar ikki altíð lurta, kann vera, at teir ikki eru greiðir yvir, hvat er “at lurta”. Hesin spurningur verður umrøddur í 6. kapitli um sosialar førleikar hjá næmingunum. Ein onnur orsøk kann vera, at næmingarnir als ikki vita, hvussu teir skulu brúka tað, teir hoyra.

Í venjingunum 5.3. og 5.4 venja næmingarnir førleikan at lurta.

Tá ið næmingar leggja fram, er tað ofta ein avbjóðing at fáa øll hini við. Í venjing 5.4 eru nøkur kort, ið kunnu fáa næmingarnar at lurta miðvíst eftir eini framløgu.

## Hvørjum læra vit av?

Einvegis samskifti er ikki nøktandi undirvísingarháttur. Hvussu fegin vit so enn vilja trúgva tí, so skulu vit ikki taka sum givið, at tað, vit siga við næmingarnar, er tað sama sum, at teir læra tað.

Í hesum myndli sæst eitt boð uppá, nær læring fer fram (Bochmann og Kirchmann 2006):







© NÁM 2016

Sum myndilin frammanfyri vísir, skulu næmingar samskifta fyri at læra meiri. Tú kanst eisini við eini skipaðari tankagongd siga, at hvørt menniskja er miðdepil í sínum egna hugaheimi (Hornstrup 2008). Tað vil siga, at móttakarin ger av, hvørji boð hann fær í samskiftinum! Tað kann væl vera, at lærarin sigur tað sama við allar næmingar. Men tað er eisini so, at tað eru líka so nógvar fatanir av tí, lærarin sigur, sum tað eru næmingar. Skúlin og flokkurin er sum ein skipan, har limirnir fáa eina heild burturúr við hjálp av samskiftinum. Lærarin má gera karmarnar so, at næmingarnir sleppa at royna seg og fáa skil á tí, ið sagt verður.

## Samskifti í undirvísingina

Afturboðan (feedback) er ein av mest týðandi táttunum fyri læring og avrik hjá næmingunum (Dysthe 2009). Afturboðanin til næmingarnar er ofta ein eftirmeting hjá lærara av uppgávum. Tað er umráðandi, at næmingarnir fáa eina týðiliga afturboðan um endamálið við uppgávuni, hvar teir eru staddir beint nú, og hvussu teir kunnu koma víðari. Hetta síðsta partsmálið eru næmingarnir mest ónøgdir við, og her er eisini truplast hjá læraranum at geva eina ítøkiliga afturboðan. Lærarar brúka rættiliga nógva tíð til afturboðan og viðmerkingar, og henda afturboðan eigur at vera ein fyrimynd hjá næmingunum, tá ið teir skulu geva floksfeløgunum afturboðan.

Venja næmingarnir seg at eftirmeta hvønn annan, verða teir læringartilfeingi hjá hvørjum øðrum. Tey læra málbúna at eftirmeta við og koma tí at geva sær nógv meiri far um avrik síni.

Eftirmetingin er ein týðandi partur í arbeiðinum við samvirkisnámi. Næmingarnir skulu venja seg at meta um egin avrik, og hvat teir fáa burtur úr undirvísingini. Eftirmeta tey hvørt annað við uttanveltaðum krøvum, fáa tey so við og við ein málbúna, sum fær tey at gerast vandnari í metingunum av egnum teksti. Soleiðis kunnu tey mennast.

## Samskifti og samvirkisnám

Jaliga tilknýtið millum næmingarnar í samvirkisnámi kemur m.a. til sjóndar, tá ið næmingarnir hava eitt felags endamál at arbeiða fram ímóti. Tað ber ikki til at náa málinum, um ikki allir næmingar eru virknir og taka lut. Í venjingunum eru tey knýtt hvør at øðrum og mugu lurta eftir floksfeløgunum fyri at kunna hjálpa við at koma víðari við uppgávuni.

Uttan samskifti er ómøguligt at taka lut. Hyggja vit at frymlinum um læring frammanfyri, sæst, at tú lærir uml. 50 prosent av tí, tú tosar við onnur um. Í samvirkisnámi er nógv samskifti um faklig evni, og tá læra næmingarnir munandi meiri av prátinum sínámillum, um hvat teir hava lært ella varnast, enn tá ið lærarin greiðir frá óteljandi ferðir.

Venda vit aftur til næmingarnar, ið søgdu seg tosa um uppgávuna, teir skuldu gera, so er altso eingin orsøk at lata teir bíða eftir restini av flokkinum. Lat tey bara fara í gongd. Í venjing 5.5 fáa næmingarnir fyrimun av, at teir ikki skulu brúka líka langa tíð um somu uppgávu.



© NÁM 2016

Leggur tú dent á samskiftið í undirvísingini, kann tað eisini økja tilelvingina hjá næmingunum. Nógv teir flestu næmingarnir uppliva, at tá ið teir gerast partur av undirvísingini, verður tað eisini stuttligari at ganga í skúla (hóast ikki allir næmingar vilja viðganga tað!).

## Samskifti, samvirkisnám og floksleiðsla

Sum áður nevnt kann floksleiðsla verða lýst, sum Elsebeth Jensen og Ole Løw siga: "Evnini hjá lærara at skapa eina jaliga, samstarvshugaða og inkluderandi (íroknandi) floksmentan, eggja til luttøku og at fáa arbeiðsfrið" (Jensen og Løw 2009).

Floksleiðsla er altso m.a. at skapa eina samstarvshugaða mentan, har lærarin eggjar næmingunum at taka lut. Í samstarvi er sjálvandi samskifti. Letur lærarin munnin aftur og lovar næmingunum framat, so hendir nakað við luttøkuni hjá næmingunum. Nú er rúm fyri, at næmingarnir kunnu fáa størri ognarlut í læringini og taka lut í einum rættiligum samstarvi, tí móttakarin í samskiftinum má veruliga fyrihalda seg til tað, ið sagt verður.




© NÁM 2016

# Venjingar til 5. kapittul

## 5.1 • At tosa saman við navnalepum – lærarasíða og nemingasíða

Í venjingini mást tú lurta, áðrenn tú sleppur at tosa. Allir næmingar sleppa upp í part, eisini teir, ið vanliga ikki siga so nógv. Næmingar, ið vanliga hava ilt við at bíða eftir øðrum, verða noyddir at steðga eitt sindur á í hesi venjing.

Lærarasíðan lýsir venjingina neyvari. Næmingasíðan verður prentað, og nøvnini á næmingunum verður skrivað á. Leparnir við nøvnum ímynda talutíð í einum kjaki ella viðgerð av onkrum evni.

## 5.2 • At tosa saman við orðalepum – lærarasíða og næmingasíða

Eisini henda venjingin er at lurta, áðrenn tú sleppur at tosa. Venjingin er framhald av venjing 5.1. Nú skulu næmingarnir leggja eitt kort á borðið, um okkurt er, ið teir vilja hava lýst gjøllari. Ella at tikið verður samanum, ella tey eru ósamd í tí, ið sagt verður. Her er umráðandi at gáa fult og heilt um tað, ið hini siga.

Lærarasíðan lýsir venjingina neyvari, meðan kortini á næmingasíðuni eru fyri at bøta um samrøðuna. Vel eitt kort ella fleiri, so næmingarnir kunnu venja førleikar sínar í samskifti. Jú meiri tey venja, jú fleiri kort kunnu tey hava um hendi.

## 5.3 • Skipað lurtivenjing – lærarasíða og næmingasíða

Henda venjingin er fyrst og fremst til tín sum lærara: Vit lærarar tosa nógv – og viðhvørt alt ov nógv! Her skalt tú halda teg innan fyri ásetta talutíð. Venjingin vísir eisini, hvat næmingarnir veruliga hoyra, tá ið tú tosar. Tað er ikki altíð, tey hoyra tað, ið tú heldur tey hoyra.

Lærarasíðan lýsir venjingina neyvari. Næmingasíðan kann verða prentað til allar næmingar, so teir kunnu skriva viðmerkingar á síðuna, meðan lærarin leggur fram.

## 5.4 • At lurta við einum endamáli – lærarasíða og næmingasíða

Henda venjingin fær næmingarnar at verða virknar í framløgum í flokkinum. Tá ið ein bólkur av næmingum leggur fram, fáa øll hini eitt ella fleiri kort av næmingasíðu 5.4. Á kortinum stendur, hvat tey serstakliga skulu geva sær far um í framløguni. Tað ber til at lata uppgávurnar ganga eftir tørni, so ikki øll hava eitt kort hvørja ferð, men tað er eitt gott hugskot at lata allar næmingar hava hvør sítt kort. Nú eru t.d. fýra í flokkinum, ið skulu spyrja bólkin, ið leggur fram, ein spurning í part. Fýra onnur skulu geva eini góð ráð o.s.fr. Á henda hátt kunnu spurningarnir stuðla hvør øðrum. Tað ber sjálvandi til at gera aðrar uppgávur á tómu kortini á síðuni.




© NÁM 2016

## 5.5 • Tvílæring – lærarasíða

Í hesi venjing fáa næmingar fyrimunir av, at teir ikki brúka líka langa tíð um eina uppgávu. Í venjingini fáa næmingarnir møguleika at arbeiða við øðrum næmingum á sama støði og við somu arbeiðsferð. Næmingar mugu ofta bíða eftir øðrum, tí øll skilja ikki uppgávurnar líka skjótt ella arbeiða líka skjótt. Henda venjingin er verulig næmingalagað undirvísing.[11]

11 Íblástur frá Brüning og Saum (2009).




© NÁM 2016

# 5.1 • At tosa saman við navnalepum

lærari

1. Næmingarnir velja hvør sín lut sum “samrøðu-lut” í venjingini (ella teir fáa ein lepa við navni sínum á, sum á nemingasíðu 5.1 niðanfyri).

2. Lærarin sigur eitt evni, sum næmingarnir skulu práta um.

3. Næmingur 1 (ella næmingurin, ið vil byrja) leggur sín samrøðulut (lepa) mitt á borðið og sigur sína hugsan um evnið. Luturin ella lepin ímyndar, at hesin næmingur og bara hann hevur orðið. Næmingurin letur lutin (lepan) verða liggjandi á borðinum, tá ið hann hevur sagt sína hugsan um evnið.

4. Næsti næmingur leggur sín lut mitt á borðið. MINNIST TIL, at áðrenn hann sigur sína hugsan, skal hann stutt endurtaka tað, ið næmingurin frammanundan segði.

5. Hereftir sleppa hinir næmingarnir framat. Ikki fyrr enn allir hava sagt sína hugsan, kunnu næmingarnir taka lutirnar av borðinum, og so kann eitt nýtt umfar byrja.

**Uppskot um evni:**
- Tosið um eitt evni, ið næmingarnir eru upptiknir av
- Ein lisnan tekst
- Ein film, ið øll hava sæð
- Hvat dámar tær allarbest at gera, tá ið tú hevur frí ella frídagar?
- Dagsins evni

**Broyting:**
Næmingarnir kunnu fáa fleiri lepar. So kann hvør næmingur taka orðið so ofta, sum hann hevur lepar til. Tá nýtist næminginum ikki at bíða, til øll hava sagt sína hugsan. Afturfyri kann næmingurin ikki taka lut í kjakinum, tá ið hann hevur brúkt allar sínar lepar. Á henda hátt læra næmingarnir at fara væl um sínar viðmerkingar!



© NÁM 2016

# 5.1 • At tosa saman við navnalepum

næmingur

| | |
|---|---|
| Navn: | Navn: |
| Navn: | Navn: |
| Navn: | Navn: |
| Navn: | Navn: |
| Navn: | Navn: |
| Navn: | Navn: |
| Navn: | Navn: |
| Navn: | Navn: |
| Navn: | Navn: |


© NÁM 2016

# 5.2 • At tosa saman við orðalepum

lærari

Nú ræður um at geva sær far um, hvat hini siga. Í staðin fyri at bróta av og taka orðið, vísir næmingurin við einum ávísum korti, at tað er okkurt, ið hann vil siga. Men hann sigur einki, tí kortið "tosar"! Samrøðan byrjar við, at ein næmingur sigur sína hugsan um evnið (fleiri evni eru nevnd niðanfyri). Næmingakortini eru tøk, so limirnir í bólkinum kunnu taka kort úr og leggja mitt á borðið fyri at fáa ferð á samrøðuna og broyta hana. Er næmingur ikki samdur í tí, ið sagt verður, ella hevur okkurt at viðmerkja, leggur hann viðkomandi kort á borðið. Tann, ið tosar, skal gera, sum stendur á kortinum, t.d. lýsa evnið gjøllari. Tað ber eisini til við einum korti at vísa á, at tú ert samd/ur. Hvør næmingur kann hava fleiri kort um hendi.

**Eg eri samd/ur!**
Legg kortið á borðið, um tú ert samd/ur í tí, ið sagt verður.

**Sum hatta er væl sagt!**
Legg kortið á borðið, um tú vilt rósa onkrum ávísum, ið floksfelagin sigur.

**Kanst tú greiða betur frá?**
Legg kortið á borðið, um tú ikki ert heilt vís/ur í, at tú hevur skilt tað, ið sagt verður.

**Eg eri púra ósamd/ur!**
Kortið verður brúkt at vísa á, at tú ikki ert samd/ur, men uttan at tú leggur upp í prátið hjá tí, ið tosar.

**Kanst tú taka samanum?**
Kortið verður brúkt, um tørvur er á at savna træðrirnar í kjakinum.

**Tóm kort**
Finnið sjálvi upp á tekst til fleiri kort!

**Uppskot um evni:**

- Tosið um eitt evni, ið næmingarnir eru upptiknir av
- Ein lisnan tekst
- Ein film, ið øll hava sæð
- Hvat dámar tær allarbest at gera, tá ið tú hevur frí ella frídagar?
- Dagsins evni



© NÁM 2016

## 5.2 • At tosa saman við orðalepum




| | |
|---|---|
| Eg eri samd/ur!  | Eg eri samd/ur!  |
| Sum hatta er væl sagt!  | Sum hatta er væl sagt!  |
| Kanst tú greiða betur frá?   | Kanst tú greiða betur frá?   |
| Eg eri púra ósamd/ur!  | Eg eri púra ósamd/ur!  |
| Kanst tú taka samanum? 1+1+1=3 | Kanst tú taka samanum? 1+1+1=3 |
| | |
| | |



Samvirkisnám og floksleiðsla
© NÁM 2016

# 5.3 • Skipað lurtivenjing

lærari

Henda venjing leggur dent á, hví næmingarnir skulu lurta eftir tær. Lærarar tosa ov nógv, og mangan vita næmingarnir ikki, hví teir skulu lurta, ella hvat teir skulu brúka tað til, ið teir hoyra.

Fyrireika eitt evni, sum tú plagar. Kanska tú byrjar við einari stuttari kunning um evnið, og tá er tað tú, ið helst tosar mest.

Sig næmingunum, hvussu langa tíð teir uml. skulu lurta eftir tær, og hvat teir serstakliga skulu geva sær far um.

Næmingarnir skulu hava hvør sína næmingasíðu 5.3, so teir kunnu skriva mest týðandi stikkorð ella tekna tey. Byrja so at tosa og minst til at steðga sum avtalað, t.d. tá ið tú hevur tosað í 15 minuttir.

Meðan tú tosar, gera næmingarnir lurtiuppgávu 5.3, sum teir aftaná skulu tosa við ein makkara um.

Eftir venjingina kunnu næmingarnir gera spurnakort, sum teir kunnu arbeiða víðari við í toyminum. Tey kunnu eisini fáa ein tekst útflýggjaðan við somu upplýsingum, sum tú júst hevur greitt frá, ella tit tosa í felag um tað, tey hava hoyrt.

Ið hvussu so er fara næmingarnir helst at lurta hugsavnaðir. Tí nú vita tey veruliga, hví tey skulu lurta eftir tær.

Lurtiuppgávan á komandi síðu kann verða broytt, so hon hóskar til tað, tú greiðir frá, og tað, ið næmingar skulu geva sær far um.

**Uppskot um evni:**

- Lesa upp fyrstu partar í eini skaldsøgu
- Inngangur til eitt nýtt fakligt evni
- Taka samanum eitt gjøgnumgingið evni
- Hava mállæru




© NÁM 2016

# 5.3 • Skipað lurtivenjing

næmingur

Nú skalt tú lurta og brúka sumt í eini uppgávu. Tú skalt lurta og hugsavna teg í 15 minuttir.

Skriva tað týdningarmesta her

Hvørja **vitan** kanst tú knýta at tí, tú hevur hoyrt?

Hvørjar **royndir** hevur tú við tí, tú hevur hoyrt?

Hvat komst tú at hugsa um?

Kunna nú ein floksfelaga um, hvat tú hevur fingið burtur úr tí, tú hoyrdi

Fekk samrøðan við floksfelagan teg at hugsa um okkurt annað?




© NÁM 2016

# 5.4 • At lurta við einum endamáli

lærari

Meðan ein bólkur leggur fram eina verkætlan, fáa hinir næmingarnir eitt kort, sum sigur, hvønn leiklut teir hava undir framløguni.

**Eg havi lært, at:** Næmingurin skal geva sær far um okkurt nýtt og ókent í framløguni.

**Tvey góð øki í framløguni:** Næmingurin skal gáa um tvey øki, sum bólkurin dugdi væl í framløguni. Lærarin hevur frammanundan tosað við næmingarnar um, hvat ein góð framløga er, t.d. at tann, ið leggur fram, hyggur upp á áskoðararnar, tosar hart og týðiliga o.a.

**Eg vil fegin spyrja um:** Næmingurin spyr bólkin ein ella fleiri spurningar eftir framløguna. Okkurt, sum hann vil hava lýst gjøllari.

**Eini góð ráð:** Eftir framløguna gevur næmingurin bólkinum eini góð ráð. Samanber við krøvini hjá læraranum til eina góða framløgu.

**Broyting:**
Næmingarnir kunnu býta um kort eftir eina framløgu. Kortini kunnu verða løgd í ein bunka, og so taka næmingarnir hvør sítt kort fyri at fáa nýggjan leiklut.




© NÁM 2016

# 5.4 • At lurta við einum endamáli

næmingur

| | |
|---|---|
| Eg havi lært, at | Eg havi lært, at |
| Tvey góð øki í framløguni | Tvey góð øki í framløguni |
| Eg vil fegin spyrja um | Eg vil fegin spyrja um |
| Eini góð ráð | Eini góð ráð |
| | |




© NÁM 2016

## 5.5 • Tvílæring

lærari

Uppgávurnar kunnu væl vera úr lærubókum.

1. Øll byrja í senn við somu uppgávu og arbeiða hvør sær.

2. Tá ið ein næmingur hevur gjørt 1. uppgávu, reisir hann seg og rættir ein fingur upp. Tað er umráðandi, at næmingarnir kunnu greiða frá tí, teir hava gjørt. Somuleiðis at tey hava hugsað gjølla um, hvussu uppgávan skal verða gjørd, so tey kunnu skifta orð um tað við ein floksfelaga.

3. Tveir næmingar, sum eru lidnir við fyrstu uppgávu, finna saman og fara ígjøgnum uppgávuna saman. Tað er ikki nóg mikið at staðfesta, at úrslitið er tað sama. Tey skulu eisini greiða hvør øðrum frá, hvussu tey eru komin fram til tað.

4. Tá ið næmingarnir eru vorðnir samdir, seta teir seg aftur og gera næstu uppgávu hvør sær.

5. Tá ið næsta uppgáva er gjørd, verður sama framferð endurtikin. Men nú skal næmingurin rætta tveir fingrar upp sum tekin um, at hann hevur gjørt aðru uppgávu. Næmingurin má ikki arbeiða við sama makkara aftur.

6. Tá ið næmingarnir hava gjørt tvær uppgávur saman við øðrum, kunnu teir gera komandi uppgávur einsamallir.

7. Lat næmingarnar fáa stundir at eftirmeta bæði arbeiðið og avrikið hjá sær.

**Broyting:**
Flokkurin fær tvær ymiskar uppgávur um sama evni. Næmingarnir skulu nú finna saman við einum, ið hevur eina aðra uppgávu, enn teir sjálvir hava. Soleiðis mugu tey lurta meiri hugsavnað eftir tí, ið sagt verður.

Tað er umráðandi, at næmingarnir verða gjørdir varir við:

- At arbeiða skjótt er ikki neyðturviliga ein fyrimunur
- At tosa spakuliga er ógvuliga umráðandi
- Øll SKULU reisa seg. Annars verður kanska bara arbeitt saman við síðumanninum
- Næmingarnir skulu brúka tíðina til at lurta og spyrja onnur um evnið




© NÁM 2016

# 6

## Sosialir førleikar hjá næmingunum


© NÁM 2016

Hesin kapittulin leggur dent á sosialar førleikar hjá næmingunum. Tá ið flokkurin arbeiðir við samvirkisnámi, kemur nógv meiri fram í ljósið. Eitt nú, hvør aldri sigur nakað, og hvør hevur ilt við at ganga runt í flokkinum uttan at gera ónáðir. Vit kunnu ikki bara vænta ella taka sum givið, at næmingarnir hava hesar førleikar, tá ið teir koma í skúla. Tað má arbeiðast ógvuliga ítøkiliga við teimum.

## Hvat vænta vit av næmingunum?

Flestu lærarar síggja alt fyri eitt jalig úrslit av at arbeiða við samvirkisnámi í lærugreinum. Næmingarnir fáa nógv meiri talutíð, teir taka meiri lut í undirvísingini og brúka kroppin, meðan teir læra. Men tá ið um ræður sosialar førleikar hjá næmingunum, er ofta øðrvísi.

Tað er so at siga eingin, ið mótmælir, at tað er tørvur á sosialum førleikum. Men tað eru ofta vantandi sosialir førleikar, ið elva til trupulleikar, tá ið lærarar byrja við samvirkisnámi í undirvísingini. Ávísir sosialir førleikar krevjast fyri at kunna vera við í venjingum við samvirkisnámi.

Latið okkum taka eitt dømi: Næmingarnir arbeiða saman tveir og tveir. Tey skulu “tøma” eina mynd fyri orð, t.e. nevna alt tað, tey síggja á myndini við nógvum smálutum.

Fyri at fáa fram eitt jaligt samband millum næmingarnar, skulu teir skiftast um at siga hvør sítt orð, sum hin so skrivar á eitt felags pappír. Tey fáa tríggjar minuttir íalt og skulu skriva so nógv orð, sum til ber. Venjingin verður nærum sum ein kapping. Tey verða spentari og spentari og kýta seg at fáa so nógv orð niður á pappírið.

Flestu næmingar halda venjingina vera stuttliga og arbeiða við lív og sál við málinum. Men slík venjing krevur veruliga nógv av næmingunum. Ja, krøvini kunnu lættliga fylla ein langan lista.

Tey skulu:

- Lurta
- Bíða eftir tørni
- Góðtaka svar hjá øðrum
- Hugsavna seg
- Tosa lágmælt, so hini í flokkinum ikki verða órógvað
- Vilja arbeiða við uppgávuni
- Geva frá sær

Og óivað eru nógv krøv aftrat ... Er so bara ein næmingur, ið ikki kann lúka hesi krøv, verður tað ein avbjóðandi støða. Spurningurin er so bara: Hvør skal gera tað?




© NÁM 2016

Summir lærarar halda, at tað er uppgávan hjá skúlanum í samstarvi við foreldrini. Aðrir siga, at tað eru foreldrini og bara tey, ið eiga at læra børnini sosialar førleikar. Tekur tú undir við seinna sjónarmiðinum, verður tað veruliga trupult, kanska ómøguligt, at arbeiða við samvirkisnámi. Tí í øllum flokkum eru næmingar, sum ikki hava førleikarnar, ið vit sóknast eftir.

Úrslitið verður kanska:

- At nógv verður skeldað
- Næmingar verða útihýstir
- Eg fari ongantíð aftur at royna samvirkisnám í hasum flokkinum!
- Ein ørkymlaður lærari og ørkymlaðir næmingar

Øllum hesum slepst undan, um lærarin í staðin ger sær greitt, hvat hann veruliga biður næmingarnar gera. Lærarin kann t.d. ímynda sær eina venjing frá byrjan til enda og so gera eitt yvirlit yvir førleikar, sum hann fegin vil, at næmingar hava. So skal arbeiðast tilvitað við hesum førleikum, so allir næmingar kunnu náa málinum.

## Set tær høg mál

Hvussu fegin vit enn vildu brúkt alla tíðina til fakliga undirvísing, so er tað tó ein ovurstór uppgáva hjá læraranum at náa endamálsorðingini í fólkaskúlalógini. Har verður dentur lagdur á, at fólkaskúlin í samstarvi við foreldrini skal "stuðla tí einstaka næminginum í fjølbroyttu, persónligu menningini".

Vit skulu als ikki arbeiða soleiðis við tí sosiala, at tað fakliga líður undir tí. Heldur skulu vit arbeiða við sosialum førleikum, samstundis sum vit leggja dent á faklig mál hjá næmingunum.

Hvussu mangan hava vit ikki verið samd um, at tað ber ikki til at fáa nakað fakligt við, um høvdini á næmingunum eru fylt við óloystum sosialum trupulleikum?

Vit kundu saktans ynskt okkum at brúkt minni tíð til at uppala, sosialisera, ella hvat vit kalla tað. Men veruleikin er, at vit sum lærarar mugu seta okkum høg mál fyri tað, vit vænta av næmingunum. Málini skulu bara vera so greið, at næmingarnir vita, hvat vit vænta av teimum.

Ein floksleiðari er greiður, tá ið hann ger greitt fyri øllum, at her í mínum flokki (ella í okkara toymi ella okkara skúla) vænta vit hetta og hatta. So nýtist okkum ikki at døma næmingar, sum ikki enn hava førleikarnar. Tað er jú tað, tey skulu læra í skúlanum. Á sama hátt vænta vit jú ikki, at tey kunnu lesa, tá ið tey fyrsta dagin koma í skúla, ella kunnu tosa enskt, áðrenn tey hava havt fyrsta tíman í enskum. Summi læra skjótari enn onnur, bæði á tí fakliga og sosiala økinum.


© NÁM 2016

Næmingarnir vilja helst vita, hvat vit vænta av teimum. Tað er eisini so, at vænta vit nógv av næmingunum, so avrika teir nógv meiri. Margit Weidner hevur í bók síni *Kooperativ læring i undervisningen* (2012) dømi um, hvussu tú kanst arbeiða við sosialu læringsmiðstøðini í flokkinum.

Venda vit aftur til venjingina frammanfyri, um at tøma eina mynd fyri orð, var ein førleiki á listanum, at næmingarnir skuldu lurta hvør eftir øðrum. Men hvat er tað at lurta, um tú gongur í 2. flokki? Í 5. flokki? Ella í 9. flokki? Tað er als ikki sami týdningur, ið næmingar á ymsum floksstigum knýta at tí "at lurta". Helst er tað eisini heilt annar týdningur enn tað, vit hugsa um. Tí mugu vit hava tankarnar hjá næmingunum fram í ljósið! Venjing 6.1 fær næmingarnar at seta orð á, hvat tað er at lurta, og orðini kunnu í venjing 6.2 verða førleikamál hjá næmingunum.

Nú er helst lættari hjá næmingunum at finna fram til, hvat lærarin veruliga væntar, tá ið teir skulu lurta. Fyri at vita um næmingarnir eisini duga at lurta, mást tú eftirmeta sosiala førleikan á jøvnum føti við fakligu málini í undirvísingini.

Tað ber til at leggja dent á faklig mál, samstundis sum næmingarnir arbeiða fram móti settum sosialum málum. Tú kanst jú væl hava eitt munnligt mál fyri samskiftið í undirvísingini, samstundis sum tú leggur dent á, at næmingarnir skulu lurta hvør eftir øðrum.

## Legg dent á tað jaliga

*"Ungdómurin á okkara døgum elskar marglæti. Ungdómurin hevur vána atburð, vanvirðir myndugleika, hevur onga virðing fyri eldri fólkum og tosar, tá ið tey skulu arbeiða. Tey ungu reisa seg heldur ikki upp longur, tá ið eldri fólk koma inn í hølið. Tey siga foreldrunum ímóti, reypa í gildum, kulka dessertina í seg við borðið, krosskasta beinini og fara illa við lærarunum."*

Sokrates uml. 400 f.o.t.

Helst munnu flestu vaksin halda, at ungdómurin er nógv ramligari í munninum, enn tey sjálv vóru sum ung. Prátingarlagið er harðligari, og atburðurin er alt annað enn tað, tú kanst ynskja tær. Men er tað so bara eitt ættarlið á muni? Ella eru tað børn, ið líða undir harðligum tónalagi? Halda vit, at tað seinasta nevnda er galdandi, mugu vit gera okkurt við tað! Vit kunnu t.d. royna miðvíst at geva viðurkenning. Bæði børn og vaksin kunnu hava ilt við at geva viðurkenning, og at fáa viðurkenning kann vera minst líka so trupult. Hvat sigur tú við ein floksfelaga, sum tú fegin vilt geva eina viðurkenning ella rósa? Venjingarnar 6.3 og 6.4 hjálpa næmingunum við hesum. Venjing 6.3 leggur dent á okkurt gott, ið tú kanst siga við ein floksfelaga. Antin ein felaga, tú kennir rættiliga væl, ella ein, tú ikki kennir so væl.

Tá ið flokkurin hevur gjørt sær ein langan lista, eina orðabók, við viðurkennandi orðum, fáa tey eitt hefti við navninum: "Eg sigi gott um teg – tað gleðir meg" (sí venjing 6.4). Her verður dagsins viðurkenning skrivað, hvønn tú segði tað við, og hvussu viðkomandi tók tað.


© NÁM 2016

## Fatan av eini støðu

Dugir tú at fata eina støðu, er tað ein góð hjálp hjá tær. Tað er umráðandi at læra næmingarnar, at ymisk fólk og ymsar støður krevja ymsan atburð av okkum. Tá ið næmingarnir skulu læra hetta, er tað best at lata teir venja støður, sum veruliga kunnu koma fyri. Venjing 6.5 er um at fata eina støðu.

Tað er umráðandi hjá næmingunum at vita, hvat vit vænta av teimum. Eru tey ikki greið yvir tað, hava tey ilt við at vita, nær tey eru komin á mál. Sum nevnt frammanundan er ógvuliga týdningarmikið, at næmingarnir kenna dagsskránna í skúlanum. Tí tað er trupult at liva upp til okkurt, tú einki veitst um. Nógvir næmingar klára uppgávuna kortini, tí teir kunnu fata eina støðu og sýna hóskandi atburð hóast ávísan ruðuleika. Men næmingar, ið hava tað bara eitt lítið sindur trupult í einari óskipaðari støðu og ikki eru greiðir yvir, hvat vit vænta, teir kunnu lættliga fáa óneyðugar avbjóðingar av, at vit eru "ógreið".



Samvirkisnám og floksleiðsla
© NÁM 2016

# Venjingar til 6. kapittul

## 6.1 • Hin góði lurtarin – lærarasíða og næmingasíða

Í hesi venjingini leggja vit dent á, hvat tað vil siga at vera ein góður lurtari. Hvat hugsar næmingurin um, tá ið tú sigur, at teir skulu lurta hvør eftir øðrum?

## 6.2 • Eg sigi, og eg geri – lærarasíða og næmingasíða

Í hesi venjingini taka vit afturíaftur orðini, ið næmingarnir hava skrivað í venjing 6.1. Næmingarnir skriva orðini í talvuna og flokka tey í: Tað, tú sigur, og tað, tú gert. Annar møguleiki er, at lærarin skrivar orðini beinleiðis í talvur á kartong til at heingja upp í flokkinum. Tá ið næmingarnir eru við at orða, hvat verður væntað í ávísum støðum, fáa teir ognarlut í arbeiðinum við tí. Samstundis verður lættari hjá næmingum við serligum avbjóðingum at bera seg "rætt" at í flokkinum.[12]

## 6.3 • Viðurkenn – lærarasíða og næmingasíða

Tað er deiligt at fáa viðurkenning. Nøkur eru ógvuliga røsk at viðurkenna, onnur halda tað vera heldur torført at siga slíkt. Nøkur duga eisini væl at taka ímóti viðurkenning, og onnur verða smæðin ella kenna seg illa. Í hesi venjing skulu næmingarnir finna upp á nógv ymiskt at siga við ein floksfelaga. Tað skulu vera setningar ella støk orð at siga við ein, tey kenna rættiliga væl, og við ein, tey ikki kenna so væl.

## 6.4 • Eg sigi gott um teg – tað gleðir meg – lærarasíða og næmingasíða

Tá ið flokkurin hevur skrivað ein langan lista við viðurkenningum og øðrum góðum at siga við hvør annan, fáa tey næmingasíðuna til hesa venjing. Her skriva tey dagsins viðurkenning, hvønn tey søgdu hana við, og hvussu viðkomandi tók tað. Dentur verður soleiðis lagdur á at geva øðrum okkurt og ikki á tað, tey sjálv fáa. Lærarin kann eisini biðja næmingarnar skriva, hvør hevur sagt okkurt gott við teir.

## 6.5 • At fata eina støðu – lærarasíða og næmingasíða

Næmingarnir koma dagliga í nógvar ymsar støður, har tað verður væntað, at teir vísa ein ávísan atburð. Í hesi venjing spæla tey ymsar smáar støður fyri toyminum. Tað gevur teimum møguleika at venja seg við, hvussu tey skulu bera seg at.

12 Íblástur frá Weidner (2010).



© NÁM 2016

# 6.1 • Hin góði lurtarin

lærari

Henda venjing er um, hvussu næmingarnir halda tað vera at lurta. Tað er ikki vist, at tað hevur sama týdning fyri teg, sum tað hevur fyri næmingarnar.

Næmingarnir fáa næmingasíðu 6.1 og skulu saman við toyminum skriva eitt tankakort við orðum, ið lýsa tað at lurta.

Tá ið toymini hava skrivað síðuna, verða orðini tikin ígjøgnum á talvuni. Síðan gera næmingarnir í felag næmingasíðu 6.2, har orðini skulu bólkast í "tað, tú gert" og "tað, tú sigur".

Tað er ikki bara tann sosiali førleikin "at lurta", ið egnar seg til hesa venjing. Tú kanst brúka allar førleikar, sum tú fegin vilt venja við næmingunum, t.d.:

- At taka bøkur úr skuffuni ella kassanum
- At vera ein góður vinur
- At heilsa
- At handfara ósemjur
- At sýna ábyrgd


© NÁM 2016

## 6.1 • Hin góði lurtarin

næmingur





© NÁM 2016

## 6.2 • Eg sigi, og eg geri

lærari

Í hesi venjingini arbeiða næmingarnir víðari við orðunum, teir skrivaðu í venjing 6.1.

Orðini skulu verða bólkað í tveir kassar, so munur verður gjørdur á tí, tú sigur, og tí, tú gert, tá ið næmingurin skal vera ein góður lurtari. Tú kanst eisini velja at leggja dent á annan sosialan førleika.

Tá ið næmingarnir hava skrivað orðini í kassarnar, skulu gerast stórar talvur at heingja upp í flokkinum, so næmingarnir síggja týðiliga, hvat væntað verður av teimum.

Nú hava næmingarnir sjálvir verið við at seta orð á, hvat skal til fyri at náa málinum. Soleiðis verður tað lættari hjá teimum at megna tað.


© NÁM 2016

# 6.2 • Eg sigi, og eg geri

næmingur

| Eg sigi | Eg geri |
|---|---|
| | |




© NÁM 2016

# 6.3 • Viðurkenn

lærari

Í hesi venjingini skulu næmingarnir finna upp á so nógvar ymsar viðurkenningar at siga við ein floksfelaga. Tað skulu bæði vera setningar og støk orð, og tey skulu kunna siga tað við ein floksfelaga, tey kenna rættiliga væl, og við ein, tey ikki kenna væl.

1. Næmingarnir eru tveir og tveir saman. Tey hugsa seg um í tríggjar minuttir.
2. Tey arbeiða hvør sær og skriva ella tekna tað, ið tey ætla at siga.
3. Tá ið tíðin er farin, siga tey makkaranum, hvat tey hava skrivað ella teknað.
4. Nú skulu tey siga toyminum frá, hvat tey hava skrivað ella teknað. Kanska kunnu tey í felag finna fleiri góð orð?

Lærarin tekur samanum á talvuni, og saman við flokkinum verður gjørdur ein langur listi við uppskotunum úr flokkinum.

**Broyting:**
Tað ber eisini til at lata næmingarnar skriva uppskotini á post it-lepar. Leparnir verða lagdir mitt á borðið. Næmingarnir skulu nú fylgja við, hvat verður sagt í hinum bólkunum, og taka lepan, ið teir hava skrivað júst tað sama á. Soleiðis verða allir næmingarnir við í eini felags gjøgnumgongd.




© NÁM 2016

# 6.3 • Viðurkenn

næmingur

Finn so nógv gott, sum til ber, at siga við ein floksfelaga. Bæði setningar og støk orð, ið tú kanst siga við ein, tú kennir rættiliga væl, og við ein, tú ikki kennir so væl.

**Tú ert ...**

**Tú gert ...**

**Tú kanst ...**

**Tú ...**




© NÁM 2016

# 6.4 • Eg sigi gott um teg – tað gleðir meg

lærari

Í venjing 6.3 hevur flokkurin í felag gjørt listan við viðurkenningum. Nøvnini á øllum næmingum í flokkinum verða skrivað á smáar lepar, eitt navn á hvønn lepa.

Hvønn dag ella eina ferð um vikuna, tað gert tú av, taka allir næmingar hvør sín lepa við navni á einum floksfelaga, sum teir skulu siga okkurt gott um.

Dagurin endar við, at næmingarnir taka fram síðuna “Eg sigi gott um teg – tað gleðir meg” og skriva:

**Hvønn** tey søgdu okkurt gott við.

**Hvat** tey søgdu.

**Hvussu** hini tóku tað.

**Hvussu** tað var at siga tað.

**Broyting:**
Tað ber eisini til at leggja aftrat: **Hvør** segði okkurt gott um meg?




© NÁM 2016

# 6.4 • Eg sigi gott um teg – tað gleðir meg

næmingur

Hvønn segði eg okkurt gott við í dag? ______________________________

Hvat segði eg? ______________________________

Hvussu varð tað móttikið? ______________________________

Hvussu var hjá mær at siga tað? ______________________________




© NÁM 2016

# 6.5 • At fata eina støðu

lærari

Henda venjing gevur næmingunum møguleika at royna ymsar støður, har teir skulu brúka evnini at fata eina støðu.

1. Næmingarnir arbeiða í toymum, 3-5 næmingar í hvørjum.
2. Kortini frá næmingasíðu 6.5 liggja í einum bunka mitt á borðinum.
3. Ein úr toyminum tekur eitt kort.
4. Tann, ið situr undir liðini á honum, skal gera tað, ið stendur á kortinum.
5. Toymið tosar síðan um aðrar møguleikar.
6. Lærarin tekur at enda útvaldar støður upp í flokkinum.

**Broyting:**
Næmingarnir kunnu tveir og tveir gera tað, ið stendur á kortinum. Annar ger "tað rætt" og hin øvugt.




© NÁM 2016

# 6.5 • At fata eina støðu

næmingur

| | |
|---|---|
| Eitt vinfólk hevur akkurát fingið nýggjar buksur. Tú heldur tær vera vakrar. Hvat sigur tú við vinfólkið? | Ein nýggjur næmingur er í flokkinum. Hvussu vísir tú honum, at hann er vælkomin? |
| Tú sært, at ein floksfelagi, ið tú vanliga ikki tosar nógv við, er harmur um okkurt. Hvussu spyrt tú, um tað er nakað, ið tú kanst hjálpa honum við? | Hvussu nógvir ymsir mátar eru at siga góðan dagin við læraran? |
| Hvussu nógvir ymsir mátar eru at siga góðan dagin við ein floksfelaga? | Hvussu nógvir ymsir mátar eru at siga góðan dagin við ommu og abba? |
| Nevn minst tríggjar mátar, har tú takkar einum fremmandum fyri hjálpina. | Tú ert í einum handli, men finnur ikki vøruna. Hvussu biður tú tey í handlinum hjálpa tær? |
| Ein floksfelagi hevur í vikuskiftinum vunnið meistaraheitið í eini ítróttagrein. Nevn minst trý dømi um, hvussu tú kanst rósa honum. | Hvussu kanst tú siga frá, tá ið flokkurin kjakast, at tú ikki ert samd/ur í tí, tey siga? |
| Hvat sigur tú við ein floksfelaga, sum hevur mist ein kæran, ið hevði stóran týdning fyri hann? (T.d. mist ein abba ella ommu.) | Ein av floksfeløgunum vil fegin hava teg at skulka frá síðsta tíma saman við sær. Hvussu sigur tú nei? |
| Hvussu kanst tú hampiliga biðja ein floksfelaga um at gera meiri í bólkaarbeiðinum? | Tú vilt fegin siga besta vinfólki tínum, at tú virðismetir vinalagið við hana/hann. Hvussu gert tú tað? |
| Tú skalt klaga um eina vøru í handlinum. Vøran er brotin. Hvussu gert tú? | Tú hevur júst fingið vánaligt próvtal fyri eina uppgávu. Makkarin við síðuna av hevur fingið 10. Hvussu tekur tú tað? |
| Eitt vinfólk hevur akkurát fingið troyggjuna, ið tú leingi hevur droymt um, men ikki hevur havt ráð at keypa. Hvat sigur tú við vinfólkið? | Sig frá, hvussu tú einaferð gleddi eitt annað menniskja. |
| Nær hevur tú seinast roynt at hjálpa einum, ið ikki bað um hjálp frá tær? Hvat segði viðkomandi, tá ið tú vildi hjálpa? | Nevn tríggjar mátar at takka uppá, men uttan at siga orðið “takk”. |




© NÁM 2016

# 7

# Foreldrasamstarv


© NÁM 2016

Nú koma foreldrini inn í myndina. Foreldur eru eitt stórt tilfeingi, sum kann verða brúkt betur og øðrvísi, enn gjørt verður í dag. Mong foreldur vilja fegin verða ein størri partur av skúladegnum hjá barninum, men tey vita ikki rættiliga, hvat vit vænta av teimum. Í hesum kapitli eru ítøkilig hugskot at brúka á foreldrafundum.

## Hvat væntar skúlin av foreldrunum?

Mong foreldur ivast í, hvat skúlin væntar av teimum. Kunnu tey t.d. blanda seg í dagligu undirvísingina? Skulu tey hjálpa til á ymsum ferðum? Kunnu tey koma at vitja í skúlatíð uttan at siga frá frammanundan? Er tað í lagi at ringja til ein lærara um kvøldið?

Kanska eru lærarar heldur ikki vísir í, hvat teir skulu kunna foreldur um. Er tað t.d. neyðugt at taka ársætlanina ígjøgnum á foreldrafundi? Er tað lærarin, ið skal undirhalda í tveir tímar um flokkin og fakligu menningina? Kanst tú biðja foreldrini hjálpa til við ymsum praktiskum?

Danska verkætlanin um skúlamenning, For-di, er um góða samstarvið millum skúla og heim. Her er ein niðurstøða, at foreldrini ynskja í stóran mun at vera við í læring og trivnaði hjá barninum. Tey vita bara ikki nóg nógv um, hvussu skúlin vil hava teirra leiklut at vera.[13]

Hjá øllum børnum eru foreldrini ein týðandi viðleikari í læring og skúlagongd, men foreldrini skulu jú vera greið yvir, hvat vit vænta av teimum.

## Foreldrafundurin

Tað ber altíð til at seta skjøtul á samstarvið á einum foreldrafundi, og ofta eru fundirnir langir. Foreldrini koma við tí í væntu, at tey skulu "verða undirhildin" í tveir tímar, og lærararnir "undirhalda" fegnir.

Ymisk evni eru á skránni í mun til aldur og floksstig hjá barninum. Í yngru flokkunum er tað ofta atburður, føðingardagar e.t., men tá ið næmingarnir verða eldri, verða evnini broytt til rúsdrekka, veitslur o.t.

Felags fyri fundirnar er, at ein stórur partur av tíðini fer til fakligu gjøgnumgongdina av eitt nú ársætlan og innihaldinum í lærugreinum. Tað er tó ikki altíð tað, ið foreldrini vilja verða kunnað um. Veit lærarin, hví hann hevur valt at gera soleiðis í eini lærugrein, so hava flestu foreldur álit á tí. Í staðin kunnu vit fáa lívligari foreldrafundir, har foreldrini koma á banan. Her eru nøkur hugskot, ið kunnu gera fundir meiri viðkomandi og spennandi:

- Foreldrini **arbeiða við** onkrum fakligum, í staðin fyri at **hoyra um** tað.

- Næmingarnir undirvísa foreldrunum í ymsum verkstøðum.

13 *Verkætlanin, For-di-projektet – Forældredialog i skolen, er eitt samstarv millum UCC, UCL og Skole og Forældre. Les meiri á www.for-di.dk*



© NÁM 2016

- Øll gera mat í felag og eta saman.

- Foreldrini hava skúlataskuna hjá barninum við og skulu t.d. arbeiða við støddfrøði. Tá uppliva foreldrini eina læringarstøðu, og eisini um taskan ikki er pakkað heimanífrá[14]

- Næmingar og foreldur gera á felagsfundi eina logbók, har hvør familja fortelur eitt sindur um seg. Teksturin, saman við eini mynd, verður avritaður til børnini, so familjurnar á tann hátt læra hvørja aðra at kenna.[15]

- Foreldrini arbeiða við tí sama sum næmingarnir, eisini við venjingum við samvirkisnámi. Foreldrini skulu leggja dent á tað, tey eru mest upptikin av í sambandi við skúlagongdina hjá barninum.

Í venjingunum 7.1 – 7.4 eru uppskot um ymsar venjingar við samvirkisnámi at brúka á foreldra-fundum.

## Foreldrasamstarv og floksleiðsla

Lærarin er ikki bara floksleiðari hjá næmingunum. Hann er eisini floksleiðari hjá foreldrunum. Foreldrini hava í líka stóran mun sum næmingarnir brúk fyri at vera partur av einum felagsskapi. At taka lut á ymsum tiltøkum nýtist ikki at krevja nógva tíð av foreldrunum, men tað er umráðandi fyri læringina hjá barninum og uppfatanina av felagsskapi, at eisini mamman og pápin taka lut í tí, sum hendir í flokkinum.

Í yngru flokkunum kenna foreldrini vanliga hvønn annan, og tað er lættari at fylgja við í, hvat hendir rundan um barnið. Tá ið børnini verða eldri, hendir nógv, sum foreldrini ikki beinleiðis eru blandað uppí. Kenna foreldrini hvønn annan, er hetta skiftið kanska ikki so trupult. Men mong børn fáa nýggjar floksfelagar og nýggjar lærarar, tá ið tey koma í miðdeild og seinni í framhaldsskúla, og tí mugu eisini foreldrini sjóðast saman í hesum deildum.

Ein slík samansjóðing kann verða gjørd á ymsan hátt, t.d. kann samvirkisnám vera við at skapa ein tryggan dám, har tað ber til at viðgera ymisk evni saman við øðrum foreldrum í flokkinum. Hjá nógvum kann talan eisini vera um rættiliga kensluborin evni.

Arbeiða skúli og lærarar við umfatandi uppgávuni at fáa inklusiónina at eydnast, eru foreldrini eitt stórt tilfeingi og kundu komið við einum størri íkasti, enn galdandi er í dag.

14 *www.for-di.dk > Idekatalog*
15 *Íblástur frá Kofoed (2010).*



© NÁM 2016

## Stuðla samvirkisnámi

Fær lærarin stuðul frá foreldrunum, hevur tað ómetaliga stóran týdning. Tað er tí gott hugskot at kunna foreldrini í góðari tíð frammanundan um, hvat fyriferst í flokkinum. Sjálvandi eru næmingar og foreldur, ið halda tað vera rættiliga nógv øðrvísi, tá ið næmingarnir fara at arbeiða við samvirkisnámi. Tað kann eisini væl vera, at summi halda tað als ikki vera stuttligt. Tá er gott at hava kunnað foreldrini um broytingarnar í undirvísingini, og enn betri, um foreldrini hava roynt okkurt av tí, ið næmingarnir arbeiða við.

Í samvirkisnámi fáa næmingarnir ofta ymsar leiklutir í venjingunum, og teir kunnu koma heim og siga, at í dag hava teir havt tann og tann leiklutin. Tá er lættari at greiða foreldrunum frá og eisini lættari hjá foreldrunum at spyrja læraran, um foreldrini sjálvi hava roynt slíkt tilfar.




© NÁM 2016

# Venjingar til 7. kapittul

## 7.1 • Stuttur fundur – miðdeild – lærarasíða og foreldrasíða

Henda venjingin er ætlað foreldrum at børnum í miðdeild. Foreldrini fáa høvi at tosa við onnur foreldur og skulu gera stutt av. Tey ganga øll runt í stovuni og tosa stutt við øll, tey hitta. Spurningarnir frá foreldrunum gera av, hvat samrøðan er um. Lærarin kann eisini gera fleiri spurningar, um tað er okkurt ávíst, hann kundi hugsað sær, at foreldrini tóku støðu til.[16]

## 7.2 • Stuttur fundur – framhaldsdeild – lærarasíða og foreldrasíða

Henda venjingin er ætlað foreldrum at børnum í framhaldsdeild. Foreldrini fáa høvi at tosa við onnur foreldur og skulu gera stutt av. Tey ganga øll runt í stovuni og tosa stutt við øll, tey hitta. Spurningarnir frá foreldrunum gera av, hvat samrøðan er um. Lærarin kann eisini gera fleiri spurningar, um okkurt ávíst er, hann kundi hugsað sær, at foreldrini tóku støðu til.

## 7.3 • Hvørjum kunnu vit stuðla við? – lærarasíða

Henda venjingin miðar ímóti at fáa hugskot frá foreldrunum um alt tað, tey kunnu stuðla við í skúlanum. Foreldrini ivast mangan í, hvat skúlin væntar, og hvat teirra leiklutur er. Her koma mong, góð hugskot fram.[17]

## 7.4 • Hvat heldur tú? – lærarasíða

Venjingin miðar ímóti, at øll siga sína hugsan. Øll skulu vera við og taka støðu og grundgeva fyri sínum hugburði. Her skalt tú bæði flyta teg frá einum staði til annað og siga tína hugsan, og tað er meiri bindandi, enn um tú bara hevur ein hugburð, sum tú kanska ikki tosar um.[18]

---

16 *Íblástur frá Bjerring og Lindén (2008).*
17 *Íblástur frá Bjerring og Lindén (2008).*
18 *Íblástur frá Bjerring og Lindén (2008).*



© NÁM 2016

# 7.1 • Stuttur fundur – miðdeild

lærari

Í venjingini sleppa øll foreldur framat.

1. Foreldrini fáa hvør sítt kort.

2. Tey fara til gongu og hitta eini onnur foreldur.

3. Tey bæði, ið hittast, spyrja hvørt annað spurningar á kortunum og tosa um spurningarnar.

4. Eftir "ein stuttan fund" fara tey víðari og finna ein nýggjan makkara at tosa við. Foreldrini kunnu hava sama kort undir allari venjingini, ella tey býta um kort eftir hvønn "fund".

5. Lærarin hevur frammanundan sagt, at venjingin varir í t.d. 15 minuttir. Tá ið klokkan ringir, endar venjingin.

6. Tá ið øll eru sessað aftur, verður tikið saman um mest áhugaverdu spurningarnar.

**Broyting:**
Foreldrini sita í smáum bólkum, sum lærarin hevur gjørt frammanundan. Tað er best at blanda foreldrini væl.

Kortini liggja í einum bunka á borðinum. Foreldrini skiftast um at taka eitt kort. Sum tey sita við borðið, skiftast tey eisini um at svara spurningunum.

Í hesi venjingini fáa foreldrini betri stundir at fara í dýpdina við spurningum, ið tey halda hava stóran týdning.




© NÁM 2016

# 7.1 • Stuttur fundur – miðdeild

foreldur

| | |
|---|---|
| Hvussu kunnu vit sum foreldur vera við at gera flokkin til ein góðan flokk fyri øll? | Hvussu ofta lesur tú hart fyri/saman við barni tínum? |
| Hevur tú áhuga í at sita í foreldraráðnum í flokkinum? | Heldur tú, at tú fært nóg stóra kunning úr skúlanum? |
| Hvussu nógv skulu børnini lata hvørjum øðrum í føðingardagsgávu? | Skulu børnini bjóða øllum flokkinum í føðingar-dag? |
| Smyrt tú matpakkan hjá barninum? | Kundi tú hugsað tær at verið “gestalærari” í flokkinum? |
| Hvussu nógv hevur tað at siga fyri teg, at tú kanst fyrireika teg frammanundan til skúla-heim- samrøður, t.d. við einum samrøðublaði? | Heldur tú, at tað er týdningarmikið at vita, hvat næmingarnir arbeiða við í lærugreinunum? |
| Hvønn leiklut hevur tú yvir fyri hinum børnunum í flokkinum? | Eiga lærararnir at taka lut í tiltøkum, sum foreldur skipa fyri? |
| Skulu vit sum foreldur seta okkum í samband við hvønn annan, um vit finna fram til, at tað eru børn, ið ikki trívast? | Heilsar tú upp á aðrar næmingar í flokkinum, tá ið tú hittir teir í skúlanum ella í frítíðini? |
| Nær fer barn títt til songar um kvøldið? | Hugsar tú um, hvussu tú tosar um skúlan, lærarar og hinar næmingarnar, tá ið barnið hoyrir? |




© NÁM 2016

| | |
|---|---|
| Hvussu stóra ábyrgd heldur tú, at foreldrini hava fyri at uppala børnini til felagsskap? | Hvat kunnu foreldrini brúka skúlastýrið til? |
| Heldur tú, at foreldrini (t.d. foreldraráðið) skulu vera við at gera dagsskránna til foreldrafund? | Eru trupulleikar í flokkinum, t.d. við ófriði ella trivnaði, er tað so umráðandi fyri teg, at tað verður ein eykafundur? |
| Hevur tú ábyrgd av, at hini foreldrini møta á fundi og til tiltøk í flokkinum? | Hevur tú sum foreldur ábyrgd av, at inklusiónin eydnast í flokkinum, t.d. við at bjóða øllum nemingunum heim til tykkara ella at hjálpa til, so allir næmingar koma við á útferð? |
| Heldur tú, at skúlin skal halda veitsludagar hjá ymsum trúarfeløgum? | Skulu vit gera onkur tiltøk, har greitt verður frá ymsum mentanum? |
| Hvat er rímiligt at bjóða flokkinum, tá ið barn títt hevur føðingardag? | Hvat er mest týðandi uppgáva hjá skúlanum og lærarunum í sambandi við happing? |
| Hvussu kunnu foreldrini best hjálpa til at fyri-byrgja happing? | Hvussu vilt tú helst samskifta við lærararnar? Við felagsboðum í foreldrabólkinum á netinum? Telduposti? Telefon? Fundi í skúlanum? |
| Hvat heldur tú um heimaarbeiði? Hvat er rímilig tíð til heimaarbeiði? | Hjálpir tú barninum at minnast ítróttarklæði, bókasavnsbøkur o.tíl.? |
| Er tað rímiligt, at foreldur gjalda fyri tiltøk o.tíl.? | Hvat fæst barn títt mest við beint nú? |
| Hvørji hugskot hevur tú til ein góðan mat-pakka? | Brúkar tú foreldrabólkin á netinum? |



Samvirkisnám og floksleiðsla
© NÁM 2016

# 7.2 • Stuttur fundur – framhaldsdeild

lærari

Í venjingini sleppa øll foreldur framat.

1. Foreldrini fáa hvør sítt kort.

2. Tey fara til gongu og hitta eini onnur foreldur.

3. Tey bæði, ið hittast, spyrja hvørt annað spurningar á kortunum og tosa um spurningarnar.

4. Eftir “ein stuttan fund” fara tey víðari og finna ein nýggjan makkara at tosa við. Foreldrini kunnu hava sama kort undir allari venjingini, ella tey býta um kort eftir hvønn “fund”.

5. Lærarin hevur frammanundan sagt, at venjingin varir í t.d. 15 minuttir. Tá ið klokkan ringir, endar venjingin.

6. Tá ið øll eru sessað aftur, verður tikið saman um mest áhugaverdu spurningarnar.

**Broyting:**
Foreldrini sita í smáum bólkum, sum lærarin hevur gjørt frammanundan. Tað er best at blanda foreldrini væl.

Kortini liggja í einum bunka á borðinum. Foreldrini skiftast at taka eitt kort. Sum tey sita við borðið, skiftast tey eisini at svara spurningum.

Í hesi venjing fáa foreldrini betri stundir at fara í dýpdina við spurningum, ið tey halda hava stóran týdning.


© NÁM 2016

# 7.2 • Stuttur fundur – framhaldsdeild

foreldur

| | |
|---|---|
| Hvussu kunnu vit sum foreldur vera við at gera flokkin til ein góðan flokk fyri øll? | Hvussu ofta gert tú heimaarbeiði saman við barni tínum? |
| Hevur tú áhuga í at sita í foreldraráðnum í flokkinum? | Heldur tú, at tú fært nóg stóra kunning úr skúlanum? |
| Smyrt tú matpakkan hjá barninum? | Syrgir tú fyri, at barnið etur morgunmat? |
| Kundi tú hugsað tær at verið “gestalærari” í flokkinum? | Heldur tú, at tað er týdningarmikið at vita, hvat næmingarnir arbeiða við fakliga? |
| Hvussu nógv hevur tað at siga fyri teg, at tú kanst fyrireika teg frammanundan til skúla-heim- samrøður, t.d. við einum samrøðublaði? | Hvønn leiklut hevur tú hjá hinum børnunum í flokkinum? |
| Eiga lærararnir at taka lut í tiltøkum, sum foreldur skipa fyri? | Skulu vit skipa fyri onkrum fyri børnunum uttan fyri skúlatíð, t.d. floksveitslu, útferð ... ? |
| Hevur tú uppskot um tiltøk fyri flokkin? | Kundi tú hugsað tær at verið saman við hinum foreldrunum, uttan at børnini vóru við? |
| Skulu vit sum foreldur seta okkum í samband við hvørt annað, um vit finna fram til, at tað eru børn, ið ikki trívast, ella annað er á vási? | Nær kunnu tey ungu drekka rúsdrekka? |



Samvirkisnám og floksleiðsla
© NÁM 2016

| | |
|---|---|
| Nær fer barn títt til songar? Blandar tú teg upp í tað? | Heilsar tú upp á aðrar næmingar í flokkinum, tá ið tú hittir teir í skúlanum ella í frítíðini? |
| Hugsar tú um, hvussu tú tosar um skúlan, lærarar og hinar næmingarnar, tá ið barnið hoyrir? | Hvussu stóra ábyrgd heldur tú, at foreldrini hava fyri at uppala børnini til felagsskap? |
| Heldur tú, at foreldrini (t.d. foreldraráðið) skulu vera við at gera skránna til foreldrafundir? | Hvat kunnu foreldrini brúka skúlastýrið til? |
| Eru trupulleikar í flokkinum, t.d. við ófriði ella trivnaði, er tað so umráðandi fyri teg, at tað verður ein eykafundur? | Hevur tú ábyrgd av, at hini foreldrini møta á fundi og til tiltøk í flokkinum? |
| Hevur tú sum foreldur ábyrgd av, at inklusiónin eydnast í flokkinum, t.d. við at bjóða øllum næmingunum heim til tykkara ella at hjálpa til, so allir næmingar koma við á útferð? | Heldur tú, at skúlin skal halda veitsludagar hjá ymsum trúarfeløgum? |
| Skulu vit gera onkur tiltøk, har greitt verður frá ymsum mentanum? | Hjálpir tú barninum at minnast ítróttarklæði, seðlar o.tíl.? |
| Hvat er rímiligt at bjóða flokkinum, tá ið barn títt hevur føðingardag? | Hvussu kunnu foreldrini best hjálpa til at fyribyrgja happing? |
| Hvat er mest týðandi uppgáva hjá skúlanum og lærarunum í sambandi við happing? | Skulu vit foreldur hava felags avtalur um royking, rúsdrekka og veitslur? |
| Hvussu vilt tú helst samskifta við lærararnar? Við felagsboðum í foreldrabólkinum á netinum? Telduposti? Telefon? Fundi í skúlanum? | Er tað rímiligt, at foreldur gjalda fyri tiltøk o.tíl.? |




© NÁM 2016

# 7.3 • Hvørjum kunnu vit stuðla við?

lærari

Í venjingini koma góð hugskot frá øllum foreldrum, og lærarin kann at enda savna saman eitt heilt savn av hugskotum um, hvussu foreldrini kunnu stuðla einum góðum felagsskapi í flokkinum.

1. Lærarin greiðir frá yvirskriftini til venjingina, t.d. "Hvørjum kunnu foreldur stuðla við í skúlahøpi?"
2. Øll foreldur fáa eitt kort, har tey skriva á, hvørjum tey kunnu stuðla við.
3. Tey fara til gongu í hølinum. Hvørja ferð foreldrini hitta eini onnur foreldur, býta tey um kort, so kortini at enda verða blandað, og eingin veit, hvar kortið endar.
4. Tá ið lærarin gevur tekin, finna øll saman við einum makkara.
5. Tvey og tvey skulu tey nú meta um hugskotið á kortunum og geva hugskotunum stig, 0-5. Stigini verða skrivað á kortini.
6. Nú verður punkt 3 endurtikið, og kortini skifta aftur hond.
7. Síðan verða punkt 5 og 6 endurtikin fýra ferðir, so hvørt kort at enda hevur fingið stig fimm ferðir. Nú kunnu rættiliga góð hugskot hava fingið til samans 25 stig.
8. Tá ið øll sita saman aftur, verður tikið saman um tey hugskot, ið hava fingið flest stig, og lærarin savnar kortini saman.

Síðan kunnu hugskotini verða skrivað á eina síðu, sum verður send heim ella fer í foreldrabólkin á netinum.

**Uppskot um evni:**

- Hvussu kunnu vit foreldur stuðla inklusiónini í flokkinum?
- Hvussu stuðla vit best børnum okkara í læringini?
- Hvussu geva vit foreldur lærarunum bestu treytir fyri at læra børnini?




© NÁM 2016

lærari

## 7.4 • Hvat heldur tú?

1. Lærarin lýsir spurningin t.d.: “Skulu børn í 7. flokki hava heimaarbeiði, og hvat er rímilig tíð til heimaarbeiði dagliga?”

2. Kjakast verður um evnið, og luttakararnir seta upp bæði hámark og lágmark. Kanska verður hámarkið: “Ja, 2 tímar” og lágmarkið: “Nei, einki heimaarbeiði”.

3. Luttakararnir skriva seg á strikuna millum útmørkini, har teir halda seg vera. Eru 20 luttakarar, skal hvør luttakari velja sær eitt tal millum 1 og 20.

4. Nú skulu øll upp eftir tali. Hava fleiri valt sama tal, mugu tey tosa saman og royna at finna fram til, hvør skal standa hvar á strikuni.

5. Tá ið tey hava tosað saman í 5 minuttir, hava øll funnið eitt stað. Nú verður strikan býtt í helvt og forskotin, so nummar 1 stendur yvir av nummar 11 o.s.fr. Øll hava nú ein makkara at tosa við. Ein, ið ikki hevur somu meining, sum tey sjálv.

6. Makkarapørini skiftast um í 3-5 minuttir at spyrja hvønn annan um valda plássið á strikuni.

7. Lærarin tekur samanum.

**Broyting:**
Venjingin kann verða víðkað til at loyva foreldrunum at flyta seg eftir punkt 6. Tað kann jú henda, at tey meta spurningin øðrvísi nú og hava tí broytt hugsan.

**Dømi um evni:**
- Skulu vit hjálpa børnum okkara við heimaarbeiði?
- Tað týdningarmesta, barnið kann læra í skúlanum, er at samstarva.
- Eg leggi uppí, um eg finni útav, at onkur næmingur í flokkinum er “komin í óføri”.
- Kunnu ungu fólkini drekka rúsdrekka, tá ið tey eru í veitslu?
- Skal ein vaksin vera heima, tá ið næmingarnir koma heim við einum ella fleiri floksfeløgum?



© NÁM 2016

# 8

## Ymisligir næmingar og samvirkisnám


© NÁM 2016

Sum áður greitt frá, eru børn ógvuliga ymisk. Roynir tú at undirvísa einum flokki, sum er tað ein einsháttaður bólkur, kunnu nógvir trupulleikar standast av tí. Vit mugu síggja børnini sum ein bólk av einstaklingum. Í undirvísingini skulu vit taka atlit til hvønn einstakan og brúka tann undirvísingarhátt, tey læra best við, men tey skulu eisini venja seg at taka lut í felagsskapinum.

Vit skulu sjálvandi vera rættvís ímóti teimum, men tað vil ikki siga, at vit skulu fara líka við øllum! Skulu vit handfara tey rættvíst og á jøvnum føti, mugu vit taka atlit til ymisligu næmingarnar í flokshølinum og hava tað við í tilrættisleggjanini.

Í hesum kapitlinum verður greitt frá ymisligu næmingabólkunum, sum vanliga eru í flestu flokkum. Ymisligu næmingarnir eru bara leysliga lýstir, men eg vóni, tú kennir onkrar teirra aftur.

## Tey stillføru

Tað eru næmingar, ið næstan ongantíð siga nakað í flokkinum. Kanska tí tey eru bangin fyri at siga okkurt skeivt. Teimum dámar ikki at tosa so hart, at allur flokkurin hoyrir. Næmingarnir sita ofta og hugsa um eitt svar, men fáa seg ikki at svara sjálvir, og so er ein annar næmingur fyrri at svara. Kanska hava stillføru næmingarnir bara brúk fyri longri umhugsanartíð, men fáa hana ongantíð, tí floksfelagar hava longu svarað, áðrenn teir hava hugsað seg um?

Stillføru næmingarnir hoyra ferð eftir ferð, at teir siga ov lítið í floksundirvísingini. Tú kanst gera eina avtalu við tey, at tey skulu siga okkurt tvær ferðir í hvørjum tíma og so fylgja við, hvussu ofta tey rætta hondina upp. Hetta eydnast tó bara fáar ferðir. Í venjingunum 8.1 og 8.2 fáa næmingarnir tíð at hugsa seg um. Tey venja seg eisini at siga okkurt hart fyri einum floksfelaga ella einum lítlum bólki av floksfeløgum.

## Tey, ið mugu røra seg

Nógvir skúlanæmingar hava tørv á at røra seg, meðan teir læra, men siðbundni skúlin er ikki altíð við uppá tað. Tað eru tó rættiliga mong, ið hava fingið hugskot úr læringsstílum og taka rørslur við í undirvísingina. Tað er eitt gott tiltak.

Seinastu árini er ivi sáddur um skipanina í skúlanum serliga við atliti at dreingjum. Í fólkaskúlanum eru flestir lærarar konufólk, men um tað hevur týdning, komi eg ikki inn á her. Annað er, at í nógvum virksemi í skúlanum skulu næmingar sita, og tað virksemið hóskar ikki rættiliga børnum, ið hava tørv á at røra seg.

Summar dagar sita næmingarnir í meira lagi í undirvísingini, og tá kanst tú við fyrimuni brúka nakrar av venjingunum í 1. og 2. kapitli. Venjingarnar kunnu spræna orku inn í undirvísingina.




© NÁM 2016

Næmingarnir broytast við aldrinum, og tá ið teir koma í framhaldsdeild, halda lærarar kanska, at teir ikki longur hava tørv á rørslu. Vit leggja alstóran dent á faklig mál og gloyma, at vegurin til faklig mál meiri enn so kann vera við eini ífyllu av rørslum.

Í samvirkisnámi eru nógvar venjingar við rørslum, samstundis sum arbeitt verður við tí fakliga. Venjingarnar 8.3 og 8.4 eru dømi um tað.

## Tey fakliga dugnaligu

Hesin bólkur av næmingum er vanur at skula bíða, til allir floksfelagarnir hava skilt eina uppgávu. Tey mugu eisini ofta í vanligum bólkaarbeiði bera tyngstu byrðuna, antin tí hini ikki kunnu fylgja við, ella tí tað er léttari at lata hin dugnaliga gera alt. Lærararnir eru tí ørkymlaðir, og helst av røttum, um tað eru nóg nógvar avbjóðingar til hesar næmingar.

Næmingarnir í hesum bólki tykjast nøgdir, um teir ofta sita einsamallir við onkrum tilfari ella uppgávu, tí so kunnu teir arbeiða við síni egnu ferð. Mangan eru avbjóðingarnar hjá teimum fakliga dugnaligu at skula seta orð á tað, tey longu vita. Tey kunnu sum einki duga at rokna trupul stykki, men tað gongst kanska verri at greiða frá tí, tey gera.

Hjá hesum næmingum kann tað eisini vera ein avbjóðing at skula samstarva. Tá skulu tey bíða eftir øðrum, og nú er størri dentur á tilgongd enn á avrik. Tú kanst kanska finnast at samvirkisnámi, tí har vantar ein sjálvbjargnispartur, ið hesir næmingar vanliga taka framum (Andersen 2011). Tí er neyðugt at umhugsa fleiri øki við í undirvísingina í mun til hesar næmingar eisini.

Fyri allar næmingar er galdandi, at tað er týdningarmikið at eftirmeta virksemið. Men kanska hevur tað størri týdning fyri hendan bólkin? Vit mugu eisini seta orð á, hví tað er ein týðandi førleiki at kunna bíða eftir tørni og duga at greiða øðrum frá.

Venjing 8.5 og aðrar venjingar (t.d. venjing 5.5), ið leggja dent á at greiða frá einum evni, eru væl egnaðar til hesar næmingar.

## Tey, ið vísa góðan vilja, men ikki megna

Tað kunnu vera mangar orsøkir til, at næmingar ikki kunnu taka lut í einum virksemi í flokkinum. Næmingarnir kunnu vera fakliga veikir og halda seg ikki duga at leggja nakað afturat arbeiðinum. Tað kann vera veiki lesarin, ið ikki kann lesa upp somu tekstir sum floksfelagarnir. Ella næmingurin, ið hevur sosialar trupulleikar og ilt við at finna seg til rættis í flokkinum.

Týdningarmest er, at næmingurin tekur lut í flokkinum eftir sínum egnu fyritreytum. Hava vit fingið eitt framúrskarandi hugskot at brúka í undirvísingini, kunnu vit ikki vera vís í, at øll børn sum einki kunnu vera við í tí. Tað eigur at bera til at gera skipanir, ið eru lagaðar til hvønn sær, so allir næmingar sleppa at taka lut, har teir kunnu. Eitt uppskot er at hava ymisk pláss til ein næming,




© NÁM 2016

sum ikki hvønn dag kann arbeiða saman við øðrum. Næmingurin hevur eitt pláss í toyminum og tekur lut har í uppgávum á jøvnum føti við hinar næmingarnar. Men teir dagar, tað ikki ber til, fer næmingurin yvir á sítt egna pláss, har hann arbeiðir "sjálvur". Her arbeiðir hann við líknandi tilfari, sum restin av flokkinum, men bara fyri seg sjálvan.

Soleiðis verða allir næmingar við í einum felagsskapi og hava týdning fyri, at ein ávís uppgáva verður gjørd, men tað verður samstundis tikið atlit til tørvin hjá hvørjum sær.

Ávísar uppgávur eru ikki til henda bólk av næmingum, tí teir kunnu loysa nógvar ymsar uppgávur. Onkuntíð kann tað eisini vera neyðugt, at næmingur samstarvar við ein floksfelaga um eina uppgávu.

## Tey líkasælu

Hetta er helst truplasti bólkur at fáa við í undirvísingina. Mangan hava vit hesar næmingar í tonkunum, tá ið vit eru á veg heim úr arbeiði. Vit royna á óteljandi mátar at elva teimum til at taka lut. Tey kunnu vera dugnalig, men hava av onkrari orsøk mist hugin at læra og at ganga í skúla.

Eg tori at tvíhalda um, at tá ið vit brúka samvirkisnám í undirvísingini, so verða nakrir av hesum næmingum rættiliga áhugaðir, tí teir kunnu "verða lokkaðir" at vera við og koma við sínum íkasti. Vit náa helst nakrar av næmingunum við somu venjingum, sum vit brúka til næmingar við kyksilvuri í rumpuni.

Tey líkasælu kunnu eisini fáast upp í arbeiðið við serstøkum uppgávum. Venjing 8.5 er eitt boð upp á ymsar leiklutir, sum næmingarnir skiftast um at hava, so tú kanst tryggja tær, at øll eru virkin.

Tað er ikki vist, at allir hesir næmingar halda, at skúlin er stuttligasta stað í heiminum, um lærarin brúkar meginreglur úr samvirkisnámi í undirvísingini. Men eg haldi, at vit kunnu fáa fleiri teirra at halda, at tað er stuttligt at ganga í skúla.

Venjing 8.5 kann verða brúkt til allar næmingar. Tey skiftast um at arbeiða, og tað er ikki ætlanin, at ein næmingur skal gera tað sama alla tíðina.

Í venjing 8.6 loysir tað seg at lurta eftir, hvat verður sagt í undirvísingini. Her spæla vit bingo, og tað ræður um at fáa fulla plátu. Ikki við tølum hesa ferð, men við orðum úr einum evni í undirvísingini.



Samvirkisnám og floksleiðsla
© NÁM 2016

# Venjingar til 8. kapittul

## 8.1 • Spyrji-umfar – lærarasíða

Henda uppgávan er eitt gott dømi um, hvussu undirvísingin á ein einfaldan hátt kann fáa allar næmingar at tosa og at lurta. Venjingin kann verða brúkt til at siga hvørjum øðrum frá einum teksti, fortelja um seg sjálva/n, tosa um hugburð ella "bara" fyri at geva talutíð. Tað er eingin treyt at brúka ávíst tilfar, og óteljandi møguleikar eru í venjingini. "At lurta" hevur her ein stóran týdning, tí tú skalt endursiga tað, tú hoyrir.

## 8.2 • Snar-fundur – lærarasíða

Venjingin gevur øllum næmingum nógva talutíð. Tey tosa um eitt evni og bera fram síni sjónarmið ella leggja fram fyri nógvum floksfeløgum og hoyra teirra áskoðan. Nógvir stillførir næmingar kenna seg helst tryggari, um teir sita og tosa við ein floksfelaga heldur enn at skula siga okkurt hart í øllum flokkinum. Tað er gott hugskot at geva hvørjum næmingi sær tíð at hugsa um svarið, áðrenn teir skulu samskifta við ein floksfelaga.

## 8.3 • Graffiti-hátturin – lærarasíða

Henda venjingin er væl egnað, tá ið dentur er á forfatan og at eftirmeta eitt evni. Venjingin er serstakliga hent til næmingar, ið hava brúk fyri at røra seg, meðan teir hugsa. Næmingar, ið mugu hava tíð at hugsa seg um, kunnu eisini fáa gagn av venjingini.[19]

## 8.4 • Hitt ein vin – lærarasíða

Í hesi venjingini er møguleiki fyri at arbeiða saman við floksfeløgum, sum næmingarnir vanliga ikki sita saman við. Samstundis er her eitt andarhald, tí næmingarnir skulu út á gólvið fyri at finna ein samrøðupartnara.[20]

## 8.5 • Leiklutir í undirvísingini – lærarasíða og næmingasíða

Í hesi venjingini fáa næmingarnir nógvar, ymsar leiklutir, og allir næmingar skulu arbeiða upp á skift. Her kann næmingur, sum t.d. ikki dugir so væl at lesa, vísa øðrum, at hann dugir okkurt annað. Tað ber eisini til at fáa næmingar at vísa ábyrgd yvir fyri hvør øðrum, tí brúk er fyri hvørjum næmingi. Umráðandi er, at næmingar ikki hava sama leiklut hvørja ferð.

Lærarasíðan lýsir neyvari ymsu leiklutirnar. Á næmingasíðuni eru kort, ið stuðla næmingum at minnast sín leiklut.

---

19 Íblástur frá Bochmann og Kirchmann (2006).
20 Íblástur frá Bjerring og Lindén (2008).


Samvirkisnám og floksleiðsla
© NÁM 2016

## 8.6 • Bingo við orðum – lærarasíða og næmingasíða

Venjingin fær næmingarnar at lurta, tá ið undirvíst verður. Venjingin byggir á klassiska bingo-spælið, men í staðin fyri tøl skulu næmingarnir lurta eftir orðum úr einum evni. Næmingar hava ymsar bingoplátur, og tað eru ymisk orð, teir skulu lurta eftir. Tá ið tú biður næmingar leggja dent á støk orð, er vandi fyri, at teir gloyma at lurta eftir heildini. Venjingin skal ikki verða brúkt tíma eftir tíma, men er hent at taka til, tá ið tú vilt broyta undirvísingina og gera næmingar virknar.

Á næmingasíðuni er dømi um orð úr evninum "ævintýr". Á heimasíðuni www.snar.fo/samvirkisnam eru tómar plátur, har tú kanst skriva orð úr øðrum evnum.




© NÁM 2016

# 8.1 • Spyrji-umfar

lærari

1. Næmingarnir eru fýra í hvørjum bólki, tvey pør.

2. Pørini skiftast um at spyrja hvørt annað um eitt ásett evni. Hvørt spyrji-umfar tekur kanska tveir minuttir.

3. Tá ið fyrsta spyrji-umfar er av, býta næmingarnir makkara og fara nú at spyrja hann.

4. Nú skulu tey hvør sær greiða restini av toyminum frá, hvat makkararnir søgdu teimum. Tey fáa hóskandi tíð til at endursiga tað.

**Broyting:**

- Næmingarnir fyrireika sjálvir spurningar til spyrji-umfarið.

- Í mun til torleikastig kunnu næmingarnir velja at skriva svarini sum stikkorð. Soleiðis verður lættari at endursiga tað, tey hava hoyrt.

- Eru tríggir næmingar í einum ella fleiri bólkum, kunnu teir fáa leiklut sum spyrjari, svarari og eygleiðari. Leikluturin hjá eygleiðaranum er at gáa um innihaldið í samrøðuni ella skriva tað týdningarmesta í spurningunum hjá spyrjaranum. Soleiðis kemur ein táttur afturat inn í samskiftið.

- Tá ið næmingarnir skulu endursiga, kunnu teir brúka viðmerkingarnar hjá eygleiðaranum.

Yngru næmingarnir kunnu hava ilt við at minnast tað, teir skulu endursiga. Tá ber til at gera eitt spyrji-umfar og eitt endursagnar-umfar liðugt fyrst. Síðan verður farið undir seinna spyrji- og endursagnar-umfarið.


© NÁM 2016

# 8.2 • Snar-fundur




1. Helvtin av næmingunum situr við hvør sítt borð. Borðini kunnu standa á rað.

2. Framman fyri hvørjum borði stendur ein stólur.

3. Hvør næmingur finnur ein annan at tosa við, og pørini seta seg yvir av hvørjum øðrum.

4. Lærarin spyr ein spurning, og næmingarnir skiftast um at svara. Tá ið lærarin ger tekin til teirra, endar samrøðan. Tey siga hvørjum øðrum farvæl, og síðan fer "gesturin" víðari til ein annan makkara.

5. Soleðis fáa næmingarnir stundir at tosa við nógvar floksfelagar upp á ógvuliga stutta tíð.

6. Venjingin kann eisini vera byrjanin til eitt felags prát í flokkinum. Tá ið allir næmingar hava tosað saman tveir og tveir, eru nógv størri sannlíkindi fyri, at fleiri fara at siga okkurt í felags práti í flokkinum.

7. Annar møguleiki er, at allir næmingar standa heldur enn at sita. Soleiðis verður atlit tikið at næmingum, ið hava tørv á at røra seg.

**2 minuttir á hvørjum stað**






Samvirkisnám og floksleiðsla
© NÁM 2016

## 8.3 • Graffiti-hátturin

lærari

1. Fýra til seks borð verða sett so, at tað slepst til borðini frá øllum síðum.
2. Á hvørt borðið verður lagt eitt stórt pappír ella kartong.
3. Á hvørt pappírið er skrivaður ein spurningur ella eitt høvuðshugtak.
4. Flokkurin verður býttur í smáar bólkar (t.d. í grundtoymi). Hvør bólkur skrivar á pappírið alt tað, tey hugsa um. Orðini kunnu eisini verða skrivað á smáar post it-lepar.
5. Tá ið lærarin gevur teimum eitt tekin, rennur bólkurin til næsta borð. Har er longu skrivað okkurt á pappírið, ið liggur har. Bólkurin leggur nú fleiri hugskot afturat.
6. Soleiðis heldur bólkurin fram, til tey enda við sama borð, sum tey byrjaðu.
7. Bólkurin tekur nú alt, ið skrivað er, og skipar tilfarið.
8. Bólkurin sigur stutt frá í flokkinum, hvørji úrslit tey komu til.

**Graffiti-hátturin**







© NÁM 2016

# 8.4 • Hitt ein vin




1. Allir næmingar fara á føtur.

2. Tey hitta ein næming úr øðrum toymi og heilsa vinaliga hvørt upp á annað.

3. Lærarin setir ein spurning, sum báðir næmingar skulu tosa um sínámillum.

4. Tá ið lærarin gevur tekn um at steðga, takka tey hvørjum øðrum fyri samrøðuna og fara víðari til ein nýggjan makkara.

5. Lærarin setir nýggjan spurning.

6. Venjingin heldur fram, so leingi bólkurin orkar, ella til lærarin steðgar teimum.




**Broyting:**
Tú kanst lata næmingarnar sjálvar gera av, hvussu leingi teir vilja tosa við makkaran. Tað skal bara vera sami spurningur, tey tosa um. Annar møguleiki er, at tey hava fleiri spurningar við sær. Ella tað eru spurningar á talvuni, og so velja tey sær spurningar haðani.

**Uppskot at tosa um:**

1. Ein lisin tekstur.

2. Greiða frá hugtøkum í støddfrøði.

3. Kjakast um etiskar tvístøður.

4. Stuttar framløgur av einum fyrireikaðum evni.


Samvirkisnám og floksleiðsla
© NÁM 2016

# 8.5 • Leiklutir í undirvísingini




**Leiklutir og lýsing:**

1. *Skrivari* – skrivar úrslit hjá bólkinum niður

1. *Tíðtakari* – heldur eyga við tíðini

1. *Teknari* – teknar úrslit hjá bólkinum

1. *Heintari* – syrgir fyri at fara eftir tilfari o.t. til bólkin

1. *Nærspyrjari* – spyr um arbeiðið í bólkinum, so evnið verður lýst frá ymsum sjónarhornum

1. *Njósnari* – fer út í aðrar bólkar eftir hugskotum

1. *Raddarstýrari* – syrgir fyri, at limirnir í bólkinum ikki tosa ov hart

1. *Kveikjari* – heldur íblástrinum uppi

1. *Uppskrivari* – skrivar viðmerkingar frá bólkinum

1. *Hugskotsbirtari* – kemur við nýggjum hugskotum til bólkaarbeiðið

1. *Tilrættisleggjari* – ger eina ætlan fyri arbeiðið í bólkinum

1. *Endari* – tekur samanum og endar uppgávuna

1. *Eftirlit* – tryggjar sær, at uppgávan er rætt fatað, og at bólkurin er á rættari kós


© NÁM 2016

## 8.5 • Leiklutir í undirvísingini

næmingur

| | |
|---|---|
|   Skrivari |  Tíðtakari |
|  Teknari |  Heintari |
|  Nærspyrjari |  Njósnari |
|  Raddarstýrari |  Kveikjari |




© NÁM 2016

| | |
|---|---|
|  Tilrættisleggjari |  Hugskotsbirtari |
|  Eftirlit |  Endari |
| | |
| | |




© NÁM 2016

# 8.6 • Bingo við orðum




Bingopláturar á næstu síðunum kunnu verða brúktar, tá ið lærari byrjar eitt evni, ella næmingur leggur fram. Hvør fær fyrst fulla plátu?

Dømið kann verða brúkt í føroyskum, tá ið arbeitt verður við ævintýrum. Ger sjálv/ur plátur, ið hóska til lærugrein og evni.

**Broyting:**
Plátur kunnu eisini t.d. verða gjørdar við at skriva hugarok saman við næmingunum. Hvørji orð halda næmingarnir, at undirvísarin fer at siga? So kunnu tey sjálv gera hvør øðrum plátur.

Bingospælið kann eisini verða brúkt á lærarafundi, men tá eru orðini sjálvandi vald við atliti at dagsskránni.




© NÁM 2016

# 8.6 • Bingo við orðum

nægingur

Dømið kann verða brúkt í føroyskum, tá ið arbeitt verður við ævintýrum.

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Listævintýr | | Hans Andrias Djurhuus | | "Einaferð var tað" | |
| | Ónd/ur | | Rík/ur | | Løn |
| Kongsdóttir | | Royndir | | Einfalt lýstir persónar | |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | Gandakelling | | | 7 | Brøðurnir Grimm |
| Aktantfrymil | | Gevari | Mótstøðufólk | | |
| | Sáttmálafrymil | | | Endamál (Objekt) | Læra |



Samvirkisnám og floksleiðsla
© NÁM 2016

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Býtt/ur | | Eydnuleys/ur | | Og tey livdu lukkuliga | |
| | Frásøgufrymil | | Økt ósemja | | Móttakari |
| Høvuðspersónur (Subjekt) | | Evni | | Hjálpari | |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fólkaævintýr | | 3 | | Klók/ur | |
| | Fátøk/Fátækur | | Kongsborg | | Hetja |
| Hálvt kongsríki | | Frásøgureglur | | Trøll | |



Samvirkisnám og floksleiðsla
© NÁM 2016

# 9

## Arbeiðið í læraratoyminum


© NÁM 2016

Í hesum kapitlinum koma vit inn á týdningin hjá lærаratoyminum, tá ið samvirkisnám skal verða sett við í undirvísingina. Lærari kann einsamallur fara undir samvirkisnám í flokkinum, men alt er nógv léttari, tá ið vit hjálpast at.

Óivað hava flestu lærarar ymsar aðrar partar enn samvirkisnám við í síni undirvísing. Her koma vit tí inn á møguleikar, tá ið lærаratoymið arbeiðir við valdum undirvísingarstrategium og umrøður, nær tær ymsu undirvísingarstrategiirnar eru gagnligar.

Seinast í kapitlinum eru dømi um, hvar byrjað kann verða við floksleiðslu. Tá ið hurðin til flokshølið fer aftur, ert tú sum lærari alsamt einsamallur um arbeiðið sum floksleiðari. Tí kanst tú siga, at floksleiðsla er mál hjá hvørjum lærara sær, men skal arbeiðið sum floksleiðari eydnast væl, mást tú hava lærаratoymið afturat tær. Tit mugu semjast um, hvørjar undirvísingarstrategiir tit hava við næmingunum og í arbeiðinum sum floksleiðari. Tað er umráðandi, at toymið dregur somu línu. Tað nyttar einki, um ein lærari heldur, at tað er í lagi at koma fimm minuttir ov seint í tíma, ella kanska tú kemur ov seint sjálv/ur, um ein annar lærari í flokkinum leggur dent á at møta stundisliga. Somuleiðis er óheppið, um nakrir lærarar í toyminum lata næmingarnar sjálvar gera av, hvørjum teir arbeiða saman við, og at aðrir lærarar ikki gera tað.

## Saman megna vit meiri – og betur!

Men hvat er eitt toymi? Er tað ikki bara eitt annað orð fyri ein bólk? Tað ber til at siga, at eitt toymi altíð er ein bólkur, men ein bólkur er ikki altíð eitt toymi. Í 1. kapitli, um felagsskap í næmingatoyminum, kom eg inn á, at ein bólkur kann fáa so lítið á skaftið, at endaliga úrslitið í bólkinum er verri, enn um limirnir arbeiddu hvør sær.

Tað skuldi helst ikki verið galdandi í einum lærаratoymi, hóast tað av og á kann vera trupult at samstarva sum í einum sonnum toymi. Ein orsøk, at lærarar arbeiða í toymi, er fyri at loysa uppgávur við denti á tað yrkisliga og at fáa felagsskapin til eina heild.

Heilt stutt kann munurin millum bólk og toymi verða lýstur so (Hornstrup o.fl. 2008):

| | **Óskipaður bólkur** | **Skipaður bólkur** | **Toymi** |
|---|---|---|---|
| **Uppgáva** | Mest til hvønn sær | Til hvønn sær og felags | Mest felags |
| **Ábyrgd** | Mest hvør sær | Hvør sær og felags | Mest felags |
| **Kunning/ samskifti** | Eitt sindur sínámillum | Nógv sínámillum | Ógvuliga nógv sínámillum |
| **Samstarv** | Lítið | Eitt sindur | Nógv |
| **Tilknýtið sínámillum** | Lítið | Eitt sindur | Nógv |



Samvirkisnám og floksleiðsla
© NÁM 2016

Toymið kann arbeiða við uppgávum sum t.d. yvirskipaðari ráðlegging og at samskipa arbeiðið í flokkinum. Men undirvísing, ið er ítøkiliga løgd til rættis, verður best framd av hvørjum lærara sær (Hermansen 2010).

Annað, ið toymið kann samstarva um, er at tosa um og eftirmeta undirvísingartilgongdir, og hvussu børnini trívast og mennast fakliga. Men prát um leyst og fast og óskipaðir fundir við ongari dagsskrá eru ikki við í einum yrkisligum toymissamstarvi.

Ber til hjá lærarum at vera í tíma hvør hjá øðrum, er tað eitt gott ískoyti, sum mennir floksleiðslu.

Toymið hevur stóran týdning fyri, hvussu hvør lærari sær útinnir floksleiðslu og t.d. setir samvirkisnám í verk. Tað er ikki nøkur treyt, at alt læraratoymið skal arbeiða við samvirkisnámi í flokkin-um, men eru allir lærarar um tað, verður arbeiðið lættari, og floksleiðsla kemur á skránna á toymisfundum.

Í summum flokkum arbeiðir bara ein lærari við samvirkisnámi í flokkinum. Tað ber væl til, men tað riggar tvífalt so væl ella betur, um avtalað verður við starvsfelagarnar at royna tað saman í flokkinum.

Næmingarnir finna skjótt út av, at: ”Nú kemur hasin lærarin, ið vil hava okkum at arbeiða í bólkum, so vit mugu heldur flyta okkum”. Men vilt tú kjakast um undirvísingarhættir og námsfrøði á toymisfundi, so mugu tit hava eitt felags stavnhald. Annars er vandi fyri, at fundurin druknar í praktiskum tosi, eins og tað mangan hendir.

Í undirvísing hendir rættiliga nógv ymiskt, og hvønn dag royna vit ymsar tilgongdir fyri at fáa flest møguligar næmingar við í undirvísingina. Her eru tí dømi um stuttar venjingar at royna í toyminum fyri at fáa okkum at hugsa og tosa um, nær ein undirvísingarháttur er betri enn ein annar. Hvør læring fæst úr ymsum undirvísingarhættum, og hvat hevur undirvísingarhátturin at týða fyri tilelvingina?

## Floksleiðsla

Sum longu nevnt umskarast samvirkisnám og floksleiðsla á fleiri økjum, og tú ert væl á veg sum ein greiður floksleiðari, um tú arbeiðir við nøkrum av økjunum, eg havi umrøtt frammanfyri.

Men at vera greiður og góður floksleiðari er meiri enn tað. Nógvur persónleiki er við í arbeiðinum, og ikki er so lætt at greiða frá persónleika ella at flokka hann. Tað snýr seg t.d. um hugsan tína um næmingarnar, áhuga tín fyri sosiala lívi teirra og nógvar aðrar smærri tættir, ið allir gera mun. Í venjing 9.2 verður hugsað um ymiskt í sambandi við samvirkisnám í undirvísingini, og venjingin kann verða brúkt, tá ið toymið arbeiðir við floksleiðslu og samvirkisnámi. Á síðu 9.3 eru íblástur og ávísingar til ymsar partar av floksleiðslu og ymiskur lesnaður, um tú hevur hug at arbeiða meiri við hesum pørtum.


© NÁM 2016

# Venjingar til 9. kapittul

## 9.1 • Ymsir arbeiðshættir – toymissíða

Í hesi venjingini eru tríggjar smærri uppgávur, sum læraratoymið kann royna og so tosa um aftaná. Ein uppgáva er ein kapping, ein uppgáva er til hvønn einstakan, og so er ein felags uppgáva. Næmingar í elstu flokkum kunnu eisini royna hesa venjingina og umrøða ymsar arbeiðshættir.[21]

## 9.2 • At umhugsa í eini tilgongd við samvirkisnámi - toymissíða

Her eru viðkomandi spurningar, tá ið toymið setir samvirkisnám í verk í flokkinum. Tað er umráðandi at eftirmeta tilgongdina, bæði meðan hon fer fram og aftaná. Eftirmetir tú ikki og bara heldur fram sum higartil, fært tú kanska einki úrslit burturúr, tí tú ikki setir orð á og sært, hvat riggar ella ikki.

## 9.3 • Partar av floksleiðslu at arbeiða við í toyminum

Á hesi síðuni er íblástur til ymsar partar av arbeiðinum við floksleiðslu. Partarnir eru ikki nágreiniliga lýstir, men har eru ávísingar til lesnað, so tú fært meiri at vita. Hetta er ikki bara til hvønn lærara sær í arbeiðinum við floksleiðslu. Tað er umráðandi, at allir lærarar í flokkinum stuðla arbeiðinum. Tá verður úrslitið betri, og munandi lættari verður hjá næmingunum at koma ígjøgnum avbjóðingarnar í skúladegnum.

21 Íblástur frá Sahlberg og Leppilampi (2004).


© NÁM 2016

# 9.1 • Ymsir arbeiðshættir – inngangur




**Kapping**

Skúlaarbeiðið er ikki verulig kapping. Men næmingarnir kenna tað ofta sum eitt slag av kapping. Tey kappast sínámillum um próvtøl, støðu í flokkinum o.a. Ert tú við í einari kapping, so er ikki óvanligt at ynskja sær, at tað gongur øðrum verri.

**Uppgáva til hvønn sær**

Vit seta mangan næmingar í ta støðu, at teir skulu gera okkurt sjálvir. Eitt gott dømi um tað eru skrivligar próvtøkur. Tey fara til roynd, og úrslitið hevur sum so einki við felagsskapin at gera. Tá er eisini líkamikið, hvussu hini klára seg.

**Felags uppgáva**

Í samvirkisnámi er eitt felags mál fyri toymið. Eingin einsamallur næmingur kemur á mál uttan hjálp frá hinum. Roynt verður at menna læringina hjá hvørjum næmingi sær í felagsskapinum.

Tá ið tit hava gjørt uppgávurnar á komandi síðum, skulu tit umrøða:

- Man kapping eggja til luttøku?
- Nær er einstaklingaarbeiði gott og eggjar til luttøku?
- Hvussu kann samvirkisnám gagna, og nær er best at brúka tað?


© NÁM 2016

# 9.1 • Ymsir arbeiðshættir – kapping

toymi

Ger uppgávuna sjálv/ur. Tann, ið fyrst er liðug/ur, hevur vunnið.

**Uppgáva:**
Nevn 10 hættir at sleppa undan ókrúti í urtagarðinum.


© NÁM 2016

# 9.1 • Ymsir arbeiðshættir – uppgáva til hvønn sær




Ger uppgávuna sjálv/ur. Tú fært tveir minuttir. Hvørt avrik verður dømt, um tað so er liðugt ella ikki.

**Uppgáva:**
Finn 10 lutir, ið eru grønir og kunnu etast.


© NÁM 2016

# 9.1 • Ymsir arbeiðshættir – felags uppgáva




Gerið uppgávuna í einum lítlum bólki. Tit skulu hjálpa hvørjum øðrum, og øll skulu taka lut. Í tveir minuttir skulu tit hugsa hvør sær um møguligar loysnir. Síðan skiftast tit um at siga eitt orð, sum hini gera viðmerkingar til. Gevið hvørjum øðrum jalig aftursvar. Tit skulu savna orðini, ið tit semjast um, á einum pappíri.

**Uppgáva:**
Ímynda tær lívið við ongum sjónvarpi. Hvussu hevði tað verið samanborið við nú? (Tú hevur heldur ikki møguleika at síggja tíðindi á eini teldu.) Skriva minst 15 dømi um, hvussu lívið hevði verið.




© NÁM 2016

# 9.2 • At umhugsa í eini tilgongd við samvirkisnámi




At hugsa um, áðrenn tit fara í gongd við samvirkisnámi:

- Hvørjum pørtum av samvirkisnámi vilja tit arbeiða við?
- Hvussu ætla tit ítøkiliga at gera?
- Hvussu og hvar skal tað síggjast, at tit arbeiða við hesum parti?

At hugsa um, eftir at samvirkisnám er sett í verk:

- Hvørjar ítøkiligar broytingar varnast tit?
- Hvørjir spurningar stinga seg upp?
- Eru avbjóðingar, ið tit ikki hugsaðu um?

Brúkið hesar spurningar í einari eftirmeting:

- HHvat hevur arbeiðið við samvirkisnámi havt at týða fyri:
  - tykkum sum toymi?
  - teg sum lærara?
  - næmingarnar?
  - foreldrini?
- Hvørjum punktum skulu tit arbeiða víðari við?
- Hvat skulu tit gera fyri at halda fram við menningini?




© NÁM 2016

## 9.3 • Partar av floksleiðslu at arbeiða við í toyminum

toymi

| | |
|---|---|
| • Læraraatferð<br>• Tímakarmar<br>• Góðir vanar | Bastiansen, Gry (2011): *Små skridt – redskaber til evaluering af klasseledelse*. Dafolo |
| • Góð og munadygg boð<br>• Vanligar mannagongdir við skifti<br>• At skipa undirvísingarhølið<br>• At áseta reglur og vanar<br>• Greið boð um arbeiðsuppgávur | Bergkastet, Inger o.fl. (2010): *Relationsorienteret klasseledelse – en praktisk håndbog*. Dafolo |
| • Mál fyri læring hjá hvørjum sær<br>• Greið og kend mál – bæði faklig og sosial<br>• Eftirmeting | Heckmann, Lene og Villumsen, Karina (2009): *Klasse- og læringsledelse – en kopi- og arbejds-mappe*. Dafolo |
| • Mál fyri læring hjá hvørjum sær<br>• Ársætlanir og næmingaætlanir | Egelund, Niels o.fl. (2007): *Elevplaner. Teori og praksis.* Gyldendal |
| • Foreldrasamstarv | Kofoed, Ulla (2010): *Forældresamarbejde med fokus på elevernes læring*. Akademisk Forlag<br><br>UCC, UC Lillebælt og Skole og Forældre (2011): *Forældredialog i skolen – en artikelsamling om det gode skole-hjem- samarbejde*. For-di-verkætlanin. www.for- di-dk |
| • At broyta innihald og arbeiðshátt<br>• Fjølbroyttir undirvísingarhættir | Meyer, Hilbert (2005): *Hvad er god undervisning?* Gyldendal |
| • Tilvit um samstarvshættir | Bjerresgaard, Helle og Kongsted, Else (2010): *Elever lærer sammen – gruppearbejde som un-dervisningsform*. Dafolo<br><br>Sahlberg, P. og Leppilampi, A. (2004): *Samarbejde om læring – en introduktion til Cooperative Learning.* Akademisk Forlag. |
| • Eggjandi umstøður um læring | Cefai, Carmel (2009): *Frem elevens livsduelighed.* Dansk Psykologisk Forlag.<br><br>Lindahl, Solbritt (2009): *Miljøløftet i folkeskolen.* Dansk Psykologisk Forlag. |



Samvirkisnám og floksleiðsla
© NÁM 2016

# 10

## Um nú…


© NÁM 2016

Í hesum kapitlinum koma vit inn á nakrar spurningar og tvístøður, ið kunnu koma fyri í arbeiðinum við samvirkisnámi. Her eru ongar venjingar.

## Um nú næmingarnir ikki hava gjørt heimaarbeiðið?

Er tað stórur trupulleiki í einum flokki, at nógvir næmingar ikki gera heimaarbeiði, byrja so við venjingum, har tað ikki er eitt krav, at næmingarnir hava fyrireikað seg heima. Tað sæst ógvuliga týðiliga í venjingunum, tá ið næmingar ikki eru fyrireikaðir. Nú kunnu tey ikki longur fjala seg og einki gera, eins og í vanligari floksundirvísing.

Við tíðini fer undirvísingarhátturin við samvirkisnámi at noyða næmingarnar at fyrireika seg betur til at arbeiða í bólki við floksfeløgum. Tað er einki stuttligt at vera tann næmingur, ið hinir ikki rokna við, tí hann fyrireikar seg ongantíð. Og tað hevur størri ávirkan á næmingin, enn tá ið lærarin júkar um at gera heimaarbeiðið.

## Hvat geri eg, um eg havi ein ógvuliga veikan næming?

Næmingar, ið eru illa fyri bæði fakliga og sosialt, kunnu verða ein sonevndur tvíburi í einum bólki. Tað vil siga, at tey luttaka í venjingunum saman við einum makkara og fáa fyrimun av tí. Í hesum føri eru tveir næmingar um leiklutin hjá einum næmingi. Men tað er umráðandi, at tey hava greiðar leiklutir, so tað ikki er so, at stinnari næmingurin ger arbeiðið fyri báðar.

Veiki næmingurin nýtist ikki vera tvíburi alla tíðina. Í nógvum førum kann næmingurin saktans vera einsamallur. Tað er mennandi fyri allar næmingar at royna seg sum tvíburi. Tú kanst eisini brúka møguleikan við tvíbura, um næmingatalið er stakt tal, og næmingarnir skulu arbeiða tveir og tveir saman ella í bólki við fýra næmingum.

Undirvísingin við samvirkisnámi gevur annars læraranum nógv betri stundir at hjálpa næmingum, ið veruliga hava tørv á tí.

## Hvussu við børnum, ið hava diagnosu, t.d. ADHD?

Sum nevnt áður, trívast mong børn við serstøkum avbjóðingum betur í meiri skipaðu undirvísingini við samvirkisnámi.

Tey hava trupulleikar í ófyriboðaðum støðum, og uttan fastar karmar fyri samstarvið. Men tað er framvegis týdningarmikið at líta at einstaka barninum og hjálpa tí, tá tað hevur brúk fyri serstøkum reglum.

## Um nú flokkurin skal hava vikar?

Tað er ein avbjóðing fyri ein vikar at undirvísa við samvirkisnámi. Men sum næmingarnir venja seg við undirvísingarháttin, kunnu teir vera við at kunna vikarin um henda arbeiðsháttin.


© NÁM 2016

Afturfyri kann samvirkisnám vera við til at gera undirvísingina hjá vikari rættiliga gagnliga, tí við samvirkisnámi tekur lærarin ikki lut á sama hátt sum í vanligu undirvísingini. Næmingarnir kunnu arbeiða sjálvstøðugari enn í teimum førum, vikarurin kemur dettandi inn í eina undirvísing uttan samvirkisnám.

Putlispælshátturin (venjing 1.4) kann verða brúktur, tá ið flokkurin lesur ein tekst. Tá ið næmingarnir hava lisið hvørt sítt brot av tekstinum og hjálpt hvørjum øðrum ígjøgnum allan tekstin, kunnu teir gera spurnakort til tekstin og royna venjingina "Stuttur fundur" (venjing 7.1 ella 7.2) við spurningunum.

## Hvussu stórur partur av undirvísingini skal vera samvirkisnám?

Tíbetur gert tú tað sjálvur av sum lærari! Trupult er at koma við einum endaligum boði, tí læring í felagsskapi er jú nógv annað enn at arbeiða saman í bólki. Her er jú øll hugsanin um, at lærarin skal tosa minni, so næmingarnir kunnu menna førleikar í samskifti og samstarvi og fáa so nógva talutíð, sum til ber.

Eg havi sett mær eitt mál, sum eg sjálvandi eisini havi sagt næmingunum: At tey ikki fara úr mínum tímum uttan at hava sagt okkurt (fakligt) hart í flokkinum og hava verið til gongu um gólvið í undirvísingini í hvørjum tíma. Hesi bæði partsmál hava í veruleikanum stóran týdning í broyttu undirvísing míni, sammett við tíðina áðrenn eg kendi til samvirkisnám. Næmingarnir eru virknir og nærlagdir, teir læra nógv, og tímarnir flúgva avstað!

## Um nú foreldrini ikki vilja, at børnini arbeiða í bólki?

Summum foreldrum dámar ikki, at børnini arbeiða í bólki. Kanska tí tey hava vána royndir við óskipaðum bólkaarbeiði, har børnini máttu gera alt arbeiðið. Mangan eru tað foreldur at dugnaligum, samvitskufullum børnum, ið arbeiða ímóti bólkaarbeiði.

Men foreldrini mugu verða gjørd var við, at hetta er ikki "vanligt" bólkaarbeiði við ongum reglum fyri samstarvi. Nú kunnu teir minni arbeiðssomu næmingarnir ikki sleppa sær undan, meðan teir dugnaligu skulu bera alla arbeiðsbyrðuna.

Foreldrini kunnu eisini verða kunnað um læringstríkantin á síðu 79. Tríkanturin stuðlar grundgevingunum, at samvirkisnám er gott og munadygt fyri læringina, og at øll læra okkurt av tí. Tað er tó umráðandi, at næmingarnir ikki bara tykjast arbeiða við samvirkisnámi, tí teir eru í bólkum, men at teir veruliga arbeiða saman á mál.


© NÁM 2016

## Um flokshølið er ov trongt at ganga í?

Tað krevst eitt sindur av plássi til venjingarnar, tá ið næmingarnir trína fram á gólv. Eru nógv borð í flokkinum, kann vera trupult at fáa neyðuga plássið. Annar møguleiki er at fara í annað høli. Tá mugu næmingarnir venja seg til skiftið úr flokshølinum, so tað ikki tekur ov nógva tíð frá undirvísingini. Tað kundi verið eitt sosialt mál at farið stillisliga úr flokkinum til felagshølið og brúkt í mesta lagi 30 sekund um tað. Hygg í 6. kapittul um at venja sosialar førleikar.

## Kann eg broyta venjingarnar?

Venjingarnar, ið eru savnaðar her, eru ætlaðar sum ein karmur um undirvísingina. Væntar tú, at venjingin riggar betur við at broyta hana eitt sindur, so hevði eg verið hørm, um tú ikki gjørdi hesa lítlu broyting!



Samvirkisnám og floksleiðsla
© NÁM 2016

# 11

## Frásjónir (perspektiv) í samvirkisnámi


© NÁM 2016

Hvussu man fólkaskúlin síggja út í 2020? Verður arbeitt líka íðið við samvirkisnámi sum í dag?

Fyri nøkrum árum síðan var eg á einum 14 daga skeiði í Týsklandi saman við lærarum úr øllum heiminum. Felags fyri okkum var, at vit undirvístu í týskum. Tá ið eg aftaná hugsaði um tað, eg upplivdi á skeiðinum, var eg errin av at vera partur av danska fólkaskúlanum, har lærararnir eru ótrúliga dugnaligir at undirvísa akkurát tí bólki av næmingum, sum teir hava. Teir duga at laga undirvísing og undirvísingarhættir til mongu, ymisku næmingarnar í flokkinum. Nógvir av starvsfeløgunum, eg hitti í Týsklandi, løgdu heldur størri dent á fakligu evnini í undirvísingini enn á læritilgongdir.

Rák hava tað við at koma og fara, men eg haldi, at samvirkisnám í einum ella øðrum skapi er komið fyri at vera. Samvirkisnám skal vera ein bati og hjálp í undirvísing okkara, so næmingarnir í síðsta enda gerast dugnaligari og glaðari fyri at ganga í skúla. Samvirkisnám má ongantíð verða ein avmarking, so vit ikki kunnu hugsa sjálvi. Tí tað er júst tað, vit duga so væl í Danmark.

Danmarks Evalueringsinstitut (EVA) gav í 2011 út eina frágreiðing um næmingalagaða undirvísing. Frágreiðingin setir enn eina ferð næmingalagaða undirvísing á dagsskránna í skúlanum. Seinast EVA eftirmetti sama hugtak var í 2004, og tá vóru stórar avbjóðingar í at tulka hugtakið. Síðan er dentur lagdur á tað fakliga í eftirmetingini hjá lærarunum sum eina gongda leið til at næmingalaga undirvísingina. Men eisini í 2011 var trupult hjá lærarunum at fremja eina næmingalagaða undirvísing.

Næmingalagað undirvísing leggur dent á læringina hjá einstaka næminginum. Men næmingalagað undirvísing er ikki, at undirvísingin skal vera sergjørd til hvønn næming sær, ella at lærarin skal brúka mest møguliga tíð saman við hvørjum næmingi. Tað er jú ómøguligt at brúka tíð saman við hvørjum næmingi sær í flokki við 25 næmingum. Men tað ber til at leggja til rættis eina undirvísing, ið leggur dent á læritilgongdirnar hjá næmingunum, so teir meta undirvísingina vera áhugaverda og viðkomandi, og teir arbeiða við at seta sær sjálvum mál, taka lut í undirvísingini og at eftirmeta læring sína.

Tú kanst ikki greiða alt við at brúka meginreglur úr samvirkisnámi, men vit eru væl á veg. Vit bjóða næmingunum av alla tíðina at taka støðu og hugsa seg um. Norski professarin Thomas Nordahl vísir á, at ætlanin við næmingalagaðari undirvísing er fyrst og fremst at fremja góðar umstøður til sosiala og fakliga læring, har vit bjóða næmingunum ymiskt innihald, undirvísingarhættir, felagsskap, tilfar og tíð (EVA 2011).

Ætlan mín við hesi bók hevur verið at geva íblástur til undirvísing, ið tekur støði í góðum umstøðum um læring, har tað verður arbeitt við at hava eina so fjølbroytta undirvísing, sum til ber, tá ið vit nú vita, at í felagsskapinum eru einstaklingar, ið læra á ymiskan hátt.

Far í leiðarahattin og vís næmingunum vegin.

Góðan arbeiðshug


Samvirkisnám og floksleiðsla
© NÁM 2016

© NÁM 2016

# Um høvundin

Mette Stange, fødd í 1970, varð í 2001 útbúgvin sum fólkaskúlalærari frá Jelling Seminarium við linjulærugreinunum danskt og týskt.

Frá 2001 til 2011 var Mette í starvi í Erritsø Centralskole í Fredericia Kommune. Síðan 2002 sum flokslærari og lærari í donskum og týskum í framhaldsdeildini. Erritsø Centralskole bjóðar næmingunum í framhaldsdeild tríggjar breytir: nýskapanarbreyt, kt-breyt og altjóðabreyt. Mette var lærari á altjóðabreytini. Skúlaárið 2011-12 var Mette tímalærari í sama skúla, har hon undirvísti einum 9. flokki í týskum. Frá 2008 var Mette í einum samansettum starvi, har hon helvtina av tíðini var í starvi sum námsfrøðiligur ráðgevi á UCL, Center for Undervisningsmidler í Vejle. Her hevði hon lutvíst ábyrgd av lærugreinini týskum og lutvíst nógvar almennar námsfrøðiligar uppgávur, m.a. samvirkisnám og floksleiðslu.

Mette hevur verið við í lestrarbólki um samvirkisnám og tikið lut í kravmiklum námsskeiði við Yael Sharan úr Ísrael, ið hevur skrivað fleiri bøkur um samvirkisnám.

Í 2010 varð Mette liðug við eina PD (Námsfrøðilig diplomútbúgving) í Verkætlanarleiðslu og menning av felagsskapi. Próvtøkuverkætlanin var um at fáa stigbýtta fólkaskúlan til eina heild.



Frá august 2011 hevur Mette verið sjálvstøðugur ráðgevi í ráðgevaravirkinum hjá sær og manninum, MEBO-Consult í Fredericia. Umframt at undirvísa í samvirkisnámi og floksleiðslu, er Mette dagligur leiðari fyri ætlanini ”Nu Kan Du Lære Det”, har tey bjóða fram privatundirvísing og eina hjálpandi hond til næmingar í fólkaskúla og studentaskúla.

Vitja heimasíðuna www.mebo-consult.dk ella www.nukandulæredet.dk



© NÁM 2016

© NÁM 2016

# Lesnaður

Tilmæli frá arbeiðsbólki í sambandi við TALIS-kanningarnar – september 2010

Alenkær, Rasmus (ritstj.) (2010): *Den inkluderende skole – en grundbog*. Frydenlund.

Alenkær, Rasmus (ritstj.) (2009): *Den inkluderende skole i praksis*. Frydenlund.

Andersen, Frans Ø. (2011): *Indsats med Cooperative Learning på Petersmindeskolen i Vejle Kommune*. Granskingarfrágreiðing frá Universe Research Lab, Universe Fonden

Bastiansen, Gry (2011): *Små skridt – redskaber til evaluering af klasseledelse.* Dafolo.

Bergkastet, Inger o.fl. (2010): *Relationsorienteret klasseledelse – en praktisk håndbog*. Dafolo.

Bjerresgaard, Helle og Kongsted, Else (2010): *Elever lærer sammen – gruppearbejde som undervisningsform*. Dafolo.

Bjerring, Pia og Lindén, Annika (2008): *Anerkendende Procesøvelser.* Dansk Psykologisk Forlag.

Bochmann, Reinhard og Kirchmann, Ruth (2006): *Kooperatives Lernen in der Grundschule*. NDS Verlagsgesellschaft mbH.

Brüning, Ludger og Saum, Tobias (2009): *Erfolgreich unterrichten durch Kooperatives Lernen 1+2*. NDS Verlagsgesellschaft mbH.

Cefai, Carmel (2009): *Frem elevens livsduelighed*. Dansk Psykologisk Forlag.

Dysthe, Olga (2009): ”Evaluering i klassen til støtte for læring”. Í Kvan nr. 85, 2009. *Individ og fællesskab*.

Egelund, Niels o.fl. (2007): *Elevplaner. Teori og praksis.* Gyldendal.

EVA (2011): *Undervisningsdifferentiering som bærende pædagogisk princip*. Danmarks Evalueringsinstitut.

EVAM (2003): *Når mennesker mødes – idékatalog til interkulturel undervisning*. Ibis, AFS Interkultur, Mellemfolkeligt Samvirke og Statens Pædagogiske Forsøgscenter.

Fagbladet Folkeskolen og Ugebrevet A4 (2006): *Læreroplevelser af elever og deres forældre.*

Heckmann, Lene og Villumsen, Karina (2009): *Klasse- og læringsledelse – en kopi- og arbejdsmappe.* Dafolo.


© NÁM 2016

Hermansen, Mads (2010): *Spilleregler i klassen. Læringsledelse i teori og praksis*. Akademisk Forlag.

Hornstrup, Carsten o.fl. (2008): *Systemisk ledelse. Den refleksive praktiker*. Dansk Psykologisk Forlag.

Jensen, Elsebeth og Løw, Ole (ritstj.) (2009): *Klasseledelse. Nye forståelser og handlemuligheder*. Akademisk Forlag.

Jensen, Elsebeth S. og Brinkmann, Svend (ritstj.) (2011): *Fællesskab i skolen. Udfordringer og muligheder*. Akademisk Forlag.

Jensen, Elsebeth S. og Skibsted, Else B. (2011): *Inkluderende læringsmiljøer*. Endalig frágreiðing um verkætlanina “Inkluderende læringsmiljøer” á tveimum skúlum í Aarhus 08/10.

Johnson, David W., Johnson, Roger T. og Holubec, Edythe J. (2007): *The Nuts and bolts of Cooperative Learning*. Interaction Book Company.

Kagan, Spencer (1992): *Silly Sports and Goofy Games*. Kagan Cooperative Learning.

Kagan, Spencer og Stenlev, Jette (2006): *Undervisning med samarbejdsstrukturer – Cooperative Learning*. Alinea.

Kofoed, Ulla (2010): *Forældresamarbejde med fokus på elevernes læring*. Akademisk Forlag.

Lindahl, Solbritt (2009): *Miljøløftet i folkeskolen*. Dansk Psykologisk Forlag.

Lohmann, Gert (2008): *Klasseledelse og samarbejde. Analyser og handlemuligheder*. Gyldendals Lærerbibliotek.

Madslund, Hanna S. og Rydahl, Kirsten (ritstj.) (2011): *Arbejdsmiljø og helbred i Danmark 2010*. Det Nationale Forskningscenter for Arbejdsmiljø, NFA.

Meyer, Hilbert (2005): *Hvad er god undervisning?* Gyldendal.

Moltke, Hanne og Molly, Asbjørn (2010): *Systemisk coaching. En grundbog*. Dansk Psykologisk Forlag.

Nordenbo, Sven Erik o.fl. (2008): *Lærerkompetencer og elevers læring i førskole og skole*. Kunnskapsdepartementet.

Plauborg, Helle o.fl. (2010): *Læreren som leder. Klasseledelse i folkeskole og gymnasium*. Hans Reitzels Forlag.

Rye, Henning (1997): *Tidlig hjælp til bedre samspil*. Munksgaard.

Sahlberg, Pasi og Leppilampi, Asko (2004): *Samarbejde om læring – en introduktion til Cooperative Learning*. Akademisk Forlag.

Tveit, Arne (2010): *Det ved vi om anerkendelse, ros og klare regler i klasseværelset*. Dafolo.


© NÁM 2016

UCC, UC Lillebælt og Skole og Forældre (2011): *Forældredialog i skolen – en artikelsamling om det gode skole-hjem-samarbejde*. For-di-projektet. www.for-di.dk

Undervisningsministeriet (1997): *Salamanca Erklæringen og Handlingsprogrammet for Specialundervisning*. Undervisningsministeriet.

Undervisningsministeriet (2009): *Fælles Mål 2009 – Elevernes alsidige udvikling. Faghæfte 47*. Undervisningsministeriet.

Weidner, Margit (2010): *Kooperativ Læring i undervisningen*. Dafolo.


© NÁM 2016

© NÁM 2016

# Yvirlit yvir venjingarsíður

## 1 • Samvirkisnám og felagsskapur

1.1 • Hvat eru vit felags um í flokkinum? (lærari) . . . . . 18
1.1 • Hvat eru vit felags um í flokkinum? (næmingur) . . . . . 19
1.2 • Hvat eru vit felags um í toyminum? (lærari) . . . . . 20
1.2 • Hvat eru vit felags um í toyminum? (næmingur) . . . . . 21
1.2 • Hvat eru vit felags um í toyminum? (toymi) . . . . . 22
1.3 • Ein samdur bólkur (lærari) . . . . . 23
1.4 • Putlispælshátturin (lærari) . . . . . 24
1.4 • Putlispælshátturin (næmingur) . . . . . 25
1.5 • Gera hugtøk (lærari) . . . . . 26
1.6 • At innrætta flokshølið – minnislisti (lærari) . . . . . 27
1.6 • At innrætta flokshølið – fyrra uppskot (lærari) . . . . . 28
1.6 • At innrætta flokshølið – seinna uppskot (lærari) . . . . . 29
1.7 • Tilvildarliga gjørdir bólkar (lærari) . . . . . 30
1.8 • Tilrættislagdir bólkar (lærari) . . . . . 31
1.9 • Avtalukalendari (lærari) . . . . . 32
1.9 • Avtalukalendari (næmingur) . . . . . 33
1.10 • Avtaluklokka (lærari) . . . . . 34
1.10 • Avtaluklokka (næmingur) . . . . . 35

## 2 • Floksleiðsla

2.1 • Tá ið tú skalt hava hjálp (næmingur) . . . . . 43
2.2 • Set tíman saman sum eina máltíð (lærari) . . . . . 44
2.3 • Heilahvíld – vippa (lærari) . . . . . 45
2.4 • Heilahvíld – stuttlig gongd (lærari) . . . . . 46
2.5 • Heilahvíld – tað er ein geit (lærari) . . . . . 47
2.6 • Heilahvíld – vit sita á knøunum hvør á øðrum (lærari) . . . . . 48
2.7 • Yvirlit yvir at leggja ein tíma til rættis (lærari) . . . . . 49

## 3 • Inklusión

3.1 • Finn onkran, sum ... (lærari) . . . . . 55
3.1.1 • Finn onkran, sum ... (næmingur) . . . . . 56
3.1.2 • Finn onkran, sum ... (næmingur) . . . . . 57
3.2 • Spjøldur (lærari) . . . . . 58
3.3 • Næmingurin hesa vikuna (lærari) . . . . . 59
3.3 • Næmingurin hesa vikuna (næmingur) . . . . . 60
3.4 • Navnaspæl (lærari) . . . . . 61


© NÁM 2016

3.4 • Navnaspæl (næmingur) . . . . . 62
3.5.1 • Hvørjum kann eg hjálpa við? (næmingur) . . . . . 63
3.5.2 • Hvørjum kann eg hjálpa við? (næmingur) . . . . . 64

## 4 • Viðurkenning

4.1 • Tú dugir væl (lærari) . . . . . 70
4.1 • Tú dugir væl (næmingur) . . . . . 71
4.2 • Gev ein lepa (lærari) . . . . . 73
4.3 • Hvat dugi eg? (lærari) . . . . . 74
4.4 • Síggj næmingin (lærari) . . . . . 75
4.5 • Jalig og neilig atferð (lærari) . . . . . 76

## 5 • Samskifti

5.1 • At tosa saman við navnalepum (lærari) . . . . . 84
5.1 • At tosa saman við navnalepum (næmingur) . . . . . 85
5.2 • At tosa saman við orðalepum (lærari) . . . . . 86
5.2 • At tosa saman við orðalepum (næmingur) . . . . . 87
5.3 • Skipað lurtivenjing (lærari) . . . . . 88
5.3 • Skipað lurtivenjing (næmingur) . . . . . 89
5.4 • At lurta við einum endamáli (lærari) . . . . . 90
5.4 • At lurta við einum endamáli (næmingur) . . . . . 91
5.5 • Tvílæring (lærari) . . . . . 92

## 6 • Sosialir førleikar hjá næmingunum

6.1 • Hin góði lurtarin (lærari) . . . . . 99
6.1 • Hin góði lurtarin (næmingur) . . . . . 100
6.2 • Eg sigi, og eg geri (lærari) . . . . . 101
6.2 • Eg sigi, og eg geri (næmingur) . . . . . 102
6.3 • Viðurkenn (lærari) . . . . . 103
6.3 • Viðurkenn (næmingur) . . . . . 104
6.4 • Eg sigi gott um teg – tað gleðir meg (lærari) . . . . . 105
6.4 • Eg sigi gott um teg – tað gleðir meg (næmingur) . . . . . 106
6.5 • At fata eina støðu (lærari) . . . . . 107
6.5 • At fata eina støðu (næmingur) . . . . . 108

## 7 • Foreldrasamstarv

7.1 • Stuttur fundur – miðdeild (lærari) . . . . . 114
7.1 • Stuttur fundur – miðdeild (foreldur) . . . . . 115
7.2 • Stuttur fundur – framhaldsdeild (lærari) . . . . . 117
7.2 • Stuttur fundur – framhaldsdeild (foreldur) . . . . . 118
7.3 • Hvørjum kunnu vit stuðla við? (lærari) . . . . . 120
7.4 • Hvat heldur tú? (lærari) . . . . . 121


© NÁM 2016

## 8 • Ymisligir næmingar og samvirkisnám

8.1 • Spyrji-umfar (lærari) . . . . . . . . 128
8.2 • Snar-fundur (lærari) . . . . . . . . 129
8.3 • Graffiti-hátturin (lærari) . . . . . . . . 130
8.4 • Hitt ein vin (lærari) . . . . . . . . 131
8.5 • Leiklutir í undirvísingini (lærari) . . . . . . . . 132
8.5 • Leiklutir í undirvísingini (næmingur) . . . . . . . . 133
8.6 • Bingo við orðum (lærari) . . . . . . . . 135
8.6 • Bingo við orðum (næmingur) . . . . . . . . 136

## 9 • Arbeiðið í lærarartoyminum

9.1 • Ymsir arbeiðshættir – inngangur (toymi) . . . . . . . . 142
9.1 • Ymsir arbeiðshættir – kapping (toymi) . . . . . . . . 143
9.1 • Ymsir arbeiðshættir –uppgáva til hvønn sær (toymi) . . . . . . . . 144
9.1 • Ymsir arbeiðshættir – felags uppgáva (toymi) . . . . . . . . 145
9.2 • At umhugsa í eini tilgongd við samvirkisnámi (toymi) . . . . . . . . 146
9.3 • Partar av floksleiðslu at arbeiða við í toyminum (toymi) . . . . . . . . 147




© NÁM 2016

Hvussu kanst tú við støði í felagsskapinum og samstarvandi læringarháttum fáa munadyggar og inkluderandi umstøður um læringina? Tað er millum annað hetta, ið samvirkisnám megnar.

Í hesi bók verður samvirkisnám sett saman við nógvum pørtum úr floksleiðslu, m.a. hvussu tú skipar og stuðlar læritilgongdirnar hjá næmingunum og ger tær tilelvandi, og hvussu tú fært fyrimunir av at leggja dent á ítøkilig øki sum innrættan av flokshøli, eina greiða dagsskrá, nógv virksisfýsni og tilvitað/ur at gera næmingabólkar.

Í bókini eru nógvar venjingar, ið kunnu verða brúktar á øllum flokssstigum í skúlanum. Í venjingunum kanst tú arbeiða og venja bæði fakligar og sosialar partar – ofta samstundis. Kapitlarnir í bókini umrøða evni sum eitt nú felagsskap, floksleiðslu, inklusión, sosialar førleikar, foreldrasamstarv og toymissamstarv – alt við samvirkisnámsháttum.

*Samvirkisnám og floksleiðsla er ein arbeiðsbók, og her eru nógvar venjingarsíður til bæði lærara, næmingar og toymi.*

Mette Stange er útbúgvin fólkaskúlalærari og hevur fleiri ára royndir við undirvísing. Hon hevur áður arbeitt sum námsfrøðiligur ráðgevi við denti á millum annað samvirkisnám og floksleiðslu. Hon er nú sjálvstøðugur ráðgevi í fyritøkuni MEBO-Consult.



Aðrar bøkur um samvirkisnám: *Cooperative Learning i indskolingen* (Hanne Vogelius Mikkelsen), *Kooperativ læring i undervisningen* (Margit Weidner), *Kooperativ læring i klasseværelset* (Wendy Jolliffe), *Bedre møder med Cooperative Learning* (Susanne Nygaard og Åse Bille Jensen) og *Perspektiver på Cooperative Learning* (ritstj. av Annette Hildebrand Jensen).

NÁM